# GERÐABÓK

**Dato:** 24. februar 2022 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr: 24/22 – 53/22**

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Tróndur Sigurðsson
Kári Johansen
Kristianna Winther Poulsen
Súna Mørk
Bjørg Dam
Elsa Berg
Jákup Dam
Gunvør Balle
Annika Olsen
Birgir Nielsen
Ruth Vang
Jóhan Petur Eyðfinnur Johannesen

**LUTTÓKU EISINI:**
Jóan Petur Hentze
Eyðfríð Jacobsen
Eyðna Justinussen
Sigurð Ó Vang

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 24/22 | 22/00750-1 | Annfinn Brekkstein bert frá at møta á býráðsfundi 24. februar 2022 | 102 |
| 25/22 | 22/00011-1 | Mál beind í nevndir 2022 | 103 |
| 26/22 | 21/03637-14 | Matr.nr. 138dn, Hoyvík. Afturkeyp/makaskifti. | 104 |
| 27/22 | 20/00868-1 | Skipan av Miðstovninum (Realskúlin Kongagøta og frk. Cohr) | 107 |
| 28/22 | 15/03761-9 | Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum. | 117 |
| 29/22 | 21/03312-3 | Fótbóltsvøllurin inni í Vika: Endurnýggjan av graslíkisvøllinum | 133 |
| 30/22 | 22/00511-1 | Nýggj dagstovnapláss 2022 | 138 |
| 31/22 | 18/00992-1 | Lendisgøtur | 140 |
| 32/22 | 22/00327-1 | Torg í Hoyvík | 149 |
| 33/22 | 22/00328-1 | Frítíðarhús í Hesti – matr.nr. 101 og 10a | 151 |
| 34/22 | 18/01975-1 | Bústaðarskylda | 153 |
| 35/22 | 21/02624-2 | Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging | 157 |
| 36/22 | 21/04713-1 | Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir | 161 |
| 37/22 | 17/03196-1 | Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum | 166 |
| 38/22 | 21/03668-1 | Grasagarður - Spælipláss 2021 | 178 |
| 39/22 | 21/04574-1 | Viðarlund og trivnaðarøkið á Argjum | 182 |
| 40/22 | 22/00331-1 | Fríðkan av bygdunum | 185 |
| 41/22 | 17/03628-1 | Heildarætlan Eystara havnarøki | 187 |
| 42/22 | 15/01400-1 | Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 197 |
| 43/22 | 21/02118-1 | Dagføring av Norðara Ringvegi við Norðurlandahúsið | 214 |
| 44/22 | 21/04115-10 | Makaskifti við Rennibreytina og Yviri við Strond | 217 |
| 45/22 | 21/04680-3 | Umsókn um keyp av litra og sammanleggin til matr.nr. 91h, Bøgøta 14, Kollafjørður | 219 |
| 46/22 | 20/00731-1 | Nýggja vinnu- og havnaøkið á Sundi | 222 |
| 47/22 | 22/00460-1 | Leigusáttmáli Faroe Ship Føroyar | 227 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 48/22 | 21/03297-2 | LV mál nr. 21/01631 (VS: mál nr. 16/00514 Viðv. leigusáttmálanum á matr. nr. 1e og 1f á Sundi) | 229 |
| 49/22 | 22/00649-1 | Uppskot til nýggja reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað | 232 |
| 50/22 | 22/00502-1 | P/f Fjarhitafelagið – innskot/partapeningur í felagið | 236 |
| 51/22 | 22/00009-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022 | 238 |
| 52/22 | 21/05232-2 | Innskriving í fyrsta flokk, forskúla og frítíðarskúla 2022 | 240 |
| 53/22 | 21/02652-1 | Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu | 243 |

**Til viðgerðar**

## 24/22 Annfinn Brekkstein bert frá at møta á býráðsfundi 24. februar 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 24/22 | 22/00750-1 |

**Málslýsing**
Annfinn Brekkstein  hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Jóhan Petur Johannesen, eru loknar.

**Býráðsfundur 24. februar 2022: Tikið til eftirtektar.**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>24. februar 2022 | Blað nr.: 103<br>Formansins merki: |

# 25/22 Mál beind í nevndir 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 3/22 | 22/00011-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 25/22 | 22/00011-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið til eftirtektar**.**

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið til eftirtektar.

# 26/22 Matr.nr. 138dn, Hoyvík. Afturkeyp/makaskifti.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 27/22 | 21/03637-14 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 26/22 | 21/03637-14 |

**Upprunin til málið** Kommunan hevur tørv á at keypa matrikkul nr. 138dn, til felagshús. Skipan av økinum kring Hoyvíksvøll.

**Lýsing av málinum**

Kommunan arbeiðir við at gera eina heildarætlan fyri Karlamagnussarbreyt, sí mál 20/00622 og umfatar ein partur av heildarætlanini, at skipa økið kring Hoyvíksvøll, sí mál 20/00040 og viðheft kortskjal skjal 20/0040-2.

Framtíðarskýlið v/felagshølum ætlast at verða staðsett á vestursíðuni, men verður framhaldandi stórur partur av brúkarunum/áskoðarunum at koma til vøllin frá eystursíðuni, tvs. Karlamagnusarbreyt. Í uppskotinum er felagshús sett á matrikkulin. Frammanfyri ber eisini til at gera skráa við tribunum. Í mun til vøllin og nýtsluna har, verður tí tørvur á fasilitetum, sum kundu staðið á teimum báðum matrikklunum, sum hoyra til útstykkingina á Karlamagnussarbreyt – tað veri seg goymsla, almenn vesi ella eitthvørt borgaravent endamál í Hoyvík. Kommunan hevur havt samráðingar við eigaran av matr.nr. 138dn, um keyp.

Meklarafelagið Skyn, gjørt virðis virðismeting av grundstykkinum og fyriliggur eisini virðismeting av møguligum makaskiftis grundstykki. Matr.nr. 135nn, Hoyvík.

| Matr. nr. | Vídd m2. | Mest loyvda bygging. | Mett virði |
|---|---|---|---|
| 138dn | 176+175 = 351 | 528 | 2.600.000 |
| 135nn | 427 | 252,6 | 1.400.000 |
| Munur | | | 1.200.000 |
| Útreiðslur eigarans til fyrireikandi bygging. | | | 406.000 |
| Endurgjald tls. | | | 1.606.000 |

Eigari er sinnaður til at fremja makaskifti millum matr.nr. 138dn og 135nn, og at fáa munin í virði 1,2 mill kr. um hann harumframt kann fáa endurgjald fyri tær útreiðslur hann hevur havt til fyrireikandi bygging á matr.nr. 138dn, Hoyvík.

Hann vísir á, at av tí at tað er Tórshavnar kommuna sum ynskir byggiverkætlanina at støðga, má Tórshavnar kommuna bera kostnaðin av hesum útreiðslum sum verða uppgivnar til 0,406 mill. kr. Harumframt skal Tórshavnar kommuna eisini bera allan kostnað av at fremja ætlanina.

Eitt møguligt makaskifti krevur loyvi frá Kommunala eftirlitinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn
Við heimild í § 44, stk. 1, í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri

(kommunustýrislógin) verður ásett:
**§ 1.** Um ikki annað er ásett í lóggávuni, skal fastogn hjá kommununi verða boðin út alment, áðrenn ognin verður seld, sbr. tó § 2.
**§ 2.** Fastogn nýtist tó ikki at verða boðin alment út, um talan er um
*Stk. 2.* Við góðkenning frá landsstýrismanninum kann verða vikið frá kravinum um alment útboð í sambandi við makaskifti og tá tað annars eru serlig viðurskifti, ið tala fyri, at fastognin kann verða seld uttan alment útboð.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

Virðismetingar, matr.nr.138dn og 135nn.
Málsviðgerð 20/00622 Heildarætlan fyri Karlamagnussarbreyt.
Málsviðgerð 20/00040 Skipan av økinum kring fótbóltsvøllin.
Kort skipan av økinum kring fótbóltsvøllin.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/læWttar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at gera eina avtalu við verandi eigarar av matr.nr. 138dn, um møguligt makaskifti.

Avtalan umfatar, at kommunan keypir matr.nr. 138dn, fyri 2,6 mill. kr. og keypir eigari av matr.nr. 138dn óbygda grundstykkið matr.nr. 135nn frá Tórshavnar kommunu fyri 1,4 mill. kr.

Munurin í virði 1,2 mill. kr. verður rindaður eigara. Kommunan gongur ikki ynski eigarans á møti, um at endurrinda 0,406 mill. kr. fyri útreiðslur. Kommunan rindar allar útreiðslur í samband við avgreiðslu av makaskiftismálinum. Mettar útreiðslur til tinglýsing eru uml. tkr. 42.

Avtalan er treytað av góðkenning frá kommunala eftirlitinum.
Fígging av keyp/sølu konto 6175.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 27/22 Skipan av Miðstovninum (Realskúlin Kongagøta og frk. Cohr)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.03.2020 | 63/20 | 20/00868-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 02.12.2020 | 315/20 | 20/00868-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 09.12.2020 | 329/20 | 20/00868-1 |
| 4 Býráðsfundur | 17.12.2020 | 298/20 | 20/00868-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 11/21 | 20/00868-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 19/21 | 20/00868-1 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 70/21 | 20/00868-1 |
| 8 Mentamálanevndin | 09.06.2021 | 153/21 | 20/00868-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 147/21 | 20/00868-1 |
| 10 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 171/21 | 20/00868-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 15.11.2021 | 277/21 | 20/00868-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 308/21 | 20/00868-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 01.12.2021 | 280/21 | 20/00868-1 |
| 14 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 321/21 | 20/00868-1 |
| 15 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 313/21 | 20/00868-1 |
| 16 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 25/22 | 20/00868-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 33/22 | 20/00868-1 |
| 18 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 27/22 | 20/00868-1 |

**Upprunin til málið:**
Samtykt hin 30. oktober 2019 í máli 19/01969 Tøkir skúlabygningar um at Realskúlin, Skúlin í Kongagøtu og húsini hjá Frk. Cohr verður dagstovnur sum samanhangandi tilboð.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Gjørt er uppskot til skipan av stovninum, harundir viðvíkjandi plásskapasiteti. Gjørt er eisini uppskot til tillaging av bygninginum í Kongagøtu til dagstovnavirksemi og kostnaðarmeting tí viðvíkjandi.

Skotið verður upp, at stovnsheitið verður Miðstovnurin, sum longu verður brúkt á staðnum.

Í viðgerðina er eisini tikin við vøggustovuvirksemið, sum Miðstovnurin hevur í Hornabø.  Harumframt hevur eisini verið viðgjørt hølistørvur til børn við serligum tørvi, sum í dag heldur til í leigumáli á Frælsinum.

Hølisstøðan hjá Stella Maris Vøggustovu hevur eisini verið viðgjørd sum partur áv hesum máli, sí tilmæli í máli 19/01795.

Høvuðsbygningarnir eru Realskúlin og Kongagøta við hvør sínum fimm stovum. Til ber at skipa virksemið alt eftir tørvi (hóskandi *flowi*). Samlaði plásskapasiteturin í báðum bygningunum verður uml. 50-53 vøggustovubørn og 100-110 barnagarðsstovubørn.

Húsini hjá Frk. Cohr gevur Miðstovninum umstøður til børn við serligum avbjóðingum, har møguleiki er at fara burtur frá eftir tørvi, umframt til annað atknýtt virksemi hjá stovninum. Garðsøkið verður skipað eftir aldri á børnunum.

Miðstovnurin hevur vøggustovu í Hornabø. Nú Miðstovnurin verður víðkaður, er fyri virksemið skilabest er at flyta alt virksemið á eitt stað.

Bygningurin í Hornabø verður hinvegin mettur væl egnaður at hýsa tilboðnum til børn við serligum tørvi, sum í dag eru á Frælsinum. Í hesum sambandi verður mælt til at siga upp leigusáttmála við UMMR og flyta tilboðið í Hornabøm, tá bygingurin verður tøkur.

Gjørt er uppskot til tillagingar av bygninginum í Kongagøtu, sí skjal. Gjørd er eisini kostnaðarmeting av hesum íroknað garðsøkið, sí skjal. Hesi verða løgd fram á fundinum.

Íløgujáttan er ikki tøk til endamálið.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
19/01795 Høvuðsumvæling Stella Maris Vøggustova
18/02825 Leigumál á Frælsinum

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Byggingin, tá allur bygningurin er tikin í nýtslu, er ætlað at økja plásskapasitetin, sum hevur við sær øktan rakstur samsvarandi barnatalinum. Væntað verður, at aftrat teimum 5 mió í íløgujáttan 2021 skulu aðrar umleið kr. 2 mió til at fáa allan bygningin kláran.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 5.000.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato 2021 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk | 3175 | Nýggj projektkonta | | 3175 | L00001 Løgukarmur | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Trivnaðarastjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at umrøða málið og fíggjartørvin.

**Mentamálanevndin 11. mars 2020:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Víst verður til málslýsingina omanfyri og íløgujáttan í fíggjarætlanini 2021 kr. 5 mió á løgukontu 3175 Barnaansing til Miðstovnin.

Skúlavirksemið í skúlanum í Kongagøtu er flutt út á Fløtir, og alstórur tørvur er at fáa bygningin gjørdan kláran til dagsstovnavirksemið hjá Miðstovninum (fevnandi um Realskúlan, skúlan í Kongagøtu og Frk. Cohr-húsini), sum áður er samtykt.

Partur av hesum er at flyta dagstovnavirksemi úr øðrum hølum. Frítíðartilboðið á Frælsinum 30 til børn við serligum avbjóðingum skal flyta til Hornabø í seinasta lagi um ársskiftið, tá leigumálið við UMMR gongur út. UMMR hevur gjørt nýggja leiguavtalu við ÍSF um hølini. Vøggustovuvirksemið, sum er í Hornabø í dag, skal flyta í Miðstovnin.

Í løtuni eru frammanundan ov nógv børn í Realskúlanum, tí ætlanin at gera skúlan í Kongagøtu um til dagstovnavirksemið hevur drigið út. Neyðugt er at gera bráðfeingis tillagingar í Frk. Cohr-húsinum (smáar tillagingar) og í skúlanum í Kongagøtu (meira umfevnandi).

Aftrat hesum er alneyðugt at lata upp fleiri vøggustovupláss í BARN skipanini. Framrokning av plásstørvi vísir, at í januar 2021 og frameftir vanta í minsta lagi 47 vøggustovupláss. Verða ikki fleiri vøggustovupláss útvegað, verður bíðitíðin hjá foreldrum at fáa pláss til børnini enn drúgvari. Harumframt tekur Stella Maris Vøggustova ikki fleiri børn inn.

Játtanin er tí eisini ætlað til at lata tvær vøggustovur (uml. 18-20 pláss tilsamans) upp aftrat í Miðstovninum sum skjótast tíðarætlan fyri tillagingarnar er greið.

Hesar kr. 5 mió røkka til ein part av ætlaðu bygningstillagingunum, men nóg mikið til at fáa virksemið í parti av bygninginum í gongd og góðkent. Umframt okkurt smávegis arbeiði í Frk. Cohr-húsinum er tað serliga ovara hæddin í Kongagøtu, har innrættast skal nýggj vøggustova við skiftiumstøðum, verjur móti trappum, nýggjan felags køk, vesini tillagast til vøggustovur við skifti møguleikum og smáum kummum, garderobur o.a. skal setast upp, og málaraarbeiði skal gerast.

Neyðugt er at fáa arbeiðið í gongd beinanvegin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at heimila umsitingini at fyrireika og gera avtalur um ymsu arbeiðini á Miðstovninum, og í hesum sambandi at játta kr. 5 mió á kontu 3175 Barnaansing til løgukontu við heitinum Miðstovnurin.

**Mentamálanevndin 02. desember 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 09. desember 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum við tí ískoyti, at arbeiðið skal bjóðast út og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, mæla til at bjóða arbeiðið út og leggja málið fyri aftur til støðutakan tá tilboð eru innkomin.

**Býráðsfundur 17. desember 2020:** Samtykt við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøður ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Bergun Kass.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**

Fyrisitingin boðaði nevndini í tposti 25. januar 2021 frá bráðfeingis hølistørvi til dagstovnin Miðstovnin, sum loystur verður við at stutttíðarleiga høli frá Bústøðum í Finsen, og sum nú verður formliga lagt fyri nevndina, sí avtaluuppskot.

Talan er um loysn í uml. 6 mánaðir, ið kostar kr. 20.000 mánaðarliga umframt el/hita, sí sáttmála, har til ber at leingja leigumáli stutt tíðarskeið eftir tørvi.

Arbeiðið at gera skúlan í Kongagøtu til dagstovnavirksemi verður í fyrsta lagi liðugt í summar, møguliga nakað út á heystið. Í løtuni verður útboð fyrireikað. Tá tíðarætlanin er greið ber til at bjóða nýggj pláss í BARN.

Støðan hevur avleiðingar bæði fyri Miðstovnin og serfrítíðarskúlan á Frælsinum, hvørs leigumál á Frælsinum gekk út á nýggjárinum, og har ÍSF sum nýggjur leiðari ikki er sloppin inn vegna virksemið hjá kommununi í bygninginum.

Beint nú eru 32 vøggustovubørn og 43 barnagarðsbørn í realskúlanum. Hetta er alt ov nógv í mun til støddina á bygninginum. Ætlanin var, at barnagarðsbørnini longu vóru flutt í Kongagøtu, og við hølunum í Finsen ber til at flyta flestu barnagarðsbørnini úr realskúlanum, sum sostatt gevur ta luft, ið skal til fyri at realskúlin kann hava eitt vanligt barnatal.

Hølini krevja ávís arbeiði at gera klár til dagstovnavirksemi m.a. garderobur, vask, ljóðplátur og hegn millum bygningarnar. Arbeiðið er sett í gongd. Ætlanin er at fíggja hesar tillagingar og rakstur av hølunum við verandi játtanum konta 3215 Barnaansing aðrar útreiðslur.

Útbjóðing av arbeiðinum í Gula skúla er undir fyrireiking og ætlast lagt fyri nevndina á fundinum í mars.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildina mæla til at samtykkja leiguavtaluna við Bústaðir fíggjað av kontu 3215 Barnaansing aðrar útreiðslur og beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen, tekur undir við mentamálanevndini.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Ískoyti:**
Víst verður til býráðssamtykt 17. desember 2020, har umsitingini er heimilað at bjóða út arbeiðið at gera bygningin í Kongagøtu um til dagstovn og gera avtalur um ymsu arbeiðini.

Síðan tá er leigumál gjørt viðvíkjandi hølum í Finsen sum bráðfeingis loysn viðvíkjandi plássum. Eisini er verkætlanin nágreinað og kostnaðarmett, sí hjálagdu tekningar og kostnaðarmeting.

Heimildin at gera avtalur fevnir um tøku játtanina kr. 5 mió. Sbrt. kostnaðarmetingini verður hetta tepurt. Tá tilboðini koma inn, má metast um møguliga meirfígging ella tillaging av verkætlanini.

Kostnaðarmetingin fevnir eisini um útiøkið og spælipláss, sum í ávísan mun eisini hevur samband við Grasagarð, Frk. Cohr garðin og Finsen. Við atliti at tøku játtanini verður tó mett neyðugt at raðfesta arbeiðið við bygninginum fyrst, men soleiðis, at girðingar og trygd kring økið verður gjørd til tess at dagstovnaplássini kunnu fáast í brúk skjótast.

Harumframt skal upplýsast, at sjálv Kongagøtan í næstum verður grivin upp í sambandi við fjarhitaleiðing, og at tað í mun til útiøkið og spælipláss til Miðstovnin er skilabest at bíða eftir, at tað arbeiðið er liðugt. Tíðarætlan í hesum sambandi er ógreið í løtuni. Aftrat skulu skúrarnir í Frk. Cohr-garðinum av økinum fyri at geva pláss til spælipláss og útileikur. Arbeiðið við útiøkinum verður tí at taka upp seinni og játtan útvegast til tað.

Arbeiðið verður boðið út til tveir arbeiðstakarar sum undirhondsboð.

**Tilmæli:**
Kunnað verður um málið.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Lisitatión var 7. mai 2021. Úrslitið varð hetta:

- Búsetur kr. 6.805.598
- North kr. 8.365.894

Eingin teirra hevur fyrivarni.

Samlaða kostnaðarmetingin, sí hjálagt, við innbúgvi, ráðgeving, spælipláss/spæliútgerð, mvg, óvæntað v.m. er kr. 11.482.137,45 – tá er roknað við kr. 2 mió til spæliplássið/spæliútgerð, sum mett verður er alneyðugt at hava við, so at námsfrøðiliga virksemið inni og úti kann virka nøktandi.

Byggiarbeiðið verður sambært ætlanini liðugt miðjan mars 2022. Leigumálið um fyribilshøli til stovnin í Finsen má leingjast samsvarandi byggitíðini, tvs. til og við mars 2022. Útreiðslan er tikin við í kostnaðarmetingina omanfyri.

Tøk løgufígging til hesa verkætlanina L31012 Umbygging í Kongagøtu (Miðstovnurin) er kr. 5 mió, fíggjartørvur er sostatt kr. 6,5 mió.

Á grein 3 í fíggjarætlanini eru tvær aðrar íløgujáttanir til ávikavist Dagstovnin á Argjum kr. 1 mió og Frítíðarskúlan í Kollafirði kr. 2 mió. Báðar verkætlanir eru í fyrireiking.

Skotið verður tí upp, at restfíggingin til umbyggingina av Miðstovninum við spæliplássi kr. 6,5 mió verður játtað til endamálið í íløguætlanini fyri 2022.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á húsaumsitingini mæla til:

- at gera arbeiðstøkusáttmála við Búsetur,
- at restfígging kr, 6,5 mió verður játtað til endamálið av íløguætlanini 2022,
- at leingja leiguavtalu við Bústaðir um høli í Finsen til og við mars 2022, og
  at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Formaðurin setir málið á skrá við uppskoti um at annulera útboðið at gera bygningin í Kongagøtu um til dagstovn, og í staðin at útvega nýggj pláss í Lonunum í Hoydølum og í Stella Maris Vøggustovu. Víst verður í hesum sambandi til mál 21/02652 Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu, sum er til viðgerðar í trivnaðarnevndini, og har ætlanin er at brúka bygningin í Kongagøtu til skúla. Víst verður eisini til mál 19/01963 Tøkir skúlabygningar og 19/01795 Høvuðsumvæling Stella Maris Vøggustova.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**
**Miðstovnurin:**
Samráðingar hava verið við Búsetur um arbeiðstøkusáttmála. Samráðingarnar eru steðgaðar vegna omanfyri nevnda. Tað er í skrivandi løtu ógreitt, um Búsetur leggur fíggjarligt krav móti kommununi.

Uppskotið hevur við sær, at bygningurin í Kongagøtu ikki verður partur av Miðstovninum sum samanhangandi dagstovnur við realskúlan og Frk. Cohr-húsið.

Hetta broytir ætlanina við Miðstovninum í miðbýnum grundleggjandi, serliga við atliti at plásskapasitetinum.

Arbeitt hevur verið fram í móti, at Miðstovnurin við Kongagøtu og Realskúlanum kundu hava 4 vøggustovur við tilsamans 51 plássum og 5 barnagarðsstovur við tilsamans 110 plássum. Um Miðstovnurin framyvir bert er realskúlin, er talan um 1 vøggustova við tilsamans 14 plássum og 3 barnagarðsstovur við 38 plássum í alt.

Samlað er talan um 37 færri vøggustovupláss og 72 færri barnagarðspláss á Miðstovninum enn roknað var við.

Miðstovnurin hevur í dag stutttíðar leigumál í Finsen, tí hesi børn skuldu ætlandi í Kongagøtu næsta summar. Nakrar smáar tillagingar vórðu gjørdar í hølunum í hesum sambandi. Finsen verður mett ikki at vera nøkur varandi loysn til dagstovnavirksemi, men í eini tillagingargongd, har Miðstovnurin í realskúlanum fær skipað seg, verður neyðugt at halda fram við leigumálinum eini tvey-trý ár aftrat.

Um stovnurin skal halda fram har, so skulu størri tillagingar gerast, eitt nú eru tað betong gólv og ógvuliga hart hjá starvsfólkum at ganga á og hjá børum at spæla á. Umframt annað gólv, mugu eisini vesi viðurskiftini gerast betri.

Í hesi tillagingargongd verður ikki latið upp fyri fleiri plássum í Miðstovnunum, tí talið av børnum er alt ov høgt í mun til, hvat realskúlin rúmar. Nýggj pláss til vøggustovu og barnagarðsstovu verða ikki at fáa aftur fyrr enn 1. august 2024. Tá svarar barnatalið til tað, sum realskúlin rúmar.

Støða skal eisini takast til, hvussu realskúlin skal skipast bæði í mun til tal av plássum og samanseting av vøggustovu og barnagarðsstovu. Bygningurin hevur tørv á umvælingum og dagføringum, skal allur bygningurin, m.a. eisini loftið, kunna nýtast til dagstovnavirksemi. Eisini manglar stovnurin spælipláss, goymslupláss til leikur, og pláss at stilla barnavognar, tá vøggustovubørnini sova.

Væntað hevur verið, at Miðstovnurin tók nýggj børn inn í bygningin í Kongagøtu frá summarinum 2022. Foreldur hava samsvarandi havt møguleika at bóka pláss á Miðstovninum. Broytingin hevur við sær, at 10 foreldur skulu hava boð um at bóka annað pláss á øðrum stovni ella fáa í boði fyribilspláss í Lonunum í Hoydølum.

Steðgað verður samstundis fyri nýggjum upptøkum í Miðstovninum fram til januar 2024, tí stovnurin, nú Kongagøta ikki er í myndini, hevur ov nógv børn inn alt hetta tíðarskeiðið (upp til 14 børn ov nógv í barnagarðinum og 17 í vøggustovuni).

**Annar plásskapasitetur:**
Við ætlanini at lata Stella Maris Vøggustovu at halda fram eru 35 vøggustovupláss tøk, tá stovnurin er fullur. Stovnurin hevur havt hægri barnatal, men tað hevur verið hægri enn fermetratalið pr. barn loyvir. Bygningurin skal umvælast, endalig tíðarætlan og kostnaðarmeting er ikki tøk, heldur ikki, um neyðugt er at steingja stovnin í byggitíðini.

Sankta Jósefs Barnagarður fer at hava 2 vøggustovur og 2 barnagarðsstovur, áður vóru 4 barnagarðsstovur við tilsamans 85 plássum. Hetta hevur við sær, at talið av barnagarðsplássum lækkar við tilsamans 34 plássum yvir tvey ár. Hinvegin koma koma tilsamans 20 nýggj vøggustovupláss yvir 2 ár.

Lonirnar í Hoydølum eru í verandi støðu bert ein fyribilsloysn til ársenda 2023 samsvarandi loyvinum frá friðingarmyndugleikunum, sí skjøl 14 og 1). Ætlan um at endurútvega hesi pláss eigur at fara í gongd skjótast. Í løtuni hava upp til 27 børn fyribilspláss í Lonunum. Skal stórt tal av fyribilsplássum stovnast í Lonunum aftrat, er neyðugt at gera ávísar umstøður betri, eitt nú vesir og útiøki, og sum fígging má útvegast til.

Tá serskúlatilboðið í Lonunum er flutt í Eysturskúlan um nýggjársleitið, kann dagstovnavirksemið í Lonunum í Hoydølum víðkast til at fevna um 3 barnagarðsstovur (60 børn) og 4 vøggustovur (48 børn). Talan er tó um fyribilspláss, ikki um varandi pláss. Verða børnini tikin inn uppá fyribilspláss, má kommunan samstundis tryggja, at onnur varandi pláss eru tøk til at taka ímóti børnunum í seinasta lagi við ársenda 2023, t.e. um tvey ár, tá loyvið í Hoydølum gongur út.

**Plásstørvur:**
Í løtuni kann kommunan ikki vísa á onnur varandi pláss enn tey, sum eru í skipanini í dag, tí eingin útbyggingarætlan er í gongd. Samráðingar eru við Búsetur um útbygging av Dagstovninum á Hamrinum við fimm stovum, men hesi pláss verða ikki fyrr enn um 15-18 mánaðirnar í fyrsta lagi, um byggiarbeiðið byrjar nú. Støðan viðvíkjandi høvuðsumvæling ella nýbygging av Dagstovninum á Argjum er tá ikki tikin við.

Í juni 2021 varð átrokandi plásstørvurin mettur til at vera upp móti 90 børnum. Talan er her um børn, ið eru eldri enn 1 ár, og enn ikki vóru sloppin inn á stovn. Í løtuni er støðan við plásstørvi á dagstovnaøkinum í Tórshavnar kommunu tann, at tað støðugt eru fleiri børn á hvørjum stovni, enn tað í roynd og veru eru pláss til sambært reglunum. Samstundis hevur eitt vaksandi barnatal við fleiri stórum fylgjandi árgangum frá 2018 og fram til nú umframt tilflyting við sær, at tørvurin økist nakað afturat komandi árini.

Metti tørvurin á nýggjum føstum dagstovnaplássum er sostatt umleið 130 vøggustovupláss og 95 barnagarðspláss. Hesi pláss nøkta átrokandi tørvin, har hædd eisini er tikin fyri einum nakað vaksandi barnatali, samstundis sum at talið av børnum á verandi dagstovnunum ikki skal vera hægri, enn stovnarnir eru roknaðir til.

**Fíggjarviðurskifti dagstovnaøkið:**
Tey yvir 100 plássini í Kongagøtu var sera bílig loysn hjá kommununi at nøkta ein stóran part av plásstørvinum á dagstovnaøkinum. Í fíggjarætlanini 2021 eru kr. 5 mió settar av til endamálið og í fíggjarætlanaruppskotinum 2022 aðrar kr. 4 mió.

Skal realskúlin vera verandi dagstovnur, verður sum omanfyri nevnt neyðugt at gera hølisumstøðurnar betri umframt at etablera spælipláss. Eingin kostnaðarmeting fyriliggur. Harumframt kemur kostnaður at leingja leigumál í Finsen uml. kr. 250.000 um árið. Eingin kostnaðarmeting fyriliggur um aðrar tørvandi tillagingar í Finsen, sí eisini omanfyri.

At gera Stella Maris Vøggustova í nøktandi stand er mett til kr. 6-7 mió.

At gera neyðugar hølistillagingar í Lonunum í Hoydølum mugu síggjast saman við, at bygningurin, so sum loyvini nú eru, bert skal virka tvey ár aftrat, í øllum førum á hesum stað. Neyðugt er at fáa fleiri vesi gjørd.

Eisini skal eitt hóskandi spælipláss gerast. Harumframt er kostnaður til at etablera fleiri stovur. Neyv kostnaðarmeting fyriliggur ikki. Leigukostnaður árliga er kr. 1,1 mió.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla nevndini til at taka støðu til at annulera útboðið viðvíkjandi arbeiðnum tillaga bygningin í Kongagøtu til dagstovnavirksemi.

**Mentamálanevndin 15. november 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at annulera útboðið viðvíkjandi tillagingum av bygninginum í Kongagøtu til dagstovnavirksemi. Harumframt samtykt, at játta kr. 800.000 av løgukontu 3175 Barnaansing av fíggjarætlanini 2022 til at betra hølisviðurskiftini í Finsen og útiøkið til Miðstovnin, og at játta kr. 800.000 av løgukontu 3175 Barnaansing av fíggjarætlanini 2022 til at gera umstøðurnar í Lonunum í Hoydølum klárar til størri barnatal, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Annika Olsen og Gunvør Balle, samtykti at halda fast í ætlanini at tillaga bygningin i Kongagøtu til dagstovnavirksemi.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur undir við minnilutanum í mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur mánadagin.

**Mentamálanevndin 01. desember 2021:** Samtykt at heimila umsitingini at gera sáttmála um arbeiðið at gera bygningin til dagstovnavirsekmið íroknað spælipláss innanfyri ein karm uppá kr. 3 mió at fíggja av løgukontu 3175 L31012 Miðstovnurin, og at leggja málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, mælir til at játta tær upprunaligu fimm milliónir krónurnar til arbeiðið at gera bygningin kláran til dagstovnavirksemi.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Gunvør Balle:

Mælt verður til:
- at gera arbeiðstøkusáttmála við Búsetur
- at restfígging kr. 6,5 mió. Kr. Verðu rjáttað til endamálið av íløguætlanini 2022
- at leingja leiguavtaluna við Bústaðirum høli í Finsen til og við mars 2022

Broytingaruppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Birita Baldvinsdóttir Iversen og Bjørg Dam.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fyrireikingar til upprunaligu verkætlanina, samtykt í býráðnum 17. desember 2020, hevur konta 6110 Umsiting og røkt av bygningum lagt út fyri ráðgevaraarbeiðið í tí sambandi.

Talan er um kr. 432.140 u/mvg fevnandi um arkitektaráðgeving kr. 132.090 u/mvg og ymsa verkfrøðingarráðgeving fyri kr. 300.050 u/mvg. Samlað við 25% mvg er upphæddin kr. 540.175.

Tá býráðið 16. desember 2021 játtaði kr. 3 mió sum karm uppá arbeiðið at gera bygningin í Kongagøtu kláran til dagstovnavirksemið av løgukontu 3175 L31012 Miðstovnurin, vóru omanfyri nevndu ráðgevaraútreiðslur ikki tiknar við.

Hesar útreiðslur tyngja raksturin á kontu 6110. Mett verður, at upprunaliga løgujáttanin til Miðstovnin eigur at fíggja hetta. Tann játtanin er nú at finna á LK31012 Miðstovnurin, har eru kr. 1.310.000 eftir. Skotið verður upp at játta kr. 540.175 v/mvg av løgujáttan 3175 Barnaansing LK31012 til L31012 Miðstovnurin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðari á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á bygningsdeildini mæla til at játta kr. 540.175 v/mvg av løgujáttan 3175 Barnaansing LK31012 til L31012 Miðstovnurin til tess at fíggja nevndu ráðgevarakostnaðir, og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

## 28/22 Veiðifelagið Byrsumúli : Áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa fyri at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 03.05.2017 | 108/17 | 15/03761-9 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.06.2017 | 162/17 | 15/03761-9 |
| 3 Mentamálanevndin | 04.10.2017 | 234/17 | 15/03761-9 |
| 4 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 310/17 | 15/03761-9 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 85/18 | 15/03761-9 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 104/18 | 15/03761-9 |
| 7 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 159/18 | 15/03761-9 |
| 8 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 203/18 | 15/03761-9 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 178/18 | 15/03761-9 |
| 10 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 152/18 | 15/03761-9 |
| 11 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 270/18 | 15/03761-9 |
| 12 Mentamálanevndin | 16.01.2019 | 31/19 | 15/03761-9 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.02.2019 | 26/19 | 15/03761-9 |
| 14 Tekniska nevnd | 12.03.2019 | 18/19 | 15/03761-9 |
| 15 Mentamálanevndin | 13.03.2019 | 98/19 | 15/03761-9 |
| 16 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 01.04.2019 | 13/19 | 15/03761-9 |
| 17 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 143/19 | 15/03761-9 |
| 18 Mentamálanevndin | 22.10.2019 | 278/19 | 15/03761-9 |
| 19 Fíggjarnevndin | 13.11.2019 | 306/19 | 15/03761-9 |
| 20 Býráðsfundur | 28.11.2019 | 268/19 | 15/03761-9 |
| 21 Mentamálanevndin | 05.02.2020 | 42/20 | 15/03761-9 |
| 22 Fíggjarnevndin | 12.02.2020 | 43/20 | 15/03761-9 |
| 23 Býráðsfundur | 27.02.2020 | 35/20 | 15/03761-9 |
| 24 Mentamálanevndin | 02.04.2020 | 96/20 | 15/03761-9 |
| 25 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 174/20 | 15/03761-9 |
| 26 Fíggjarnevndin | 17.06.2020 | 169/20 | 15/03761-9 |
| 27 Býráðsfundur | 25.06.2020 | 143/20 | 15/03761-9 |
| 28 Mentamálanevndin | 09.09.2020 | 226/20 | 15/03761-9 |
| 29 Mentamálanevndin | 26.10.2020 | 294/20 | 15/03761-9 |
| 30 Fíggjarnevndin | 28.10.2020 | 284/20 | 15/03761-9 |
| 31 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 226/20 | 15/03761-9 |
| 32 Mentamálanevndin | 28.10.2020 | 296/20 | 15/03761-9 |
| 33 Mentamálanevndin | 10.02.2021 | 12/21 | 15/03761-9 |
| 34 Mentamálanevndin | 14.04.2021 | 95/21 | 15/03761-9 |
| 35 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 86/21 | 15/03761-9 |
| 36 Mentamálanevndin | 27.04.2021 | 106/21 | 15/03761-9 |
| 37 Fíggjarnevndin | 28.04.2021 | 100/21 | 15/03761-9 |
| 38 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 116/21 | 15/03761-9 |
| 39 Mentamálanevndin | 01.12.2021 | 283/21 | 15/03761-9 |
| 40 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 28/22 | 15/03761-9 |
| 41 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 32/22 | 15/03761-9 |
| 42 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 28/22 | 15/03761-9 |

**Málslýsing:**
Veiðifelagið Byrsumúli sendi í 2015 áheitan um at fáa samstarv í lag við kommununa um at betra um viðurskiftini hjá skjótingini í høvuðsstaðnum (sí hjáløgd skjøl). Síðani hevur verið nakað av samskifti millum kommununa og felagið.

4. apríl 2017 sendir felagið umsókn um stuðul til projektering av eini verkætlan at dagføra skjótibreytirnar.

Talan er um tilboð frá Sp/f HMP Consult

"Prísurin fyri at gera eitt projekt er 450.000,- umframt MVG.
Við í hesum er:

- Myndugleikaprojekt og projekt klárt til útbjóðing.
-

Í hesum er íroknað:

- Lendisprojekt við vegum og gøtum.
- Dekkgrót fram við fjørðuni.

Skal viðmerkja, at vanliga er neyðugt at gera simuleringar á Hydraulisk institut í DK, fyri at áseta stødd á dekkgroti og hvussu stórur verjugarðurin skal gerast.
Hettar er so ikki íroknað prísin og kostar hettar neyvan undir 100.000,- at fáa gjørt. Tað kunnu vit so venda aftur til, kanska "overkill" frá mínari síðu.

- Innbyggja skýli, smærri bygningar o.t. í samb. við skjótivøllin.
- Ljós fram við vegum og gøtum.
- Uppmáting av lendinum.
- Visualisering av verkætlanini.

Tit senda okkum mát og plasering av skýlum, lutum o.t.
Er nakað eg havi gloymt, so hoyri eg frá tykkum. Eg hugsaði at tit skuldu hava eina samlaða loysn frá okkum."

Í sambandi við at skjótibreytin bleiv gjørd í farnu øld og síðani hevur verið drúgt samskifti við ymiskar myndugleikar v.m. um viðurskiftini har.

Møgulig útbygging vil kunna viðføra at ymisk viðurskifti skulu takast uppaftur, herundir:

- atlit til friðing sbrt. lógini um náttúrufriðing: http://www.logir.fo/Logtingslog/48-fra-09-07-1970-um-natturufriding-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-110-fra-29
- atlit til landsvegalógina sbrt. lógini um landsvegir: http://www.logir.fo/Logtingslog/51-fra-25-07-1972-um-landsvegir-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-18-fra-8

- atlit til lógina um umhvørvisvernd: http://www.logir.fo/Logtingslog/134-fra-29-10-1988-um-umhvorvisvernd-sum-seinast-broytt-vid-logtingslog-nr-128-fra-22

Í fall farið verður undir hesa tilgongd og herundir projektering er hóskandi at gera eina nærri avtalu við felagið um innihald og treytir í verkætlanini.
Samstundis er ivasamt um tað er skilagott at gera eina projektering áðrenn neyvari loyvi fyriliggja. Í sofall má eini meiri principiell tilgongd vera fyrst. Spurningurin er so eisini um tað er felagið ella kommunan sum skal standa fyri tí?

Ongin peningur avsettur til endamálið Konta 5365 - Stuðul til ítrótt rúmar ikki slíka játtan í verandi støðu.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at taka principiella støðu til um farast skal víðari við umsóknini
b). at taka støðu til møguliga raðfesting á fíggjarætlan 2018 ella seinni ella á eykajáttan.

**Mentamálanevndin 03. mai 2017:** Ein minniluti, Gunvør Balle og Marin Katrina Frýdal, tekur ikki støðu til tilmælini, men vil taka málið upp aftur á seinni fundi.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, tekur undir við tilmælunum.

**Tilmæli:**
Til tess at taka málið upp aftur mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til, at umsitingin saman við felagnum nágreinar verkætlanina við Sandvíkir, bæði í mun til neyðug myndugleikakrøv og verkseting sum grundarlag fyri seinni støðutakan til projektering, útboð og fígging.

**Mentamálanevndin 15. juni 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Í summar hevur umsitingin havt samskifti við Býrsumúla um málið. Mett verður at mest hóskandi er at fyrireikingarnar av verkætlanini verða í tveimum stigum. Í fyrstu atløgu at fáa ment verkætlanina fram til sonevnt skipanaruppskotsstig og við støði í tí fáa til vega dagførdar góðkenningar, áðrenn farið verður undir detailprojektering og myndugleikaverkætlan. Leysliga mett kann eitt slíkt fáast til vega fyri 150 tkr.

Í samskiftinum hevur kommunan eisini fingið avrit av góðkenningum fyri verandi skjótianlegg t.e.:
- góðkenning frá yvirfriðingarnevndini
- skjótiloyvi frá politinum
- umhvørvisgóðkenning

Viðv. viðurskifti í mun til lógina um landsvegir, so er tað samskifti ikki endaliga avklárað.

Ítøkiliga er hugsanin at gera eina samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av verkætlanini. Uppskot til avtalu kann ætlandi verða klárt til nevndarfundin í oktober. Tá tann tilgongdin er komin á mál ber til at projektera verkætlanina lidna og bjóða hana út.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at fáa heimild at gera samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti fíggjað av rakstri kontu xxx.

**Mentamálanevndin 04. oktober 2017:** Útsett.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Samtykt at umsitingin fer undir samskifti við Byrsumúla og aðrar áhugapartar innan skjóting fyri at kanna aðra møguliga staðseting og felags loysn við skjótibreyt. Málið verður beint í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Við støði í samtyktini í mentamálanevndini frá 29. november 2017, varð fundur fyriskipaður við Byrsumúla, Veiði- og skjótifelagið, Ark. Kommando og løgregluna, har feløgini/eindirnar vóru biðin um at greiða frá sínum virksemi og staðsetingum. Umrøtt varð, um til ber at samantvinna fleiri áhugapartar innan skjóting á einum stað.

Tørvurin hjá ymsu áhugapørtunum innan skjóting er ymiskur. Byrsumúli hevur aðrar fortreytir enn hinir partarnir, sum heilt avgjørt kundu verið saman um eina felags loysn við skjótibreyt. Millum annað hevur rætningurin og sólargangurin stóran týdning fyri Byrsumúla, meðan hesi ongan týdning hava fyri hinar partarnar. Í verandi støðu er ikki nøkur eyðsæð staðseting eyðmerkt ella uppskot komin um framtíðar staðsetingar, har hesi feløgini/eindirnar kunnu savnast á einum stað.

Um hugt verður eftir økinum, matr. 139e, har Byrsumúli heldur til í dag, so hóskar staðsetingin avbera væl til teirra virksemi, og stuðlar økið undir fortreytunum, sum skulu til fyri at skapa góðar karmar til skjótingina hjá Byrsumúla. Tó skal hædd takast fyri, at breytirnar verða góðkendar av altjóða serfrøðingum fyri at skipa altjóða kappingar. Umframt at øll trygdarkrøv, fráleika- og fráboðanarkrøv verða lokin í mun til almenna ferðslu á landi og sigling fram við landi. Í Danmark er tað ”Politiets og Justitsministeriets skydebane inspektør”, sum tekur sær av slíkum málum.

Óljóð- og dálkingarstøðan eigur eisini verða endurskoðað aftaná seinastu umhvørvisgóðkenning, ið var í 2006. Skjótibreytir eru kap. 5 virkir, ið Umhvørvisstovan hjá landinum varðar av. Virksemið er broytt, har skotið verður sunnu- og halgidagar. Virksemið í økinum hevur aftaná 30 ár sett síni neiligu merki á annars serstaka vakra lendið í Sandvíkum.

Í dag liggur økið á markinum til útjaðaran av Havnini, og er økið náttúruvakurt við fjøru og fríum útsýni út á sjógv. Ídnaðarøkið á Hjalla er nærmasti granni og ber økið brá av nógvari ferðslu. Í nærmastu framtíð, tá tunnilin verður liðugur, fer økið at liggja mitt í einum knútapunkti, ið verður bindilið millum oyggjarnar við øktari ferðslu. Tá hugsað verður um rekreativ øki, so leita fólk vanliga burtur frá ferðslu og óljóði, tískil er í mun til býarskipanarlig viðurskifti einki til hindurs fyri, at Byrsumúli heldur fram á verandi øki. Umsitingin mælir tó til at fáa altjóða grundreglur og serkønan at meta um staðsetingina.

Byrsumúli hevur fleiri vitjandi, ið øll fáa ágóðan av hesum náttúruvakra øki, men samanborið við almenningin er talið á borgarum lítið í mun til um hetta lendið lá sum fríøki til almenningin.

Harafturat er ynski frá umsitingini, at Byrsumúli ikki ger seg inn á rættina, ið liggur tætt upp at ynskta matrikli. Rættin er áleið túsund ára gomul, men verður ikki brúkt longur orsakað av skjótivirkseminum og øðrum, hegning o.s.fr. Men rættin er tó eitt mentanar- og siðsøguligt minni, ið er vert at varðveita.

Ynski er um at atlit verða tikin til fjøru, og at farið verður væl um náttúruna sum heild, bæði í sambandi við dálking og ovurnýtslu, men náttúruvakurleikin er ikki tann sami aftaná 30 ára virksemi, økið treingir til at ruddast og hampast sum heild. Stranga eftirlitið, sum sigst vera, er ikki sjónligt.

Onnur staðseting er á Glyvursnesi, at gera skjótibreyt í grótbrotinum á Glyvursnesi ella í økinum sunnanfyri, har er vítt lendi burturfrá fjølbygdum øki. Men henda staðseting er partur av heildaruppskotinum í sambandi við gerð av golfvølli á Glyvursnesi.

Treytirnar, sambært umhvørvisgóðkenning í máli nr. 61010-200300445-36 (skjal 1), *Góðkenningartreytir frá 4. juli 2006, frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni*, eiga at dagførast, og eftirkannast, um treytirnar eru hildnar seinastu 22 árini. Virksemið er munandi broytt hesi árini, t.d. er nógv tons av stálhøglum skotin út á økið.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til, at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag, at øll loyvi verða dagførd, umhvørvisgóðkenning verður framd og altjóða ásetingar til kappingar verða hildnar og at beina málið aftur í mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Nevndin mælir til at Byrsumúli heldur fram á økinum, har teir eru í dag**.**

**Ískoyti**:
Síðani fundin í Byggi- og býarskipanarnevndini er komið uppskot frá Politinum og Arktiskt kommando um staðsetingar av skjótibreyt til teirra tørv. Sí hjálagt skriv.

Á løgukonto 5775 er játtan á 1.500 tkr, ið er ætlað til fyrireikingar v.m. í sambandi við ymiskar verkætlanir innan ítróttaanlegg, herundir skjóting. Kontan er ikki fult disponerað enn.

Mál um endurnýggjan av leigusáttmála við Byrsumúla um økið verður lagt fyri fíggjarnevndina í næstum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at geva umsitingini heimild til at gera uppskot til samstarvsavtalu við Byrsumúla og ráðgevarafelag um menning av skipanaruppskoti og koma aftur í nevnd við einum uppskoti.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Sambært umbøn frá nevndini, kemur umboð fyri nevndina í Byrsumúla á fundin at greiða frá um virksemi og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018:** Umboð fyri nevndina í Byrsumúla greiddi frá virkseminum og um útbyggingarætlanir felagsins.

**Ískoyti:**
Nýggjur 25 ára leigusáttmálið verður ætlandi undirskrivaður. Sí skjal 15/03761-32.

Avtalað er, at kommunan letur gera seyðasmogu, og annars letur tilfarð til hegn og pelar v.m. leystliga mettur kostnaður í alt kr. 87.000,00 Upphæddin verður at rindað av konto 6275 ( vetrarfriðing ) Sí útrokning skjal 15/03761-42

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at gera nýggjan 25 ára leigusáttmála við leigaran, sí skjal 15/03761-32, og at rinda gerð av seyðasmogu umframt tilfarð til hegn,pelar v.m. áleið kr. 87.000,00 av konto 6275 ( Vetrarfriðing )

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í økinum í Sandvíkum eru atlit at taka til umhvørvi, frítíðarvirksemi, seyðahald o.a. Felagið hevur í dag nógv stríð av upprudding sambært galdandi umhvørvisgóðkenning. Sum liður í at menna verkætlanina og tryggja neyðug atlit, verður mett hóskandi saman við felagnum at fáa landslagsarkitekt at gera uppskot um skipan av øki og lendi. Mett verður neyðugt at seta kr. 100.000 av til endamálið av játtan ætla til smærri ítróttarverkætlanir, sí mál 18/03320.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við ætlanini og vísa til mál 18/03320 viðvikjandi játtan.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og tryggja, at atlit verða tikin til umhvørvið, fjøruna, gomlu ættina og møguleikan fyri almennum uppihaldi.

**Ískoyti:**
Uppskot um skipan av øki og lendi er nú tókt, sí hjáløgdu fílu, umframt at limirnir fáa handaða mappu á fundinum.

Málið kemur fyri í nevnd 13. februar 2019.

**Mentamálanevndin og byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Limirnir fingu handað tilfar.

**Ískoyti:**
**Samandráttur av skipanaruppskotinum**
Skipanaruppskotið fevnir um uppskot til nýtt skjótianlegg í Sandvíkum hjá Veiðufelagnum Byrsumúli. Tað hevur verið týdningarmikið í sambandi við gerð av skipanaruppskotinum, at anleggið (skjótibreytin við tilhoyrandi viðurskiftum) hóskar inn í lendið og náttúruna kring økið. Harumframt hevur tað verið týdningarmikið, at nýggja anleggið er vakurt á at líta, er vælvirkandi og nútímans við fleiri virkismøguleikum og skjótibreytum.

Tað sum eyðmerkir uppskotið er, at serlig atlit eru tikið fyri uppruddingar arbeiðinum í sambandi við skjóting. Breytirnar vera fluttar longur frá fjøruni, lendið verður drenað og slættað so gjørligt verður at skipa ruddingina betur.

Ein vallgarður er teknaður at liggja á markinum millum anleggið og fjøruna, hann skal forða splintrum frá leirdúgvunum í at enda í fjøruni. Somuleiðis skal vallgarðurin tryggja, at tað framvegis verður atkomuligt hjá almenninginum til fjøruna. Men upplýsast skal, at tá anleggið er í brúk, tá verður ikki møguligt at nýta fjøruna til uppihald.

Anleggið skal vera fyri øll, tí eru atkomuviðurskiftini fyri rørslutarnað raðfest høgt. Hetta verður gjørt við at ein gøta kemur at leggja seg gjøgnum lendið og virka sum bindiligur millum felagshúsið við yvirdekkaðum hátúni, áskoðaraskýlið og skjótistøðini.

Í dag hevur Byrsumúli eitt felagshús, sum er gjørt av tveimum bingjum, men í skipanaruppskotinum er lagt upp til, at eitt felagshús verður gjørt við øllum hentleikum, so sum hølum/umstøðum til innivist, smærri móttøkur, veitslur, vesir o.a. hugsanin er, at sjálvt felagshúsið er uppbygt sera einkult, bygningsgrindin verður gjørd í pørtum, ið skjótt kunnu setast upp.

Yvirhøvur er tilfarsvalið sera einkult við timbri og flagtekju, sum hóskar væl til umhvørvið og náttúruna.

Vallgarðurin og ymisk skot á gøtuni vera prýdd við stórum gróti og vøkstri, ið somuleiðis hóskar væl til lendið og umhvørvið.

Aftrat hesum kemur ein eyrvegur at liggja aftanfyri anleggið, ið skal nýtast í sambandi við rakstur. Hesin skal flætta natúrliga inn í umhvørvið. Framvið eyrvegnum verður grót og runnar, hjálpirót og onnur planta, ið hóskar til umhvørvið.

**Góðkenning til altjóða kappingar:**
Fyrispurningar hava verið um viðurskiftini viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Veiðifelagið Byrsumúli hevur greitt frá hesum viðurskiftunum í skrivið til kommuna,
*sí skjal Svar vidvíkjandi krøvum til skjótibreytir.*

Fyrst er at viðmerkja, at eingin altjóða felagsskapur góðkennir nakra skjótibreyt yvirhøvur, hvørki her ella aðra staðni. Góðkenningarnar koma frá lokalum myndugleikum í mun til teirra lógarkrøv um trygd og umhvørvi v.m., meðan ítróttarligu reglurnar um kappingarnar eru ásettar av ISSF.

<u>Ítróttarlig krøv</u>: Ásetingar fyri mát/stødd á breyt, longd/ferð og vinklar, hvussu dúgvurnar skulu flúgva o.s.fr. eru at finna í kappingarreglunum frá ISSF. Sí skjal *ISSF reglur um skjótibreytir.* Skipanaruppskotið er í tráð við hesar ásetingarnar. Harumframt vendir økið rætt í mun til ljósviðurskiftini, sum ISSF mælir til, og veðurlagið á staðnum er tað besta, sum felagið kann ynskja sær.

Tað er kappingarleiðslan til einstøku kappingina, sum góðkennir ''breytina'', og tað snýr seg um, hvørt kastimaskinurnar eru innstillaðar rætt í mun til ítróttargreinina, til dømis OL-trap og OL-skeet.

Tá tað kemur til umstøðurnar rundan um breytina; felagshús, vesir o.a. er ikki talan um ítróttarlig krøv, tó sum liður í verkætlanin skulu hesi viðurskiftir; felagshús, vesir o.a. vera á nøktandi støði eftir BK17. Harumframt er tað ynski hjá kommununi, at nøktandi athølir/umstøður eru funktionel til virksemið.

<u>Trygdarkrøv</u>: Tað er løgreglan, sum góðkennir trygdina, her er talan um trygdarfrástøðu og hvønn veg skotið verður. Verandi breyt er góðkend, og skal nýggja breytin somuleiðis góðkennast, tá hendan er liðug.

<u>Umhvørviskrøv</u>: Umhvørvisstovan umsitur Umhvørvisgóðkenningina fyri virksemið á breytini. Somuleiðis er verandi breyt góðkend. Skipanaruppskotið leggur upp til, at virksemið tekur enn størri hædd fyri umhvørvinum.

Nevnast skal at Veiðifelagið Byrsumúli hevur sett seg í samband við Danmarks Jægerforbund. Og fingið tey at meta um skipanaruppskortið viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Danmarks Jægerforbund er av tí fatan, at nýggja skjótibreytin lkur allar treytir, ið eru galdandi til kappingar í OL-trap og OL-skeet. Sí skjal *190204 DJ skrivelse/MLMAL.*

Umsitingin hevur sett seg í samband við Skjótisamband Føroya við fyrispurning um viðurskiftini viðvíkjandi góðkenning til altjóða kappingar. Skjótisamband Føroya hevur kanna skipanaruppskoti og greitt frá í skrivið til kommuna, sí skjal *Svar til Tórshavnar kommunu.*

Sagt verður at uppskotið um nýggja breyt lýkur allar treytir til heimligar kappingar eins væl og hon lýkur treytirnar til einar komandi oyggjaleikir. Breytin kemur sjalvsagt ongantíð at rúma heimmeistarakappingar ella Olympisku leikunum, men við einari OL-trap breyt og tveimum OL-skeet breytum, kunnu flest allar aljtóða og millumtjóðakappingar um okkara leiðir haldast her.

Verður hugt at møguligum framtíðarkrøvum til kappingar, so bendir einki á at møgulig broyting í reglunum fyri kappingargreinarnar skuldi viðført, at broytingar skulu gerast á sjálva breytina, so hon ikki kann nýtast

longur. Áður, tá ið broytingar hava verið so hevur tað snúð seg um ferð og vinklar á dúgvunum viðvikjandi kastimaskinunum og ikki sjálvari breytini.

Í sambandi við oyggjaleikir so við breytin kunna rúma, OL.trap, Automatic Ball Trap og OL-skeet, eins væl og ovara skeet breytin í uppskotinum kann brúkast til Compak-Sporting-breyt. Til tað síðst krevst tó, at fleiri kastimaskinur verða settar upp, men hetta rúmar breytin væl.

Sjótisamband Føroya metir tí, at uppskotið uppá nýggja breyt vil tryggja skjótiítróttin í Føroyum í mong ár.

**Átøk í verkætlanini:**
Skipanaruppskotið leggur upp til, at anleggið kann skipast í pørtum. Ynskiligt hjá felagnum er, at skjótibreytirnar verða gjørdar sum tað fyrsta, soleiðis at uppruddingin gerst meiri lagalig. Síðani skulu vollarnir gerast, umframt gøtur og felagshús.

**Víðari fyrireikingar**
Í sambandi við viðgerð í mentamálanevndini kemur umsitingin at gera ítøkiligt tilmæli um, hvussu farast kann fram í mun til møguliga víðari fyrireikingar, herundir projektering, samstarvið við felagið, kostnaðarmetingar, fígging v.m.

**Skjøl:**
*- Journal nr. 15-03761-55 BYRSUMÚLI SKIPANARUPPSKOT DES.2018*
*- Journal nr. 15-03761-58 Svar vidvíkjandi krøvum til skjótibreytir*
*- Journal nr. 15-03761-58 ISSF reglur um skjótibreytir*
*- Journal nr. 15-03761-60 190204 DJ skrivelse/MLMAL*
*- Journal nr. 15/03761-61 Svar til Tórshavnar kommunu*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla byggi- og býarskipanarnevndini til, at skipanaruppskotið verður samtykt sum ætlan fyri økið/virksemið, at øll loyvi og myndugleikakrøv verða dagførd, nú skjótibreytin verður endurnýggjað, og at beina málið í mentamálanevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina, teknisku nevnd, fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. februar 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Við støði í skipanaruppskotinum er nú klárt at fyrireika verkætlanina víðari saman við Veiðifelagnum Byrsumúla. Fyrsta stig er at fáa í lag avtalu við ráðgevarafelag um projektering av lendisarbeiðinum.

Til ber at projektera verkætlanina í einum ella í stigum, har sjálvt lendisarbeiðið eisini tekur atlit til, at felagið kann halda fram við venjingum í arbeiðstíðarskeiðnum. Á fundinum verður greitt frá viðurskiftum kring kostnað vm. í sambandi við projektering av slíkum anleggi/lendi og bygningum.

Mett verður hóskandi at seta av 300 tkr. í fyrstu atløgu til víðari tilgongdina. Sí tilmæli í máli 19/00144 Játtan í 2019 til smærri ítróttaanlegg.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at samtykkja, at farið verður í tilgongd at bjóða út ráðgeving um projektering av skjótibreytini at leggja aftur fyri nevndina.

**Tekniska nevnd 12. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina 13. februar 2019.

**Mentamálanevndin 13. mars 2019:** Samtykt at gera samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla um víðarimenning av verkætlanini og at bjóða út ráðgeving um projektering av skjótibreytini, at leggja aftur fyri nevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 01. apríl 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at samstarvsavtalan eisini umfatar regluliga rudding.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur verið í innleiðandi samráðingum við Veiðifelagið Byrsumúla um samstarvsaavtalu.

Umsitingin hevur eisini mett um, hvør leistur er tann frægasti í mun til at fáa projektera og útint verkætlanina. Mett verður at mest átroðkandi er at fáa drenað skjótiøkið og fáa gjørt vøllgarðarnar. Í fyrsta lagi tí at tað verður tað sum gerð mest mun at vera framt fyrst og í øðrum lagi at avmarkað kostnaðin til hetta fyrsta verkætlanarstigið.

Viðv. framferðarhátti kann veljast millum:

a). Projektera verkætlanina og síðani fara í útboð
Fyrimunurin er at ymsar møguligar óvissur vera færri og tað fæst eitt gott tilfar til grund fyri útboðnum av lendisarbeiðinum.

b). Bjóða arbeiðið út sum eina heildararbeiðstøku
Høvuðsfyrimunurin er at arbeiðið helst verður lættari at laga til og innan fyri ásettan kostnaðarrammu. Tó er neyðugt við nakað av nøgdarmetinginum áðrenn farið verður undir útboð so tað er nøkulunda greitt hvørjar nøgdir talan er um so skulu flytast, herundir gera nakrar kanningar viðv. dýpinum av tilfari í økinum. Hetta er mett til nakrar 10 tkr. og kann dekkast av kontu 5365 Stuðul til løgur.

Kostnaðarmeting
Í verandi støðu er ikki nøkur dagført kostnaðarmeting. Talan er um verkætlan, ið helst kostar fleiri mio.kr. Felagið bjóðar seg fram til at gera arbeiðir við bygningar, pallar o.a. meðan lendisarbeiðið sum heild krevur arbeiðstakara við røttu amboðunum og royndunum.

Fígging
Byrsumúli hevur ikki nakra fíggjarogn av týdningi og sum munar í hesum føri. Kommunan hevur ikki tøka fígging til verkætlanina í ár og tí má støða takast til um fígging skal setast av í løguætlanini fyri 2020 ella 2021.

Felagið bjóðar seg hinvegin at gera sjálvboðið arbeiðið innan onnur viðurskifti enn grót og moldarbeiðið og kann tað so innganga sum egininnsatsur.

Skotið verður upp at felagið og TK í næstum fara undir fyrireikingar til at søkja uttanhýsis stuðul til verkætlanina ella partar av henni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til:

a). Um verkætlanin í fyrsta umfarið verður avmarkað til at drena skjótiøkið og gera vøllgarðar.

b). Um antin at projektera verkætlanina og síðani fara í útboð ella at bjóða arbeiðið út sum heildararbeiðstøku.

c). Við støði í valinum av pkt. a og b. at fara undir endaligar samráðingar um eina samstarvsavtalu at leggja fyri nevndina aftur.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt ikki at taka undir við tilmælinum. Nevndin staðfestir, at játtan ikki er tøk í ár og at málið verður tikið upp í sambandi við fíggjarætlanar-arbeiðið og langtíðarløguætlanina.

**Ískoyti:**
Við atliti til at fáa betri grundarlag fyri møguligari verkætlan og útbjóðing verður mett hóskandi at fáa gjørt ymiskar fyrireikingar, herundir:

Við støði í skipanaruppskotinum at:
1. Søkja um loyvi hjá friðingarmyndugleikunum til verkætlanina
2. Søkja um nýggja umhvørvisgóðkenning

Umframt:
3. Fáa gjørt lendis- og jørðkanningar, uppmátingar og avseting av verkætlanarøkinum fyri m.a. at fáa metingar um nøgdir av tilfari, ið skal flytast og útvegast og herundir kostnaðarmeting.
4. Fáa gjørt samstarvsavtalu við Byrsumúla um verkætlanina, herundir egininnsatsin hjá Byrsumúla og ætlan um at søkja um uttanhýsis fígging.

Fyribils verður mett, at pkt. 3 kostar 100 tkr. Mett verður at fígging til endamálið kann útvegast av upphæddini, ið var játtað til konto 5717 Ítróttaanlegg til fyribils bingjuloysn við Hoyvíksvøll (mál 18/00009), ein verkætlanin, ið ikki er útlit fyri at útinna í ár. Ætlanin er at fáa ráðgeva til kanningarnar.

Tíðarætlan:
Mett verður, at tilgongdin viðv. pkt. 1-4 tekur nakrar mánaðir og at eitt útboð helst kann vera í 2020, treytað av neyðugum loyvum og fígging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at fáa til vega uppskot til ráðgevaraavtalu um fyrireikingar til at bjóða út arbeiðstøku uppá drening, planering og gerð av vøllgarðum til nýggja skjótibreyt, herundir neyðug loyvi.

**Mentamálanevndin 22. oktober 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. november 2019:** Samtykt taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. november 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Eftir viðgerðina seinast er fíggjarætlanin fyri 2020 samtykt, umframt at tað í langtíðaríløguætlanini er lagt upp til fígging til skjótibreyt hjá Byrsumúla í 2021 og 2022.

Á løgukontu 5775 eru fyri fíggjarárið 2020 játtaðar 3.000 tkr. til skjótibreyt, t.e. játtanin skal brúkast til at byggja skjótibreyt, herímillum drening og vøllgarðar at verja fjøruna, umframt ætlaðar 4.000 tkr. til 2021 og 1.000 tkr. til 2022.

Við hesum ber sannlíkt til at fara undir at fyrireika og byggja nýggja skjótibreyt í Sandvíkum, ið nýtast kann til venjing, frálæru og altjóða kappingar.

Ætlanin er at gera avtalu við felagið, ið gjørdi skitsuprojektið at standa fyri liðugt projektering og útboðnum av verkætlanini.

Tilgongdin við at fáa neyðug loyvi til vega og tekur væntandi nakrar mánaðir.

Málið er at arbeiðið kann vera klárt at bjóða út í vár, tá neyðug loyvi væntandi eru fingin til vega, og fara undir útinning í summar. Byggiarbeiðið í lendinum væntast at ganga inn í 2021.

Forkanningar viðv. lendinum byrja í næstum og er dialogur í gongd við felagið um samstarvsavtalu. Ætlandi verða úrslitini av forkanningunum, uppskot til samstarvsavtalu og ráðgevaraavtala klár til fundin í nevndini 11. mars 2020.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at fara undir samráðingar um ráðgevaraavtalu.
b). at flyta 3.000 tkr av løgukarminum konta 5775 á nýggja projektkontu.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 05. februar 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. februar 2020:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Viðv. samstarvsavtalu
Umsitingin hevur verið í samráðingum við Veiðifelagið Byrsumúla um eina samstarvsavtalu og eru komin ásamt um eina avtalu. Sí hjálagt uppskot.

Viðv. umsóknum um loyvir
Tilgongd at fáa neyðug loyvi er í gongd.

Roknað verður við at svar fyriliggja frá øllum myndugleikum innan mai 2020.

Viðv. forkanningum av lendinum
Tær eru ikki byrjaðar enn, men verður tað væntandi í apríl-mai 2020.

Viðv. ráðgevaraavtalu
Samráðingar eru ávegis og væntast eitt úrslit at fyriliggja í mai 2020.

Alt eftir hvussu tað gongur við ymsu loyvunum og forkanningunum er málið at kunnu bjóða arbeiðstøkuna út í juni 2020. Væntandi verður talan um innbodna lisiatión.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at innganga hjáløgdu samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla. Málið verður beint í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Loyvisviðurskifti
Tilgongdin er væl ávegis og verður vónandi komið á mál við tí í summar.

Forkanningar
Sum liður í at fáa neyvari nøgdarmetingar viðv. økinum hevur Sp/f Munin gjørt sonevndar GEO-kanningar. Frágreiðingin verður væntandi tøk í viku 24.

Ráðgevaraavtala
Við støði í forkanningunum vera í juni samráðingar við Osbjørn Jacobsen/Henning Larsen, Føroya deild um ráðgevaraavtalu.

Útbjóðing
Ætlandi verður arbeiðið boðið út í innbodnari lisitatión so skjótt viðurskiftini omanfyri eru klár. Ætlandi kann arbeiðið byrja í heyst.

Teknisk útgerð
Felagið hevur søkt um at kunna fáa stuðul til at endurnýggja teknisku leirdúgvuskjótiútgerðina. Felagið hevur heintað inn tilboð, ið ljóðar uppá 175 tkr., felagið ynskir ein stuðul á 175 tkr.. Felagið kemur at gera ein egininnsats við niðurtøku av verandi útgerð og uppsetan av teirri nýggju mett til 30 tímar.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta felagnum 175 tkr. í stuðli til kastiútgerð at rinda av løgukontu L57033.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. juni 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. juni 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Verkætlanin hevur nú fingið umhvørvisgóðkenning frá Umhvørvisstovuni, umframt at Yvirfriðingarnevndin júst hevur staðfest avgerðina hjá friðingarnevndini fyri Streymoyar sýslu.

Í summar eru gjørdar lendiskanningar, umframt at gjørdar eru innleiðandi kostnaðarmetingar. Sí hjáløgd skjøl.

Eftir er nú at fáa gjørt ráðgevaraavtalu um projektering og eftirlit við verkætlanini, umframt manglar eisini endalig avkláring við Landsverk um viðurskifti í mun til landsvegalógina og at fáa endaligt byggiloyvi frá byggivaldinum. Málið er at verkætlanin kann fara í útboð í okt. 2020.

Í vár samtykti býráðið at gera samstarvsavtalu við Veiðifelagið Byrsumúla og verður henda undirskrivað ein av komandi døgunum.

Á fundinum greiðir umsitingin nærri frá gongdini higartil, herundir lendiskanningini v.m.

Veiðifelagið Byrsumúli er farin undir útvegan av kastiútgerðini, ið felagið fekk stuðul til fyrr í ár.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða málið.

**Mentamálanevndin 09. september 2020:** Umrøtt. Nevndin samtykti at seta ein politiskan samstarvsbólk, har andstøða og samgonga velja hvør sítt umboð, at fylgja við útinnanini av arbeiðnum.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 26. oktober 2020:** Útsett.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samráðingum við ráðgevarafelagið Henning Larsen (deildina í Føroyum) um avtalu um tekniska ráðgeving viðvíkjandi lendisarbeiðinum og ávísum innstallatiónum til skjótibreyt til Veiðifelagið Byrsumúla í Sandvíkum. HMP Consult er undirráðgevi. Semja er við feløgini um at avrokna ráðgevaraarbeiðið eftir brúktum tímum og gera tað upp regluliga. Higartil eru brúktir 160 tímar.

Tilgongdin og vavið av verkætlanini, er viðgjørt og avstemmað við Veiðifelagið Byrsumúla.

Um farið verður undir projektering í november 2020 kann roknast við at útboð av verkætlanini kann vera um 2-3 mánaðir og arbeiðið fara í gongd í fyrsta ársfjórðingi 2021.

**Kostnaðarmeting**
Á fundinum kemur umsitingin at greiða frá metingum viðv. heildarkostnaðinum fyri verkætlanina, bæði ráðgevaraútreiðslur, hondverkaraútreiðslur (HVÚ) og aðrar útreiðslur í verkætlanini. Hugsanin er at bjóða anleggsarbeiðið út sum undirhondsboð til tvey feløg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:

a). at heimila umsitingini at gera ráðgevaraavtalu við felagið Henning Larsen við støði í avtalaðum tímum og tímataksti fíggjað av løgukontu L57033 Byrsumúli, skjótibreyt.

b). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út og at samráðast við lægsta tilboðsgeva um sáttmála at leggja fyri nevnd.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Viðv. at velja fylgibólkaumboð
Mentamálanevndin samtykti 9. september 2020 at "at seta ein politiskan samstarvsbólk, har andstøða og samgonga velja hvør sítt umboð, at fylgja við útinnanini av arbeiðnum. Hetta er ikki gjørt enn og eigur støða at vera tikin av nýggjum um samtyktin skal útinnast ella ikki. Um limir skulu veljast verður tað gjørt á býráðsfundi.

Viðv. góðkenning av skipanaruppskoti
Arbeitt verður í løtuni við at fáa endaliga skipanaruppskotið liðugt og kemur málið væntandi til viðgerðar í nevnd við fyrst komandi høvi.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til um samtyktin frá 9. september 2020 skal útinnast.

**Mentamálanevndin 10. februar 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 14. apríl 2021**: Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
26. mars 2021 var arbeiðið at gera arbeiðið at gera nýtt skjótianlegg í Sandvíkum boðið út sum undirhondsboð til 2 feløg. P/F Articon og P/F J&K Petersen.

Bert Articon lat boð inn.

Teirra boð var: 9.649.845 kr. (u/MVG).

Tilboðini eru gjøgnumgingin av ráðgevunum og hava teir latið tilmæli.

Síðani hevur umsitingin gjøgnumgingið tilfarið saman við ráðgevunum og Byrsumúla og síðani verið í samráðingum við Articon.

Við ymiskum tillagingum í verkætlanini, herundir viðv. brunnum og kloakk og arbeiðstilgongdini og uppbygnaðinum av lendinum, vil Articon innganga ein heildararbeiðstøkusáttmála við TK á 7.700 tkr. Samstundis sum allar neyðugar funkiónir og eginleikar vera mettar nøktandi. Sáttmálin fevnir tó ikki sum útgangsstøði um útvegan av dekkgróti til vøllgarðin, ið TK skal útvega, og kostnaður av hesum er ógreiður. Hartil kemur at neyðugt verður at útvega útgerð á umleið 600 tkr. afturat, ið ikki er íroknað verkætlanini í verandi støðu.

**Fíggjarviðurskifti og heildarkostnaður**
Umframt arbeiðstøkuna eru aðrar útreiðslur til útgerð, mvg, ókent, ráðgeving v.m. sí hjálagda skjal.

Hetta inniber at samlaði kostnaðurin fyri verkætlanina verður umleið 10.390 tkr.

Samlaða fíggingin er 8.000 tkr. Tørvur er sostatt á umleið 2.390 tkr. í eyka fígging.

Innan íløgujáttanirnar konta 5775 Ítróttaranlegg ber til at fíggja hetta av øðrum verkætlanum. Uppskot er at játta 1.000 tkr. av Hoyvíksvølli (L57034), Tórsbreyt 500 tkr. (L57032), Fimleikahøll Kaldbak 400 tkr. (L57018), og Golfvøllur 500 tkr. (57016), hetta gevur kr. 2.400 tkr.

Øll neyðug loyvi fyriliggja nú til verkætlanina.

Arbeiðið í Sandvíkum kann byrja 17. mai 2021 og tekur umleið 5 mánaðir.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at samtykkja at innganga heildararbeiðstøkusáttmála á tkr. 7.700 við P/F Articon
b). at heildarkostnaðarkarmurin fyri verkætlanina verður 10.390 tkr., útgerð undantikið, og at restfíggingin 2.390 tkr. verður fingin til vega, áðrenn arbeiðið fer í gongd
c). at flyta 5.000 tkr. ætlaðar skjótibreyt av løgukarminum 5775 á projektkontu L57033 Byrsumúli, skjótibreyt.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælunum a), b) og c), og at restfíggingin 2.400 tkr. verður játtað soleiðis av kontu 5775 Ítróttaranlegg: 1.000 tkr. av projektkontu L57034 Verkløg við Hoyvíksvøll, 500 tkr. av projektkontu L57032 Tórsbreyt, 400 tkr. av projektkontu L57018 Fimleikahøll í Kaldbak, og 500 tkr. av projektkontu L57016 Golfvøllur - at flyta á projektkontu L57033 Byrsumúli, skjótibreyt.

Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 28. apríl 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfnn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Annika Olsen, tekur undir við mentamálanevndini við teirri broyting, at restfíggingin 2.400 tkr. verður játtað av konto 5775, ítróttaranlegg, L57015, langhylur.

Ein minniluti, Elsa Berg, tekur ikki undir við mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Kristian M. Skála, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddi: Elsa Berg.

**Ískoyti**:
Í sambandi við viðgerðina av málinum í vár var upplýst at tørvur var á ymiskari skjótitekniskari útgerð v.m. og at hesin tørvurin ikki var dekkaður av tøku játtanini.

Umsitingin hevur í heyst verið í samskifti við Byrsumúla og komin til at tørvur er á ymsari útgerð fyri umleið 600 tkr. Talan er um útgerð til trapp-breytina, umframt grassláimaskinum og einum ATV til uppsamling av proppum, umframt vogn til flutning og bingjur til burturkast. Upphæddin verður latin sum stuðul til felagið. Sbrt. galdandi samstarvsavtalu er felagið rakstrarharri á anlegginum og kemur at taka sær av m.a. rakstrinum av teknisku útgerðini v.m. Felagið hevur fingið trapp-kastimaskinuna á 270 tkr. til landið.

Játtanin higartil (2021) til verkætlanina rúmar ikki hesi upphæddini. Í sambandi við møguligan stuðul skal felagið skal lata skjalprógv fyri útreiðslunum.

Á løgukarminum 5775 fyri 2022 eru samtykt at seta 5.000 tkr. av til verkætlanina. Mett verður at hesin tørvurin á útgerð er alneyðugur fyri anleggið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at flyta 600 tkr.av løgukontu 5775, skjótibreyt (LK57033) (fíggjarárið 2022) til projektkontu L57033 Byrsumúli, skjótibreyt og játta Veiðifelagnum Byrsumúla upphæddina sum stuðul til útvegan av útgerð. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 01. desember 2021:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 29/22 Fótbóltsvøllurin inni í Vika: Endurnýggjan av graslíkisvøllinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 15.09.2021 | 208/21 | 21/03312-3 |
| 2 Mentamálanevndin | 01.12.2021 | 284/21 | 21/03312-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 318/21 | 21/03312-3 |
| 4 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 315/21 | 21/03312-3 |
| 5 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 38/22 | 21/03312-3 |
| 6 Mentamálanevndin | 15.02.2022 | 52/22 | 21/03312-3 |
| 7 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 60/22 | 21/03312-3 |
| 8 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 29/22 | 21/03312-3 |

**Upprunin til málið**
Annfinn Brekkstein, formaður í mentamálanevndini.

**Lýsing av málinum**
**Viðv. tørvi á at skifta graslíki og stoytdoyvingarlag**
Graslíki á vøllinum úti í Vika á Argjum er frá 2009 og trongir til útskifting og sannlíkt eisini stoytdoyvingarlagið undir graslíkinum.

Verandi vøllur uppfyllir ikki galdandi vallarreglugerð hjá FSF viðv. vallarstødd v.m. Minsta stødd er 64x100 m. og tað klárar vøllurin akkurát, men frástøðurnar til girðingina eru ikki nøktandi á báðum langsíðunum. Um tað skal betrast er neyðugt at flyta vøllin 1-1,5 metrar longur móti Sandá. Hetta hevur ávísan kostna við sær.

**Viðv. krøvum frá FSF til ljósskipanir við vallirnar**
Verandi ljósskipan uppfyllir ikki nútíðar krøv. Styrkin pt. er nøkur tíggju lux og uppfyllir ikki vallarreglugerðina. Kannað verður um verandi fundament og mastrar kunnu brúkast heilt ella lutvíst. Um tað ber til vil tað minka um kostnaðin.

Vallarreglugerðin hjá FSF ásetur krav um 250 lux til dystir í fremstu og næstfremstu deild, tó um gjørd verður skipan við 350 lux fæst 400 tkr. (við fyrivarni!) í stuðli frá FSF/Hattrick-grunninum. Í tann mun feløgini ikki uppfylla treytirnar skulu tey vísa á ein tiltaksvøll tá tørvur er á tí. Her vísir kommunan á Tórsvøll.

**Umstøður kring station**
Tørvur á at gera ymiskar ábøtur, herundir betri p-viðurskifti, snøgga kring stadion v.m. Um vøllurin verður fluttur nærri Sandá verður eisini neyðugt við at flyta og gera høgu girðingina móti Sandá av nýggjum.

**Krøv sbrt. reglugerðini um bygging og rakstur av ítróttarvøllum í Tórshavnar kommunu, har leys fylla úr plasttilfari verður brúkt**
Ásetingarnar í hesi reglugerð vilja innibera at kommunan í sambandi við hesa verkætlanina má vera klár at gera tillagingar v.m. viðv. girðingum kring vøllin, asfaltøkið v.m. Henda reglugerð er gjørd sbrt. KIMO RESOLUTION 18/01

Microplastic Pollution from Artificial Grass Sports Fields.

**Kostnaðarmeting**
Umsitingin kemur á fundinum at greiða nærri frá fyribils kostnaðarmetingum.

**Tíðarætlan**
Um undirtøka er fyri málinum verður farið víðari við fyrireikunum og er ætlandi at fara undir útboð fyrst í 2022.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini at halda fram við fyrireikingunum at endurnýggja stadion á Argjum við atliti at koma aftur í nevndina í heyst við tilmæli um fígging v.m.

**Mentamálanevndin 15. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin er í holt við at ráðleggja verkløgini á og kring vøllin Inni í Vika. Endaliga tíðspunktið fyri at gera arbeiðini verður fastlagt í samráð við Argja bóltfelag. Kemur sannlíkt at verða gjørt antin í mai-juni ella í juni-juli. Hetta verður endaligt greitt í januar 2022.

Gjørd er ein ávegis kostnaðarmeting fyri skifting av graslíki, gerð av nýggjum stoytdoyvingarlagi, umframt flyting av vøllinum, ymiskum umstøðum kring vøllin (flyta hegn, girðingar v.m.) og dagførda ljósskipan. Í samtyktu fíggjarætlanini fyri 2022 eru játtaðar 10.000 tkr. á løgukontu 5775 Fótbóltsvallir. Í máli 21/01067 Ljósskipan til Ovara vøll í Gundadali verða 2.100 tkr. játtaðar til ljósskipan og tískil eru 7.900 tkr. eftir til verkløgini á Argjum.

Fyribils metingin er, at tað verður helst ov tepurt, men vil víðari fyrireikingartilgongdin geva neyvari ábending um tað. Greitt verður frá fyribils metingunum á fundinum.

Ætlanin er at dagførda ljósskipanin skal hava umleið 350 lux, t.v.s. sama sum ætlaða verkætlanin við Ovara vøll í Gundadali.

Ætlanin er at fara í eina samráðingartilgongd viðv. graslíkisveiting v.m. við støði í útboðnum í Gundadali. Hartil kemur arbeiðið at fáa bøtt um undirlendið og flutt vøllin, umframt girðingar v.m. Ætlanin er at heinta inn undirhondsboð uppá tey arbeiðini.

Ætlanin er, at krøvini til graslíkið skal lúka FIFA Quality Pro krøv, eins og hinir vøllirnir í kommununi. Tað inniber, at serlig atlit skulu takast í sambandi javnleikan á drensasfaltinum v.m.

Ætlandi verður útvegan av ljósskipan gjørd eftir sama leisti sum á Ovara vølli í Gundadali. T.v.s. heinta inn tilboð uppá projektørar frá minst teimum veitarum. El-arbeiðið verður somuleiðis gjørt sum undirhondsboð við tveimum veitarum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja:
a). at flyta 7.900 tkr. av játtanini í fíggjarætlanini 2022 kontu 5775 Fótbóltsvøllir á projektkontu L57031 Fótbóltsvøllirnir í Tórshavnar kommunu - til verkætlanina at endurnýggja graslíki, dagføra ljósskipan v.m. á vøllinum Inni í Vika
b). at heimila umsitingini at samráðast um graslíkisveitara um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð (FIFA Quality Pro)
c). at heimila umsitingini at heinta inn tilboð uppá ábøtur á drenasfaltlagið, flyting av hegni og girðingum v.m. og at gera sáttmálar í hesum sambandi.
d). at heimila umsitingini at heinta inn tilboð til nýggja ljósskipan til vøllin Inni í Vika at leggja fyri nevnd og býráð.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 01. desember 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson og Kristianna Winther Poulsen, samtykti at taka undir við tilmælunum b, c og d.

Ein minniluti, Annika Olsen og Ruth Vang, taka undir við tilmælinum, men at graslíkisveitingin skal bjóðast út.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, tekur undir við minnilutanum í mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samskifti við veitaran um at fáa somu eindarprísir, eins og til verkløgini í Gundadali á sumri 2021. Hetta er ikki eydnast, frávikið er ov stórt. Greitt verður nærri frá tí á fundinum.

Tískil er neyðugt at finna aðra loysn. Mett verður tí hóskandi at fáa heinta inn í minsta lagi tvey tilboð uppá veiting.

Í mun til verandi uppbygnað av vøllinum við staðstoyptum stoytdoyvingarlagi, hevur verið umrøtt at skift yvir til stoytdoyvingarlag við gummimáttum.
Tað vildi givið ávísa sparing, men kann ganga útyvir javnleikan, men er so ein loysn, ið er vanlig kring um í Føroyum, men oftast á vøllum, ið ikki skulu uppfylla Quality pro standardin hjá FIFA.

Annað er viðv. um roynast skal loysn við kork ífyllu í staðin fyri gummigranulat. Loysn við korki er í Norðagøtu, men eru bert sjey mánaðir síðani vøllurin var lagdur, og metir umsitingin, sum útgangsstøði, at best hevði verið at sæð yvir eitt ár, hvussu tað roynist har.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at bjóða veitingina av graslíki út til minst tveir veitarar.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Útsett.

**Ískoyti 14. februar 2022:**
TK hevur fingið sendandi tilboð frá P/F Føroya Møblasølu uppá graslíkisveiting av merkinum DOMO (Niðurlendskt merki).

Formaðurin í mentamálanevndini, Annfinn Brekkstein, ynskir at fáa viðgjørt tilboðið frá veitaranum um graslíkisvøll við kork-infill til vøllin Inni í Vika. Talan er um sama slag av vølli sum í Norðragøtu.

Vøllurin í Sarpugerði var tikin í nýtslu 20. august 2021, so Víkingur hevur spælt alla seinnu hálvu av kappingarárinum 2021 á vøllinum, og er sostatt góðkendur av FSF. Royndirnar higartil hava verið góðar frættist úr Norðragøtu.

Talan er um eitt tilboð, har vit skifta graslíkið á verandi stødd á vøllinum, tvs. 7.200 m$^2$. Við í tilboðnum er ein stoytdoyvingarmátta, ið veitarin leggur á. Veitarin væntar, at TK tekur gamla graslíkið og stoytdoyvingarundirlag av og burturbeinir tað, so klárt er at leggja nýtt á.

**Treytir**
Samanborið við tær treytir, ið TK setti til veitaran, ið seldi graslíkisvallirnar í Gundadali í 2021, so stendur onki um FIFA sertifisering í sjálvum tilboðnum. Tó stendur í viðlagda sølutilfari, at graslíkið lýkur laboratoriu-test til FIFA-quality PRO.

Umframt hesa laboratoriu-test, so kravdi TK eisini eina Field-test til Ovara vøll og Tórsvøll. Hetta er ein test, ið verður gjørd aftaná at vøllurin verður lagdur á. Hendan testin er fyritreyt fyri møguligari FIFA Quality Pro góðkenning. Spurningurin er so um hvussu neyðugt tað er við eini slíkari góðkenning, tí sbrt. vallarreglugerðini fyri 2022 er nokk við FIFA Quality góðkenning.

**Sporføri**
Umsitingin metir, at verður tikið av tilboðnum, skal skjalprógvast, hvar korkið kemur frá, hvussu tað er viðgjørt, so TK kann tryggja sær, at ongin óheppin viðurskfti koma undan kavi, eftir vøllurin er lagdur á. Hetta kundi t.d. verið, um okkurt kemiskt tilfar er í korkinum.

**Stoytdoyvingarundurlag**
Vøllurin Inni í Vika á Argjum hevur staðstoypt stoytdoyvingarundirlag, ið er umleið 11 ára gamalt. Umsitingin veit ikki í løtuni um, hvussu standurin er á hesum undirlagnum, men er ætlanin framhaldandi at víðka um vøllin so er rættast at taka tað av, so neyðugur javnleiki kann náast. Hetta kann kannast av útlendskum fyritøkum, ið testa graslíkisvallir.

Kann verandi stoytdoyvingarlag framhaldandi brúkast í nøkur ár, so eru 2 viðurskifti, ið skulu kannast. Er tilboðsveitarin sinnaður at brúka verandi stoytdoyvingarundirlag, og um vøllurin skal breiðkast, kunnu vit so breiðka verandi staðstoypta stoytdoyvingarundirlagið?

Vansin við at taka av innsenda tilboðnum er, at tað ikki er sett upp ímóti øðrum tilboði enn tí frá Metatron og fevnir í tí førinum ikki um kork-ífyllu. Ávís veitingartíð er í sambandi við graslíki v.m., tí er eisini neyðugt, at ein niðurstøða verður tikin skjótt um náast skal at gera arbeiðið frá í mai 2022.

Víst verður til hjálagda fylgiskjal við samanberingum millum tilboðini hjá DOMO og Metatron.

Umframt kostnaðir til graslíkisveitara, skal hædd takast fyri ymsum øðrum útreiðslum í sambandi við víðkan av vøllinum, flyting av girðing og hegni, umframt burturbeining av graslíkisvøllinum v.m. Greitt verður frá hesum kostnaðum á fundinum, sí skjøl.

Útvegan av ljósskipan verður sett í bíðistøðu inntil nærri er avklárað viðv. graslíki v.m.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka støðu til innkomnu tilboðini, ella um fleiri tilboð skulu fáast til vega.

Um samtykt verður at taka av ávísum tilboði, so at flyta 6.900 tkr. av játtanini í fíggjarætlanini 2022 kontu 5775 Fótbóltsvøllir (LK57039) á projektkontu L57039 Fótbóltsvallir, Argir/Hoyvík - til verkætlanina at endurnýggja graslíki v.m. á vøllinum Inni í Vika. Um so samtykt, verður málið beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. februar 2022:** Samtykt at taka av tilboðnum frá Føroya Møblasølu og flyta 6.900 tkr. av játtanini í fíggjarætlanini 2022 kontu 5775 Fótbóltsvøllir (LK57039) á projektkontu L57039 Fótbóltsvallir, Argir/Hoyvík. Málið beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 30/22 Nýggj dagstovnapláss 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 23/22 | 22/00511-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 34/22 | 22/00511-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 30/22 | 22/00511-1 |

**Upprunin til málið**
Víðkan av plásskapasitetinum í sambandi við, at Miðstovnurin verður liðugt umbygdur. Harumframt at stovna nýggj pláss í Lonunum í Hoydølum.

**Lýsing av málinum**
Nýggj pláss í Loninum í Hoydølum og í Miðstovninum

**Miðstovnurin í Kongagøtu**
Eftir ætlan verður Miðstovnurin í Kongagøtu klárur at taka í nýtslu tann 1. apríl. Sum er gongur arbeiðið eftir ætlan, og kann virksemið í Kongagøtu byrja tá. Í fyrstu atløgu skulu øll barnagarðsbørnini, sum eru í Finsen, flyta yvir í Kongagøtu, og skulu børn og starvsfólk finna seg til rættis har.

Ætlanin er at stovna 2 nýggjar vøggustovur í skipanini nú, t.e. 24 vøggustovupláss.

**Lonirnar í Hoydølum**
Fyri at kunnu taka nógv fleiri børn inn í Lonunum, sum hølini loyva, er neyðugt at gera tillagingar. Neyðugt er at fáa fleiri vesi gjørd, lítlar køk við vask inn á stovurnar, eisini skulu møblar og annað fáast vil vega. Neyv kostnaðarmeting fyriliggur ikki til etablering av stovunum og vesum. Hædd skal tó eisini takast fyri, at leigumálið gongur 31. desember 2023.

Ætlanin er stovna 1 nýggja vøggustovu og 1 barnagarðsstovu, t.e. í alt 32 pláss.

**Játtan**
Tað er ikki tøk játtan til hesi nýggju plássini í 2022 í fíggjarætlanini § 3 Børn og ung. 36 vøggustovupláss í 6 mánaðir krevja eina játtan uppá kr. 1.630.000, og 20 barnagarðsstovupláss í 6 mánaðir krevja eina játtan uppá kr. 549.000. Tað vil siga kr. 2.179.000.

Skotið verður upp at játtað upphæddina av tøkum peningi at flyta á kontu 3215-32019 (Aðrar útreiðslur barnaansing), sum síðani flytur játtanina til stovnarnar, so hvørt plássini verða tikin í nýtslu.

Ein treyt fyri at kunnu taka í móti nýggjum børnum er sjálvandi, um hesir stovnarnir hava nokk av starvsfólkum. Plássini verða latin upp í BARN-skipanini og børnini byrja, so hvørt tað letur seg gera.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**

Trivnaðarstjórin, miðfyrisitingarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at góðkenna, at Miðstovnurin verður víðkaður við tveimum vøggustovum (24 pláss) og einari barnagarðsstovu (20 pláss), og at Lonirnar í Hoyvdølum verður víðka við einari vøggustovu (12 pláss) og einari barnagarðsstovu (20 pláss), og at hesi pláss verða latin upp í BARN-skipanini.

Harumframt verður mælt til at játta kr. 2.179.000 av tøkum peningi at flyta á kontu 3215-32019 (Aðrar útreiðslur barnaansing).

Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 31/22 Lendisgøtur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.03.2018 | 40/18 | 18/00992-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 81/18 | 18/00992-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 67/18 | 18/00992-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.03.2019 | 36/19 | 18/00992-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 20.03.2019 | 83/19 | 18/00992-1 |
| 6 Býráðsfundur | 28.03.2019 | 68/19 | 18/00992-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 01.04.2020 | 65/20 | 18/00992-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 06.04.2020 | 86/20 | 18/00992-1 |
| 9 Býráðsfundur | 06.04.2020 | 58/20 | 18/00992-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 23.04.2020 | 82/20 | 18/00992-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 82/20 | 18/00992-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2020 | 265/20 | 18/00992-1 |
| 13 Býráðsfundur | 29.10.2020 | 236/20 | 18/00992-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.02.2021 | 9/21 | 18/00992-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 17.02.2021 | 23/21 | 18/00992-1 |
| 16 Býráðsfundur | 25.02.2021 | 56/21 | 18/00992-1 |
| 17 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 65/21 | 18/00992-1 |
| 18 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 91/21 | 18/00992-1 |
| 19 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 121/21 | 18/00992-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 21/22 | 18/00992-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 38/22 | 18/00992-1 |
| 22 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 31/22 | 18/00992-1 |
| 23 Býráðsfundur | | | 18/00992-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Ein mió. kr. eru avsettar á íløgum 2018 til lendisgøtur og verður mælt til at gera hesa raðfesting:
1. Sandá heimari partur av gøtuni 765 m
2. Part av 235 m ringgøtuni í Villingadalsfoss.

Kostnaður er mettur til 1 mió. kr.

Ad. 1. Framhald og nýgerð av gøtu við Sandá, nýgerð av gøtu uml. 765 m.
Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Ad. 2. Nýgerð av gøtu við Villingadalsfoss, niðan á fossin. So langt sum 235.000 kr. røkka.

Búnaðarjørð, krevur skrivligt samtykki frá Búnaðarstovuni og festara.

Havast skal í huga ognarviðurskifti, brúksrættindi, viðlíkahaldsskyldur, kostnaður og fígging. Avgerandi er, at eigarin av lendinum gevur loyvi, har sum kommunan ikki eigur, og at ferðslurættindi verða lýst á farleiðina, antin sum servituttur ella onnur avtala.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og virkandi býararkitekturin mæla til at játtaðar verða kr. 1 mió. av løgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til framhaldandi gerð av lendisgøtum og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

Bergun Kass luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Í 2019 er ætlanin at fara undir gøtuna við Sandá, sum varð sett á breddan í 2018, umframt gøtuna frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali.

Fyri gøtuna við Sandá hevur umsitingin í 2018 fingið til vega tilboð, áljóðandi 2.9 mió. kr. Arbeiðið varð raðfest í 2018, og er nakað av arbeiðinum longu gjørt. Játtanin í 2019 skal fevna um írestandi fígging, soleiðis at allur teinurin kann raðfestast.

Gøtan frá gl. vatnbrunninum yvir til ánna í Villingadali er mett til at kosta einar 500.000 kr.

Írestandi fígging fyri 2019 sæst niðanfyri:

| | |
|---|---|
| Gøta við Sandá | 2.900.000 kr. |
| Gøta við Sandá (goldið) | 701.250 kr. |
| Gøta Villingadal (meting) | 500.000 kr. |
| Írestandi játtan fyri 2018 | 1.200.000 kr. |
| **Eftir at játta fyri 2019** | **1.500.000 kr.** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta 1.5 mió kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mars 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býraðið.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 28. mars 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

Arbeitt hevur verið fyri 1.9 mill. í 2019, á strekkinum fram við Sandá. Stígur kom í við at fáa endaligt loyvi frá lendisánara til seinasta strekkið. Sambært tilboði frá arbeiðstakara er kostnaðurin til seinasta strekkið 1,0 mill. kr. eftir. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Sandá

Lendisgøtan við Villingadal bíðar eftir loyvi frá Búnaðarstovuni. Rykt er fleiri ferðir eftir loyvi, og hevur Búnaðarstovan boðað frá, at loyvi verður sent í næstum. Arbeiðið er mett til 500.000,- kr. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Villingadal

Ynski er at gera gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna. Rás er traðkað, men lendisviðurskiftini og hall á lendinum gera tað neyðugt at gera trappur í støðum í lendinum. Skjal 18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 til Rossagøtuna

**Skjøl:**
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Sandá
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 Villingadal
18/00992-22 Planlagdar lendisgøtur 2020 til Rossagøtuna
18/00992-51 Gøtur at gera í 2022

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til at framflyta avlop frá 2019 1.227 mió. kr. og at játta 1.00 mió. kr. av íløgukarminum L00001 á konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019, og at beina málið **í** býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 01. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 06. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Rættleiðing til gøtuna við Sandá
Gøtan við Sandá varð boðin út í 2018.
2 tilboð komu inn, lisitatión var 6. novembur 2018:
Tikið varð av lægra tilboðnum, sum var áljóðandi 2.221.250 kr.

| **Mettur kostnaður var sostatt:** | |
|---|---|
| Tilboð | 2.221.250 kr. |
| Mettur eykakostnaður | 678.750 kr. |
| **Mettur kostnaður íalt** | **2.900.000 kr.** |

| **Status:** | |
|---|---|
| Goldið higartil tilboð | 1.765.550 kr. |
| Goldið higartil eyka (t.e. Eyka hegn, eyka atkoma frá AB vøllinum.o.a. | 258.520 kr. |
| **Goldið higartil** | **2.024.070 kr.** |
| | |
| Arbeiði eftir av gera tilboð | 455.700 kr. |
| Eftir til eyka | 420.230 kr. |
| **Eftir av játtan** | **875.930 kr.** |

Henda upphædd er íroknað framflutta upphædd frá 2019

Avlop verður brúkt til Lendisgøturnar planlagdar í 2020. T.e. gøtan í Villingadali og niðan á Rossagøtuna.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 23. apríl 2020:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**
Viðvíkjandi lendi burtur av matr.nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, sum er privatogn. Sí kortskjal 18/00992 - 33

Kommunan hevur í samráð við eigaran gjørt gøtu framvið ánni, inni á matr. nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, og hevur í hesum sambandi flutt hegnið niðan um gøtuna. ( Sí kortskjal 18/00992 – 33 )

Neyðugt verður at keypa uml. 270m2, av lendi til gøtuna, frá verandi eigara.

Talan er um D1 øki í byggisamtyktini. Fermeturprísur sambært yvirliti hjá Búnaðarstovuni fyri velt lendi og væl dyrkingarbært lendi, sum liggur væl fyri er 137kr. pr. m2. Samlaður keypsprísur verður uml. 37.000,- kr. og skal kommunan harumframt rinda rinda allar allar útreiðslur til matrikulering. Mettur kostnaður kr. 4.000,-

**Tilmæli.**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at keypa neyðugt lendið uml. 270 fermetrar, burtur av matr.nr. 32a, Kirkjubøur/Argir, til gøtuna fyri 37.000,00 kr. og at rinda útreiðslur til matrikulering uml. 4.000,00 kr.

Konto 6275 Fríðkan av kommununi til lendisgøtur L62019.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. oktober 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við víðkan av gøtukervinum í Tórshavnar kommunu er ætlanin at raðfesta 4 gøtustrekkir í árinum 2021. Talan er um gøturnar:

1. Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali
2. Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna
3. Framhald av gøtu Frammi í Dal, Kollafjørður
4. Gøta út á Hvítasand

Ad. 1 – Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali, sí j.nr. 18/00992-38. Ynskiligt er at gøtan framvið Sandá heldur áfram víðari út í dalin sambært kortskjalinum. Í fyrsta umfari skal gøtan leggjast í lendi, soleiðis at hon í minst møguligan mun ávirkar náttúruna og djóralívið á staðnum. Kommunan varðar av stórum parti av lendinum, men eru eisini traðir, sum eru privat ogn og verður tí neyðugt at fara í samráðingar við hesar eigarar um hvussu gøtan gongur framvið teirra ogn. Talan er um eina tilgongd, sum kann draga út, alt eftir hvussu samráðingarnar ganga, men kann eisini hugsast, at fólk hava sæð virknaðin og stóru gleðina hjá borgarum fyri verandi gøtur framvið Sandá.
Tá gøtan er staðsett, kann arbeiðið bjóðast út og verður tá komið aftur í avvarðandi nevndir fyri at raðfesta neyðugu fíggingina.

Ad. 2 – Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna, sí j.nr. 18/00992-39. Hendan gøtan varð raðfest í 2020, men vísti tað seg, at tilboðið upp á gøtuna var so høgt, at kommunan vrakaði tilboðið. Ætlanin er at bjóða gøtuna út av nýggjum og verður síðani komið aftur í avvarðandi nevndir fyri at raðfesta neyðugu fíggingina.

Ad. 3 – Framhald av gøtuni Frammi í Dal í Kollafirði, sí j.nr. 18/00992-40. Gøturnar í Kollafirði verða gjørdar av sjálvboðnum initiativi, sum merkir, at fólk á staðnum standa fyri gøtugerðini, meðan kommunan fíggjar tilfarið til gøtugerðina. Í 2021 væntast at brúka 300.000 kr. til framhald av verandi gøtum.

Ad. 4 – Gøta út á Hvítasand, sí j. nr. 18/00992-41. Sambært Frílendisætlanini fyri Hoydalar er ynskiligt, at gøta verður gjørd út á Hvítasand. Gøtan skal leggjast væl í lendið og síðani bjóðast út til arbeiðstakarar at gera. Tá eitt tilboð fyriliggur fyri gerð av gøtuni, verður komið aftur í avvarðandi nevndir fyri at raðfesta neyðugu fíggingina til arbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- At farið verður undir fyrireikingararbeiðið til gøtu 1, 2 og 4, fyri síðani at venda aftur í avvarðandi nevndir við eini ætlan og tilboði fyri gerð av gøtunum.
- At játtaðar verða kr. 300.000 av L00001, Løgukarmur fyri árið til L62019, Lendisgøtur, til framhald av gøtu nr. 4, Frammi í Dal í Kollafirði.
- At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. februar 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2021:** Samtykt at taka undir við Byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 25. februar 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Gøturnar, ið eftir ætlan skulu raðfestast í ár (2021) verða gjøgnumgingnar niðanfyri í mun til kostnað o.a.. Ein eyka gøta er løgd afturat raðfestingarlistanum: gøtan kring vatnbrunnin í Havnardali.

1. Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali
2. Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna
3. Framhald av gøtu Frammi í Dal, Kollafjørður
4. Gøta út á Hvítasand
5. Gøta kring vatnbrunnin í Havnardali

Ad 1 - Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali, sí skjal 18/00992-38
Gøtan varð koyrd í útboð í mars mánað. Ástaðarfundur var á gøtuni t. 19. mars, har greitt var frá arbeiðinum. Samlaða gøtulongdin, sum skal gerast, er áleið 1910 m, og er arbeiðið á gøtuni deilast sundur í trý strekki.
Níggju veitarar við viðkomandi arbeiðsroyndum vórðu bjóðaðir at luttaka, og hava fýra av hesum bjóðað uppá arbeiðið. Innkomnu tilboðsupphæddirnar vóru hesar:

| | |
|---|---|
| Veitari 1: | 2.144,459,16 kr. |
| Veitari 2: | 3.145.070,00 kr |
| Veitari 3: | 4.373.882,00 kr |
| Veitari 4: | 6.016.500,00 kr |

Prísir eru uttan MVG. Mælt verður til, at umsitingin fer undir samráðingar við veitara 1, sum eigur lægsta tilboðið uppá arbeiðið. Harumframt at fáa neyðugu avtalur og loyvi til vega frá viðkomandi pørtum, eitt nú frá traðaeigarum og náttúrufriðingar myndugleikanum, soleiðis at arbeiðið kann fara í gongd..

Kostnaður í alt: 2.273.127 kr. v/mvg
Av tí at gøtan gongur gjøgnum nógvar privatar traðir, so verður mett neyðugt við 200.000 kr. til óvæntaðar útreiðslur.

Ad. 2 - Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna sí j.nr. 18/00992-39. Gøtan er koyrd í útboð, og ástaðarfundur var á gøtuni 25. mars. Freistin hjá veitarum at senda tilboð inn er 12 apríl. Arbeiðið fevnir um at gera eina lendisgøtu við trappu. Samlaða longdin á gøtuni er 110 m.

Mettur kostnaður fyri arbeiðið er áleið 600.000 kr.

Ad. 3: Framhald av gøtu Frammi í Dal, Kollafjørður, sí j.nr. 18/00992-40.
Umsitingin hevur sent eitt svarskriv um játtan á kr. 300.000, samtykt í býráðnum 25. februar, til lokalu borgararnar, sum standa fyri arbeiðinum á hesi gøtuni.
Hetta arbeiðið verður framt í ár sambært avtalu.

Ad. 4: Gøta frá Boðanesið út á Hvítasand sí j. nr. 18/00992-41
Gøtan varð koyrd í útboð í mars mánað, og hevur ástaðarfundur verið á gøtuni 19. mars. Samlaða longdin á gøtuni er umleið 250 m.

Somu veitarar, sum til gøtu 1, vórðu bjóðaðir at luttaka, og hava 7 bjóða uppá arbeiðið:

| | |
|---|---|
| Veitari 1: | 172.500 kr. |
| Veitari 2: | 181.427 kr. |
| Veitari 3: | 275.000 kr. |
| Veitari 4: | 311.250 kr. |
| Veitari 5: | 349.750 kr. |
| Veitari 6: | 402.250 kr. |
| Veitari 7: | 404.417 kr. |

Prísir eru uttan MVG. Mælt verður til, at fara undir samráðingar við veitara 1, sum eigur lægsta tilboðið uppá arbeiðið, umframt at fáa neyðugu avtalur og loyvi til vega frá viðkomandi pørtum, eitt nú yvirfriðingarmyndugleikanum.

Kostnaður íalt við MVG er 200.000 kr.

Ad.5 - Gøta kring vatnbrunnin í Havnardali, sí j.nr. 18/00992-045
Afturat omanfyri nevndu gøtum er uppskot til gerð av gøtu kring vatnbrunnin í Havnardali (sí hjálagda kort). Uppskotið kann síggjast sum partur av frílendisætlanini fyri Havnardal, har endamálið er at skipa og varðveita økið sum frítíðarøki til almenningin.

Samlaða longdin av gøtuni er áleið 1260 m, og gongur gøtan gjøgnum landsjørð umframt kommunalt lendi. Neyðugt verður at fáa loyvir frá avvarðandi festarum, soleiðis at gøtan kann ganga gjøgnum teirra lendir.

Ætlanin er at bjóða gøtuna út til royndar veitarar. Tá tilboð fyriliggur, verður tað lagt aftur í nevnd til kunningar. Fyri at seta fyrireikingar/arbeiðið í gongd verður mælt til at játta 1.000.000 kr. til gøtuna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At farið verður undir at fáa neyðugu avtalur og loyvi frá viðkomandi pørtum til gerð av nevndu gøtu 1, 2, 4 og 5.
- at játta í alt kr. 4,3 mió. kr. av konto 6275, L00001 Løgukarmur fyri árið, til konto 6275, L62019 Lendisgøtur, til gerð av niðanfyri nevndu gøtum:

| Gøta – heiti: | Kostnaður: |
|---|---|
| Gøta 1 - Framhald av gøtuni fram við Sandá úti í Havnardali: | 2.473.127 kr. |

| | |
|---|---|
| Gøta 2 - Gøtusamband millum gomlu Vatnbrunnarnar í Grásteinsgøtu og Rossagøtuna | 600.000 kr. |
| Gøta 4 – Gøta út á Hvítasand | 200.000 kr. |
| Gøta 5 – Gøta kring vatnbrunnin í Havnardali | 1.000.000 kr. |

- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við víðkan av gøtukervinum í Tórshavnar kommunu er ætlanin at raðfesta fylgjandi gøtustrekkir í árinum 2022.

1. Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin
2. Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
3. Gøta í Viðarlundini í Gundadali
4. Gøta oman á Sandagerði argjamegin
5. Gøta niðan á Hoyvíksvøll frá Jørundargøtu
6. Gøtuni kring vatnbrunnin í Havnardali
7. Gøtan á Hvítasand, fylgiarbeiði

Sí journal nr. 18/00992-51

Stórur tørvur er á at viðlíkahalda verandi gøtukervi í kommununi og tí er ynskiligt at partur av játtanini til gøturnar fer til hetta í 2022.

Ad. 1 – Gøta í Hoydølum, frá Sanatoriivegnum til Hoyvíksvegin
Ein gøta á áleið 400 metrar, sum samanbindur Sanatoriivegin við Hoyvíksvegin. Henda gøtan er í Boðanesætlanini nevnd sum høvuðsgøta í frílendinum og kemur at geva møguleika fyri enn betur túrum í økinum. Gøtan liggur á landsjørð og má tí gerast í samráð við Umhvørvisstovuna, sum umsitur lendið.
Á fløtuni í Hoydølum varð fyrsti fótbóltsvøllur í Havn og ynski er um at vísa á hetta søguliga stað á leiðini. Ætlanin er at gera hetta við eini minnisplátu við mynd av fyrsta fótbóltsdystinum millum HB og TB, sum var 18. juli 1909.

Ad. 2 – Gøtur, ið samanbinda verandi gøtukervi í Sortudíki
Nógv ymisk gøtustrekki eru gjørd í Sortudíki, Gundadali og á Ternuryggi, men summi gøtustrekki mangla og tí er ikki møguligt at ganga allan vegin frá Ternuryggi og oman til Gundadal ella yvir til Svartafoss gjøgnum tað grøna lendið. Við at gera hesi gøtustrekkini, verða verandi gøtur samanbundnar. Talan er um ymisk gøtustrekki á áleið 590 metrar tilsamans.

Ad. 3 Gøta í Viðarlundini í Gundadali
Verandi gøtukervi í Viðarlundini í Gundadali er væl útbygt við nógvum góðum gøtum og hesar verða eisini nógv brúktar av borgarunum úr øllum býnum.
Við verandi gøtukervi er tó ikki møguligt at ganga ein langan rundtúr inni í viðarlundini.
Við at gera eitt 200 metrar gøtustrekki, kann verandi gøtukervi knýtast saman og møguligt verður at ganga ein langan samanhangandi túr inni í Viðarlundini.
Arbeiðið við gøtuni skal gerast í samráð við Skógrøktina.

Ad. 4 – Gøta oman á Sandagerði Argjamegin

Ynskiligt er at skapa betur samband oman á Sandagerð við at gera eina atkomu oman á sandin argjamegin. Talan er um eina gøtu, sum gongur frá Rættargøtu, gjøgnum stykkið, sum tilhoyrir festinum í Sandagerði og oman á sandin. Loyvi krevst frá umsitarunum av festinum í Sandagerði og frá fríðingarmyndugleikunum at fara í holt við hesa gøtu.

Ad. 5 Gøta niðan á Hoyvíksvøll
Eigarafelagið Jørundar- og Torkilsgøta eftirspyr, at sambandið niðan á Hoyvíksvøll verður betur. Ymiskir møguleikar eru fyri hvussu hetta sambandið kann betrast, og umsitingin ynskir at fara í samskifti við eigarafelagið um at fáa gjørt eina góða gøtu millum Jørundargøtu og Hoyvíksvøll.

Ad. 6 Gøtan kring vatnbrunnin í Havnardali
Fyrireikingar til gøtuni kring vatnbrunnin í Havnardali eru farnar í gongd í 2021 og arbeitt verður víðari við hesi ætlan í 2022.

Ad. 7 Gøtan á Hvítasand, fylgiarbeiði
Gøtan er komin væl áleiðis og verður liðug í vár, og nøkur fylgiarbeiði, onkur átrokandi, eiga at verða gjørd sum avleiðing av gøtuni, ið er gjørd.
Tilfar sum lá í grótbrotinum á Boðanesi varð brúkt til gøtuna, soleiðis at bergið nú er fríttlagt. Neyðugt er at skróta bergveggin, fyri at leyst grót ikki ríður oman. Gøtan frá høvuðsvegnum og oman treingir til at verða sett í stand, jaðarin framvið hampaður og veitin reinsað, soleiðis at vatn verður hildið frá gøtuni.
Ein fløta er nú við økið, har gøtan á Hvítasand byrjar, har gamla grótrúgvan er ruddað og koyrd burtur. Ynskiligt er, at leggja skorið grót frá gamla grótídnaðinum á hesa fløtuna, til borð/stólar at fríðka um og skipa økið til uppihald.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- At farið verður undir fyrireikingararbeiðið til gøtu 1-5, fyri síðani at venda aftur í avvarðandi nevndir við eini ætlan og tilboði fyri gerð av gøtunum.
- At játtaðar verða kr. 1.000.000 av L62019 til viðlíkahald av gøtukervinum í kommununi og verða fluttar á konto 6212
- At játtaðar verða 150.000,- kr. av L62019 til gøtu 7, og verða fluttar á L62019 Boðanes-Hoydalsætlanin
  At málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri viðmerking viðvíkjandi teimum 150.000 kr., at hesar verða fluttar av LK62019 Løgukarmur fyri lendisgøtur yvir á L62019 Boðanes-Hoydalsætlanin. Málið beint í býráðið til tvær viðgerðir – tí talan lutvíst er um eykajáttan.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Borgarstjórin mælti býráðnum til at taka undir við fíggjarnevndini við teirri broyting, at tær 150.000 kr. verða fluttar av LK62997 Løgukarmur fyri lendisgøtur yvir á L62019 Boðanes-Hoydalsætlanin.

Atkvøtt varð um málið við fyrstu viðgerð, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri, einari blankari og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jóhan Petur Johanesen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg

Málið beint víðari til aðru viðgerð.

# 32/22 Torg í Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 23/22 | 22/00327-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 39/22 | 22/00327-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 32/22 | 22/00327-1 |

**Upprunin til málið**
Síðani kirkjan í Hoyvík var liðugt bygd í 2007, hevur stórt ynski verið um at fáa gjørt uttanum økið liðugt. Kirkjan er staðsett við Hoyvíkar skúla sum nærmasta granna, sunnast á Karlamagnusarbreyt, sum er útnevnt til miðstaðargøtan í Hoyvík,.
Økið, sum liggur millum kirkjuna, skúlan og Karlamagnusarbreyt, er í dag ógreitt og óliðugt. Ynski er, at økið verður gjørt til eitt torg, sum tekur hædd fyri virkseminum í økinum og samstundis ger torgið til eitt savningarstað fyri alla Hoyvíkina til hátíðarløtur og líknandi.

**Lýsing av málinum**
Tá arbeitt varð við heildarætlanini fyri Karlamagnusarbreyt í 2020 varð víst á, at torgið hevði stóran leiklut í at Karlamagnusarbreyt verður fullfíggjað, samstundis sum at neyðugt verður at taka hædd fyri ymiskum ferðsluviðurskiftum í sambandi við skipan av torginum. Harafturat legði heildarætlanin upp til, at gøta varð gjørd millum kirkjuna og kirkjugarðin í Hoyvík, sum kundi leiða jarðarfylgir virðiliga seinasta teinin niðan í kirkjugarðin.

I løtuni verður arbeitt við hesi kirkjugarðsleið, og verður í næstum farið undir at knýta leiðina í økið, har torgið skal gerast. Hetta er somuleiðis við til at gera, at tað er júst nú at farið eigur at verða undir at fáa torgið sniðgivið. Ætlanin er at fáa uppskot til hvussu torgið í Hoyvík skal skipast, og er ætlanin í hesum sambandinum at bjóða ráðgeva at koma við uppskoti til skipan og sniðgeving av torginum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er týdningarmikið at taka støði í heildarætlanini fyri Karlamagnusarbreyt, tá farið verður undir at sniðgeva torgið, umframt at ymisku áhugapartarnir í torginum eiga at fáa møguleikan at koma við viðmerkingum, so sum skúlin, kirkjan og møguliga ein lítil bólkur av borgarum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- Heildarætlan fyri Karlamagnusarbreyt, mál nr. 20/00622
- Kirkjugarðsleiðin, mál nr. 21/01366

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |

| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at heimila umsitingini at bjóða skipan og sniðgeving út til ráðgeva og at flyta 1 mió. kr. av LK62048, Torg í Hoyvík til nýggja verkætlan á kt. 6275, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 33/22 Frítíðarhús í Hesti – matr.nr. 101 og 10a

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 24/22 | 22/00328-1 |
| 2 Hest/Koltursnevndin | 15.03.2022 | 1/22 | 22/00328-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 33/22 | 22/00328-1 |

**Upprunin til málið**
Seinastu árini er fólkatalið í Hesti støðugt minkað, helst bæði grundað á sambandið til oynna, men eisini grundað á tilboðini í oynni, umframt at lítið og einki arbeiðsvirksemi er í oynni.

Henda tilgongdin hevur havt við sær, at fleiri og fleiri síggja møguleikar í at menna oynna til eina ferðavinnuoyggj. Eisini vísir tað seg, at fleiri og fleiri ynskja at ogna sær frítíðarhús í oynni.

Hesi hugskot og ynskir ynskir kommunan at stimbra undir, og tí verður farið undir at bjóða tveir matrikklar út til at byggja frítíðarhús á.

**Lýsing av málinum**
Talan er um matr. nr. 101, sum í byggisamtyktini er lagt út til frítíðarhús, og so er tað partur av matr. nr. 10a, sum liggur niðri við havnalagið, men sum enn ikki er broytt til bygging av frítíðarhúsum. Báðir matrikklarnir eru ogn kommunurnar. Sí skjal nr. 22/00328-2, sum sýnir økini, sum ætlanin er at bjóða út.

Útbjóðingarskrivið/ini eru enn ikki gjørd, og er tað ikki avgjørt, hvussu verkætlanin skal bjóðast út ella hvørjar treytir skulu setast teimum sum bjóða. Tað er somuleiðis hugsandi, at økini skulu hava ymiskar treytir, so tað ger tað møguligt, at nakað verður bygt liðugt at leiga út ella selja og annað verður selt privatum at byggja síni egnu frítíðarhús á.
Tað eru fleiri viðurskiftir, sum eiga at verða umrødd í hesi tilgongdini, og fer umsitingin at seta seg í samband við umboð úr Hesti til at umrøða verkætlanina, áðrenn endaliga útbjóðingarskrivið verður lagt út alment at bjóða uppá.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Serstaka byggisamtyktin fyri Hest
Kunngerð nr. 122 frá 22. desember 2000 um alment útboð av kommunalari fastogn galdandi.

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/04429 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Hest
21/02256 Broyting av byggisamtykt fyri Hest

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**
22/00328-2 Summarhúsøki í Hesti

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umhvørvisavleiðingar** | | x | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at fara undir at gera útbjóðingartilfar at bjóða matrikklarnar út til bygging av frítíðarhúsum og at beina málið í býráðið umvegis staðbundnu nevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt**.**

# 34/22 Bústaðarskylda

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 30.05.2018 | 151/18 | 18/01975-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 183/18 | 18/01975-1 |
| 3 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 156/18 | 18/01975-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 27/22 | 18/01975-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 34/22 | 18/01975-1 |

**Upprunin til málið:**
Fleiri hús í Havnini standa tóm, og serliga er tað í ávísum pørtum av havnini, sum t.d. í gomlu Havnini. Býarskipanarliga er hetta tyngjandi fyri trivnaðin og sosiala virksemið í einum býi, tí einki lív er í einum grannalagi ella myrkt er í vindeygunum, tá ongin býr í einum húsi ein part av árinum. Býarskipanardeildin hevur skrásett ognir í miðbýnum, har eingin er skrásettur at búgva - sí kortskjøl; *Yvirlit – eingin skrásettur á bústaðnum* journal nr. 18/01975-2 og *Kort – eingin skrásettur á bústaðnum* journal nr. 18/01975-3.

Í løtuni verða nógvir nýggir bústaðir bygdir í kommununi, og fyri at lofta trupulleikanum við tómum húsum, sum somuleiðis kann gerast ein størri trupulleiki í nýggju býlingunum, er málið vorðið búgvið til at taka spurningin viðvíkjandi bústaðarskyldu upp aftur til viðgerðar.

Føroyar gerast somuleiðis eitt alsamt meiri áhugavert ferðavinnumál, og kann roknast við, at hús verða keypt til ferðavinnu endamál, heldur enn at vanligi føroyingurin fær ognað sær eini hús í Tórshavnar kommunu.

Bústaðarskyldan er ein háttur at basa trupulleikanum við at fleiri hús standa tóm, men eisini kann ljós varpast á møguleikan, at áseta ein form fyri ognarskatt á hús nr. 2 hjá fólki.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Sum nú er, ásetur kommunan bústaðarskyldu í servituttin á ognini, sum er ein privat avtala millum keypara og kommununa. Avbjóðingin við hesum er, at tað ikki finst nøkur mannagongd fyri, hvussu kommunan handhevjar hesa avtalu ella hvørjar avleiðingarnar eru, um avtalan ikki verður fylgd.
Í høvuðsheitum er trupulleikin tann, at tað finst ongin føroysk lóg, sum heimilar kommunum at áleggja bústaðarskyldu á ognir í kommununi – tað eru bert bøndur og prestar, sum hava bústaðarskyldu Føroyum.

- Tað verður ógvuliga trupult/kanska ógjørligt uttan lóggávu at áleggja bústaðarskyldu á verandi ognir/bústaðir – sum hava bygt/keypt undir øðrum treytum. Tí er spurningurin, um talan ikki einans kann vera galdandi fyri keyp og sølu av húsum eftir at bústaðarskylda er komin í gildi?

- Skal bústaðarskyldan verða tengd at einum ávísum persóni? Ella skal eigarin av ognini hava skyldu til at tryggja, at onkur býr/leigar í bústaðnum eitt ávíst tíðarskeið um árið.

- Mælt verður til at heita á Kommunufelagið, um at kanna um tað kann áleggjast bústaðarskylda í byggisamtyktum.

- Spurningurin um bústaðarskyldu er ein spurningur, sum Løgtingið má geva heimild fyri við lóg.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Einki

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*Bústaðarskylda á Reyni 2013-2551* journal nr. 14/00802

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**
Einki

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Frá løgdeildini:
Í Danmark er heimild fyri beinleiðis "bústaðarskyldu" at finna í landbrugsloven. Her hevur eigarin av landbrúki skyldu at búgva á landbrúksognini. Líknandi ásetingunum í føroysku lógini um embæti og størv í fólkakirkjuni.
Harumframt hevur Danmark eina "boligreguleringslóg", ið kommunurnar sjálvar gera av, hvørt tær seta í gildi. Okkum kunnugt, hava flestar kommunur í Danmark sett nevndu lóg í gildi.
Boligreguleringsloven gevur donsku kommununum sera inntrívandi møguleikar fyri at tryggja, at fólk eru í flest øllum bústøðum í kommununi. Boligreguleringslógin fevnir um allar bústaðir – tað verur seg almenna ella privata ogn.
Bústaðarskylda vil siga, at tú skalt hava adressu í fólkayvirlitinum á staðnum, har ognin liggur. Sostatt hava eigarar, sambært donsku boligreguleringsloven, skyldu at búgva (skrásettir í fólkayvirlitinum) í ogn síni, um ikki, kann verða álagt eigarum at leiga út ogn sína, og harvið tryggja, at fólk býr í ognini.

**Skjøl**
*Bústaðarskylda á Reyni 2013-2551* journal nr. 14/00802-6
*Yvirlit – eingin skrásettur á bústaðnum* journal nr. 18/01975-2
*Kort – eingin skrásettur á bústaðnum* journal nr. 18/01975-3
*Fundarfrásøgn millum Kommunufelagið og TK um bústaðarskyldu* journal nr. 18/01975-19

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávísøkir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | x | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | x | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og virkandi tekniski stjórin mæla til at umrøða málið, at heita á Kommunufelagið og landsmyndugleikarnar at taka málið upp aftur til viðgerðar og at koma við uppskoti til eina skipan og mannagongdir, sum kommunurnar kunnu arbeiða út frá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2018:** Samtykt at heita á landsins myndugleikar um at útvega kommununi lógarheimild at lýsa bústaðarskyldu á útvaldum økjum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.
Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við sjey atkvøðum fyri, tveimum ímóti og fýra blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Gunvør Balle og Ruth Vang.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein og Halla Samuelsen.

Blankt atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Helena Dam á Neystabø og Bjørghild Djurhuus.

**Ískoyti:**
Síðan málið var fyri politiskari støðutakan, er svar komið frá Almannaráðnum um at kommunur ikki hava heimild til at áseta bústaðarskyldu á ognir. Harafturat kunnaði Almannaráðið okkum um at;

- tað eisini ber til at áleggja bústaðarskyldu á verandi bygningar. Á henda hátt kann tað skjótt økjast um útboðið av leigubústøðum kring landið. Hægstirættur staðfestur, at reglur um eitt nú bústaðarskyldu ikki eru at meta sum ognartøka í tann mun, at talan er um sakliga og almenna stýring av bústaðarøkinum, grundað á bústaðartrot.

- persónlig bústaðarskylda ikki er vanlig innan bústaðarøkið, tí endamálið við bústaðarskylduni eins væl kann røkkast við almennari bústaðarskyldu, sum er, tá eigin av bústaðnum hevur skyldu til at tryggja, at onkur býr á bústaðnum.

- bústaðarskylda ikki kann áleggjast í byggisamtyktum uttan so, at kommunurnar fáa serliga lógarheimild til hetta.

Við støði í svarinum frá Almannaráðnum átti Tórshavnar kommuna at heitt á Kommunufelagið um at fáa neyðugu lógarheimildina til vega.

Á fundi við kommunufelagið hin 13. januar í 2022 (sí skjal *Fundarfrásøgn millum Kommunufelagið og TK um bústaðarskyldu*) bleiv staðfest at skilabest er at fáa málið á breddan aftur við at fáa sett málið á skrá til starvsbólkafundin í kommunufelagnum, sum er ein arbeiðsbólkur fyri kommunustjórar. Her kann málið verða lýst, og eitt orðaskifti verða tikið upp. Hareftir kann málið koma fyri stýrið í Kommunufelagnum, sum síðani sendir málið til Umhvørvis- og vinnumálaráðið at taka upp.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin og býararktekturin mæla til, at heita á Kommunufelagið um at taka málið upp til viðgerðar við tí fyri eyga, at fáa neyðugu lógarheimildina til at áleggja bústaðarskyldu á ognir í ávísum økjum í kommununi og at beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Annfinn Brekkstein og Ruth Vang, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri, 4 ímóti og ongar blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Birgir Nielsen, Jóhan Petur Johannesen og Ruth Vang.

# 35/22 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.06.2021 | 140/21 | 21/02624-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 23.06.2021 | 176/21 | 21/02624-2 |
| 3 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 184/21 | 21/02624-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 29.11.2021 | 244/21 | 21/02624-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 08.12.2021 | 330/21 | 21/02624-2 |
| 6 Býráðsfundur | 16.12.2021 | 320/21 | 21/02624-2 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 28/22 | 21/02624-2 |
| 8 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 42/22 | 21/02624-2 |
| 9 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 35/22 | 21/02624-2 |

**Upprunin til málið**
Málið er byrjað sum eitt politiskt mál.

**Lýsing av málinum**
Sambært kommunuætlanini og bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu eru visjónirnar fyri kommununa, at fleiri bústaðir skulu gerast í kommununi. Politiskt er ynski at royna aðrar leiðir fyri at nøkta tørvin á bústøðum, og tí verður farið undir at bjóða privatum mennarum at keypa part av matr. nr. 203c í Kollafirði fyri at menna til bústaðir.

Tórshavnar kommuna eigur matr. nr. 203c, og upprunaliga var ætlanin at stykkja lendið út saman við parti av matriklunum niðanfyri út til sethúsagrundir. Hendan ætlanin kom ongantíð á mál, og nú er ynski so at bjóða part av økinum út til aktørar at menna til bústaðir. Ætlanin er at selja uml. 3600 fermetrar í fríari sølu. Sí kortskjal, øki til sølu, journal nr. 21/02624-4.

Í sambandi við útboðið verður krav sett um, at tað skulu byggjast íbúðir ella raðhús. Tað er upp til tey bjóðandi at koma við uppskoti, hvussu byggingin verður skipað og hvat slag av bústøðum verða bygd. Bústaðirnir kunnu verða bygdir sum eigara- ella leigubústaðir.

Tilhoyrandi parkering og nøktandi loysnir fyri uttanumøkið er partur av loysnini.
Kommunan setir sum treyt, at tað er eitt hóskandi tal av bústøðum í verkætlanini. Tað er ein fyrimunur um byggingin er fjølbroytt og at atlit verður tikið til umhvørvið og stórfingna útsýnið. Dentur verður lagdur á, at byggingin tekur seg væl út, er dygdargóð og fellur væl inn í landslagið.

Útbjóðingin og sølan verður løgd soleiðis til rættis, at tað verður komið fram til bestu loysnina, sum tryggjar eina fjølbroytta, snøgga og dygdargóða bústaðarloysn, sum tekur seg væl út í umhvørvinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Matrikul nr. 203c liggur í umráðispartinum A1 í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, og er serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Lygnesi í Kollafirði galdandi fyri økið, sí skjal nr. 21/02624-3.

Tá vinanndi verkætlanin verður ment, verður neyðugt at broyta byggisamtyktina samsvarandi ætlanunum fyri økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tað er týdningarmikið at tryggja, at innkomnu tilboðini verða gjøgnumgingin við atliti at tryggja, at tað sum ætlanin er at fara undir at byggja hóskar til umhvørvið og fellir væl inn í økið sum heild.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið hevur ikki verið hjá øðrum deildum enn.

**Skjøl**
Øki til sølu, journal nr. 21/02624-4
Serstøk byggisamtykt fyri útstykking á Lygnnesi í Kollafirði, journal nr. 21/02624-3

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, tekniski stjórin, leiðarin á stjórnardeildini og býararkitekturin mæla til, at matr. nr. 203c verður boðin út í fríari sølu við endamálinum at menna bústaðir á ognini eins og omanfyri lýst, og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. juni 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Tá freistin at lata tilboð inn 15. november 2021, kl. 12 var farin, var eitt tilboð innkomið.

Tilboðið er frá Jóan Petur Vang áljóðandi kr. 1.586.000 við Kontrast, sum ráðgeva.
Hetta tilboðið hevur ein fermetrakostnað áljóðandi kr. 350,00 fyri teir 4.480 fermetrarnar, ið er júst sama upphædd sum kostnaðarmetingin fyri lendið frá útboðstilfarinum. Tilboðið er væl lýst við einum sokallaðum skipanaruppskoti og við eini treyt um at graviloyvið verður givið soleiðis, at grevstur longu kann setast ígongd 1. mars 2022. Um hetta kann lata seg gera, fer byggingin ígongd pr. 1. juni 2022 og varðar uml. í 22 mánaðir, sí fylgiskjal *Upplegg 1.1.pdf.*

Ein nýggj serstøk byggisamtykt fyri økið skal gerast, ið loyvir bygging sambært uppskotinum. Hetta merkir, at áðrenn graviloyvi kann gevast, skal serstaka byggisamtyktin liggja til almenna hoyring í seks vikur, fyri síðan at góðkennast av Umhvørvis- og vinnumálaráðnum. Ein tílík tilgongd plagar at taka millum ein til

tríggjar mánaðir. Tí fer tað ikki at bera til at ganga treytini á møti og ein samráðing skal tí takast upp við tilboðsgevaran.

Talan er um níggju raðhús og fýra punkthús við tveimum íbúðum í hvørjum.
Støddirnar á raðhúsunum eru 125 fermetrar deilt yvir tvær fullar hæddir, umframt p-kjallara. Punkthúsini hava tvær íbúðir, ið eru ávikavist 75 og 100 fermetrar.

Búeindirnar hava nøktandi p-pláss. Tó ynskir kommunan eina øðrvísi skipan av teimum, soleiðis at fleiri verða á felagsøki, til tá føðingardagar o.a. er í økinum.

Økið er væl skipað við varðveittum bøgarði. Umsitingin metir tað sum eina styrki fyri dámin í økinum, at punkthúsini standa forskotin. Hetta er ikki ein vanligur háttur at staðseta hús á bygd, men hetta gevur meining í mun til gjøgnumtrek og sólargang.
Prinsippið við at byggja høgt upp móti hamrum er nakað, ið kommunan ynskir at síggja meiri av. Bygningarnir taka ikki útsýni umframt at hamarin skapar lívd.

Sum nevnt skal nýggj serstøk byggisamtykt skal gerast fyri økið og verandi serstaka byggisamtyktin, *SB_Kollafjørður_Lygnnes_2011_2_2011*, skal avtakast. Frávik skal gerast í nýggju serstøku byggisamtyktini, ið loyvir íbúðarbygging. Hæddin er hægri enn tann, ið er loyvd í A1 økjum og tí skal frávik eisini gevast til hetta. Orsøkin til høgu byggingina er, at parkering er undir raðhúsabygningunum. Hetta hevur nakrar fyrimunir við sær, ið kommunan átti at stuðla. Lendisnýtslan verður meiri effektiv og tann parturin, ið annars hevði blivið asfalteraður til p-pláss, kann blíva lagdur sum t.d. grønt øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at
- Jóan Petur Vang fær í boði at keypa lendið til íbúðir og raðhús fyri tilboðsupphæddina kr. 1.586.000
- farið verður undir at gera eina serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 203c í Kollafirði í samráð við keyparan av lendinum
- og at málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at byggingin skal fara í gongd innan 2 ár.

**Fíggjarnevndin 08. desember 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. desember 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur verið í samband við Jóan Petur Vang um treytirnar, sum hann setir í tilboðnum um at fáa graviloyvi pr. 1. mars 2022 og at keypspeningurin fyri stykkið skal innganga í vegagerð og felagsøki, sum kommunan skal yvirtaka, tá verkætlanin er liðug. Samanumtikið kunnu vit ikki góðkenna treytir, og av tí sama hevur Jóan Petur Vang valt at trekkja tilboðið aftur.

Umsitingin hevur viðgjørt treytirnar og komin fram til hesar grundgevingar:
- Byggi- og graviloyvi kann ikki útvegast, áðrenn ein serstøk byggisamtykt er endaliga góðkend.
- Sambært kommunustýrislógini § 50, stk., ið bannar stuðli til einstaklingar, hevur kommunan ikki heimild til at gera eina avtalu, sum inniber, at keypspeningurin fyri lendið gongur inn aftur í egnu verkætlan í form av gjaldi fyri vegagerð. Hetta vildi verið at meta við at fáa lendið ókeypis. Um vit loyvdu einari slíkari treyt at inngingið í handilin eftirfylgjandi, vildi tað eisini verið í stríð við reglurnar um útboð av kommunalari fastogn tí onnur, sum møguliga høvdu í huga at bjóða upp á lendið, hava ikki fingið hendan møguleikan.

Ynskiligt er tó framvegis at fáa fleiri búeindir í kommununi og ein roynd átti at verið gjørd at bjóða lendið út umaftur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til, at matr. nr. 203c í Kollafirði verður boðin útaftur av nýggjum í fríari sølu og við somu treytum sum áður, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina..

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og byárskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 36/22 Útbjóðing av matr. nr. 1356, 1355 og 645a til lutaíbúðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.11.2021 | 228/21 | 21/04713-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.11.2021 | 311/21 | 21/04713-1 |
| 3 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 17/22 | 21/04713-1 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.02.2022 | 52/22 | 21/04713-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 23.02.2022 | 63/22 | 21/04713-1 |
| 6 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 36/22 | 21/04713-1 |

**Upprunin til málið**

Eingin ivi er um, at við einum fjølbroyttum bústaðarmarknað kann kommunan virka fyri eini fjøltáttaðari fólkasamanseting. Týdningarmikið er, at fjølbroytni vísir seg innan bústaðarsløg men eisini innan eigaraviðurskifti. Í bústaðarpolitikkinum fyri Tórshavnar kommunu er tað blivið lagt út í korti at náa einari samanseting av bústaðarsløgum áljóðandi 60% sethús, 20% íbúðir og 20% rað- og tvíhús innan 2030.
9 ár áðrenn framrokningina kunnu vit staðfesta, at vit meiri ella minni hava nátt hesum málinum við 59% sethúsum, 27% íbúðir og 14% rað- og tvíhús. Hetta vísir, at tað er sera ringt, sum kommuna, at planleggja hvussu tann veruligi bústaðarmarknaðurin kemur at síggja út. Tó kann kommunan gera sítt fyri at stýra planeggingini ávísar vegir, t.d. við at útleggja tey kommunalu grundstykkini til ávís endamál.

Í bústaðarpolitikkinum verður eisini víst á ein ójavnvág innan eigaraviðurskifti á bústøðum í kommununi. Í 2018 var tað einans 1% av tí samlaða bústaðarmarknaðinum, ið vóru bústaðir til leigu (her er einans tann skipaði leigumarknaðurin taldur við). Í dag sær myndin eitt sindur frægari út, fleiri leigubústaðir eru komnir til og prátið um lutaíbúðir er veruliga við at gera sína innrás.

Kanningar eru ikki gjørdar av tørvinum fyri lutaíbúðir, men umsitingin veit frá arbeiðinum við bústaðarpolitikkinum, og við útbjóðing av leigubústøðum (á Frúurøð og Undir kongavarða), at áhugi og tørvur er á lutaíbúðum.

Føroyar hevur fáar lutaíbúðir og harvið fáar royndir. Í Havn er eitt lutaíbúðafelag, ið er stovnað langt áðrenn lógin varð sett í gildi.
Bústaðir hevur fleiri ferðir tikið stig til at byggja lutaíbúðir í Tórshavn, men av ymiskum grundum er tað ikki blivið til nakað. Fyri tveimum árum síðan eydnaðist tað at byggja 8 lutaíbúðir Á Kneysum á Toftum. Hetta er á ein hátt ein søgulig hending, tí Lutaíbúðarfelagið Á Kneysum er fyrsta felagið, ið er stovnað sambært løgtingslógini um lutaíbúðarfeløg.

Í Vági er kommunan næstan liðug við byggingina av eini lutaíbúðarverkætlan. Enn hevur Vága kommuna ikki greitt frá, hvussu tað verður fíggjað ella hvør stendur fyri tí. Vit vita tó, at Bústaðir er partur av verkætlanini.

Í eini samrøðu við Pensjónsfelagið Lív, hava tey víst áhuga og eru ikki avvísandi fyri at fara inn í eina lutaíbúðarverkætlan. Tey vilja tó hoyra meira um, hvat kommunan ætlar, og síggja ítøkiligar leistir.

Leisturin, ið Bústaðir nýtir, er at Bústaðir mennir verkætlanina saman við arbeiðstakara og ráðgeva og selur lutaíbúðirnar til lutaíbúðarfelagið, tá alt er liðugt. Hetta hevur teir fyrimunir við sær, at Bústaðir kann fíggja í byggitíðarskeiðnum og taka byggiváðan uppá seg, so lutakeyparar vita, hvat teir fáa og til hvønn kostnað.

Ætlanin er í fyrsta umfari, at kommunan einans bjóðar øki út til bygging av lutaíbúðum og letur feløgini sjálvi skipa seg. Ynski er ikki, at kommunan luttekur í byggingini. Mett verður ikki, at tørvur er á at kommunan er við, hetta serliga grundað á stóra bústaðartørvin.

Í 2018 og 2019 fór Tórshavnar kommuna undir at bjóða út lendi til bygging av leigubústøðum í kommununi og tá vísti tað seg, at størsta avbjóðingin var fígging. Áhugavert verður at síggja um sama er galdandi innan bygging av lutaíbúðum, men verður mett, at tað er vert at geva tí eina roynd.

**Lýsing av málinum**
Ætlanin er at fara undir at bjóða tríggjar matriklar út til bygging av lutaíbúðum.
Talan er um matr. nr. 1355 og 1356 sí *kortskjal 1355 og 1356* við Villingadalsvegin, og part av matr. 645a, ið er øki á Frúutrøð í miðbýnum sí *kortskjal 645a.*

**Matrikul 1355 og 1356**
Matriklarnar 1355 og 1356 liggja báðir vestan fyri Villingadalsvegin. Atkoman til stykkini skal samskipast í mun til linjuføringina av framtíðar innkomuvegi.

Innkomuvegurin kemur at ganga partvís ígjøgnum matr. nr. 1355. Tryggjast skal, at byggingin hevur eina nøktandi frástøðu frá innkomuvegnum umframt at vegurin verður hugsaður inn í byggiverkætlanina, sum ein integreraður partur, ið ikki niðursetur trivnaðin í økinum.

Matriklarnir liggja í forleingilsi av einum hamara, sum ger at vatn frá hamaranum verður uppfangað í lendinum og ger lendið sera vátt. Tí skal regnvatnsuppsamling/-seinking somuleiðis blíva ein partur av einari møguligari byggiverkætlan, soleiðis at vatnið framhaldandi kann seyra vekk.

Hamarin gongur sum ein rond allan vegin suður-/vestureftir oman framvið Undir Fjalli og Miðhorn. Býarskipanarliga hevði tað verið upplagt at nýtt tøku matriklarnar framvið hamarinum til hægri bygging. Bæði tí at teir ikki taka útsýnið frá nøkrum, bygningarnir kunnu fáa útsýni yvir allan býin umframt at hamarin skapar lívd frá vesturættini.

Sum nú er liggja matriklarnir í A3 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Sum áður sagt, vildi tað verið upplagt at broytt byggisamtyktina fyri eitt størri øki suðureftir framvið hamaranum, við tí fyri eyga at gera ein rond av hægri bygging fram við øllum hamarum. Mest skynsamt er tí at broyta almennu byggisamtyktina til økisáseting A2, sum er ætlað høgari bústaðabygging. Ásetingar fyri A2 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

*§6, stk. 1. Loyvt er einans at byggja hús í fleiri hæddum til bústaðarendamál. Í sambandi við bygging skal tó bera til at gera rúm til felags nýtslu sum t.d. stovnar, vaskirúm o.a. fyri tey, ið har búgva*.

**Matrikul 645a**
Næsta økið, ið talan er um, er partur av matrikul 645a á Frúurtrøð í miðbýnum sí *kortskjal 645a.*

Matrikulin fevnir um økið á Frúutrøð, Revagarðarnar (Jóan Karls gøta og Í Lon) og ein part av Lützenstrøð. Neyðugt verður at skipa matrikuleringina á økinum, áðrenn verkætlanin verður boðin út.

Virksemi er á økinum í løtuni. Í gamla læknabygningi eru eindarleiðarar fyri kommununa og Hondbóltssamband Føroya og í gamla musikkskúla húsast Tórshavnar Býarsavn. Fyri einum ári síðan bleiv tað samtykt, at Tórshavnar Býarsavn skuldi flyta permanent inn í gamla musikkskúlan. Støða skal tí takast til, um lendið skal bjóðast tú við verandi bygningum og virksemi.

Fyri at verkætlanin skal kunna lata seg gera, skulu kloakkirnar og vatnleiðingarnar skiftast út á økinum. Verandi kloakkskipan er gomul og krevur ábøtur umframt at hon ikki er útgjørd til fleiri húsarhald. Ein skynsamur fíggingar háttur er at dagføringin av kloakkskipanini kann blíva fíggjað av søluni av lendinum.

Talan verður um eina býartætting og gagnnýtslu av verandi infrakervi, sum vit sambært Bústaðarpolitikkinum eisini leggja upp til at gera meiri av.

Í hesum sambandi skal havast í huga, at tá tosað verður um býartætting, kann ein av avleiðingum verða, at færri parkeringspláss verða í mun til áðrenn ein bygging/tætting fer fram. Um tað ikki verður gjørligt at nøkta parkeringstørvin við teimum verandi 41 almennu parkeringsplássunum umframt tey kravdu parkeringsplássini til lutaíbúðirnar, verður tað uppgáva hjá kommununi at varðveita/skipa verandi almennu parkeringsplássini á aðrari staðseting.
Býarskipanarliga hevði økið havt gott av at blivið skipað sum ein partur av eini størri heild. Lendi inni í býnum eru sera avmarkað og kostnaðarmikil. Kommunan eigur sjálv avmarkað lendi í verandi býi, men hesi eru ikki samanhangandi og liggja oftani upp at privatum lendi. Fyri at skapa ein burðardyggan tættleika í býnum, har leiðingar, undirstøðukervi, gerandis hentleikar o.a. longu eru á staðnum eigur at verða lagt upp til at tilboðsgevari inndregur aðrar matriklar í grannalagnum sum ein part av tí samlaðu verkætlanini.

Økið er áður blivið bjóðað út til bygging av bústøðum men hendan ætlanin bleiv slept aftur. Íleggjarar og vinnan vóru sera áhugaðir í økinum, men tá alt kom til alt bjóðaði eingin. Høvuðsorsøkin til hetta var, at tað blivu settar somikið nógvar treytir til byggingina, at verkætlanin nærum bleiv ógjørlig og ov viðkvom.
Økið liggur í einum frammanundan skipaðum øki við nógvari søgu. Tað hevur við sær at borgarar í býnum hava nógvar meiningar um økið og føla somuleiðis eina eigarakenslu til økið. Tí er týdningarmikið, at kommunan er sera neyv í mun til tær treytirnar ið verða settar til byggingina og allan vegin gjøgnum tilgongdina tekur borgarar við, bæði í mun til kunning og luttøku.

Ætlanin er at bjóða matr. 1355, 1356 og 645a út alment og øll, sum lúka ávísar treytir, kunnu koma við eini boðið, eini frágreiðing og einum skitsuuppskoti, soleiðis at fleiri fáa møguleikan at bjóða uppá lendini.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Viðmerkingar frá teknisku deild:

Kanningararbeiði skal gerast í mun til eina hóskandi atkomuloysn til matr. nr. 1355 og 1356. Framyvir verður mælt til at verkætlanir verða tillagaðar linjuføringina av innkomuvegnum.

**Skjøl**
21/04713-2 1355-1356
21/04713-2 645a
21/04713-18 Útbjóðingartilfar Frúutrøð
21/04713-19 Virðismeting - Frúutrøð 100 Tórshavn - matr.nr. 645a Tórshavn
21/04713-20 Virðismeting - matr.nr. 1355 Tórshavn 1356 Tórshavn (002)
21/04713-21 Útbjóðingartilfar Villingardalsvegur

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at heimila umsitingini at fara í holt við fyrireikandi kanningararbeiði, ið skal til fyri at kunna gera útbjóðingartilfar, fyri síðan at bjóða omanfyri nevndu matriklar út til bygging av lutaíbúðum, umframt at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at onnur staðseting verður funnin til býarsavnið.

**Fíggjarnevndin 24. november 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri viðmerking, at onnur staðseting skal finnast til øll, ið virka í økinum.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri, 3 blonkum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Birita B. Iversen, Annika Olsen, Rói B. Poulsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til útbjóðingartilfar fyri sølu av lendi til lutaíbúðarbygging á Frúutrøð og við Villingadalsvegin.

Samskiftið við grannar á Frúutrøð og Jónas Broncks gøtu eru ígongd og tí verður bíðað eitt sindur við at bjóða lendið á Frúutrøð út.

**Økið við Villingadalsvegin**
Matriklarnir liggja umleið 100 m frá verandi sethúsabygging, í einum náttúruvøkrum og friðarligum øki. Størsti parturin av samlaðu bústøðunum í kringumráðnum eru sethús, í form av eigarabústøðum. Umsitingin metir, at økið eisini eigur at rúma øðrum bústaðarsløgum og eigaraviðurskiftum, soleiðis at ein breiðari borgaraskarði kann búseta seg her.

Í høvuðsheitinum setir útbjóðingartilfarið treyt um;

- Byggilist. Byggingin skal ikki framstanda sum kassar við monotonum framsíðum og verður heitt á tilboðsgeva um at vísa eitt skikkað boð uppá eina bygging, ið er deild upp í smærri eindir. T.d. forskotnar framsíður. Byggingin skal avmynda sína samtíð í skapi og tilfarsvali, umframt at hon skal signalera bústaðarbygging, har trivnaður og byggilistarligu dygdirnar eru samantvinnað.
- Hæddir. Bygningarnir kunnu verða í mesta lagi fimm hæddir.
- Frí- og uppihaldsøkið skal verða í minsta lagi 10% av samlaðu víddini av økinum.
- Hvussu nógvar íbúðir talan verður um, veldst um hvussu økið er skipað í síni heild við atliti at fríøki og parkering, og harumframt skulu ásetingarnar um byggistig á 0,25 og nýtslustig á 0,8 verða fylgdar.
- Støddirnar á íbúðunum skulu verða ymsar, tó ikki minni enn 60 fermetrar.

Sí fylgiskjal *Útbjóðingartilfar Villingadalsvegur.*

Arbeiðið við tunnilsføringini av innkomuvegnum fer at byrja í næstum og meðan hetta arbeiðið er í gongd, verður partur av Villingadalsvegnum umlagdur eitt sindur inn yvir suður/eystara enda á matrikul 1355. Av tí sama má vinnarin av útbjóðingini tola, at arbeiðið á hesum parti av matriklinum ikki kann setast í gongd fyrr enn Villingadalsvegurin verður fluttur innaftur.

**Virðismeting av lendið**
Meklarafelagið Skyn hevur virðismett lendið, sum er til víddar 21.930 $m^2$, til 20. mió. kr. svarandi til 912 kr.$m^2$. Virðismetingin tekur millum annað útgangstøði í, at nøktandi vegur er til grundstykkini, og at møgulig bygging skal seljast víðari sum lutaíbúðir í fríari sølu til hægstbjóðandi. Meklarin metir, at ein íbúð hevur sama søluvirði, óansæð um talan er um lutaíbúð ella eigaraíbúð. Um keyparanum verða álagdar avmarkandi treytir í mun til víðarisølu, verður søluprísurin av lutaíbúðum lægri, og vildi virðið av lendinum tá eisini verið lægri, sí fylgiskjal *Virðismeting - matr.nr. 1355 Tórshavn 1356 Tórshavn (002).*

**Tilmæli:**
Kommunustjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni, tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at bjóða omanfyri nevnda økið, matr. nr. 1356 og matr. nr. 1355, við Villingadalsvegin út, umframt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Annika Olsen og Kári Johansen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytnigarupskot frá Elsu Berg: Mælt verður til at bjóða økið út, treytað av at umhvørvisárinsmeting verður gjørd við denti á at kanna, um mógvur er í økinum.

Broytingaruppskotið fall við átta akvøðum ímóti, fýra fyri og einari blankari atkvøðu.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Jóhan Petur Johannesen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam og Birgir Nielsen.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Jàkup Dam, Gunvør Balle og Annika Olsen.

Blankt atkvøddi: Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um uppskotið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari blankari atkvøðu.

Fyri akvøddu: Heðin Mortensen, Jóhan Petur Johannesen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Jákup Dam, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Elsa Berg.

## 37/22 Nýtt røktarheim og við røktaríbúðum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 02.10.2017 | 20/17 | 17/03196-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.10.2017 | 227/17 | 17/03196-1 |
| 3 Býráðsfundur | 26.10.2017 | 240/17 | 17/03196-1 |
| 4 Eldranevndin | 21.08.2018 | 4/18 | 17/03196-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 232/18 | 17/03196-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 16.01.2019 | 3/19 | 17/03196-1 |
| 7 Eldranevndin | 14.02.2019 | 20/19 | 17/03196-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 25.02.2019 | 50/19 | 17/03196-1 |
| 9 Býráðsfundur | 28.02.2019 | 35/19 | 17/03196-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.06.2019 | 110/19 | 17/03196-1 |
| 11 Fíggjarnevndin | 12.06.2019 | 165/19 | 17/03196-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 18.09.2019 | 232/19 | 17/03196-1 |
| 13 Byggi- og býarskipanarnevndin | 05.02.2020 | 35/20 | 17/03196-1 |
| 14 Eldranevndin | 06.02.2020 | 31/20 | 17/03196-1 |
| 15 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.09.2020 | 181/20 | 17/03196-1 |
| 16 Eldranevndin | 10.09.2020 | 12/20 | 17/03196-1 |
| 17 Fíggjarnevndin | 16.09.2020 | 213/20 | 17/03196-1 |
| 18 Eldranevndin | 15.09.2020 | 15/20 | 17/03196-1 |
| 19 Býráðsfundur | 24.09.2020 | 188/20 | 17/03196-1 |
| 20 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 146/21 | 17/03196-1 |
| 21 Heilsu- og eldranevndin | 14.09.2021 | 24/21 | 17/03196-1 |
| 22 Fíggjarnevndin | 22.09.2021 | 217/21 | 17/03196-1 |
| 23 Býráðsfundur | 30.09.2021 | 225/21 | 17/03196-1 |
| 24 Heilsu- og eldranevndin | 08.02.2022 | 3/22 | 17/03196-1 |
| 25 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 41/22 | 17/03196-1 |
| 26 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 37/22 | 17/03196-1 |

**Málslýsing:**
Víst verður til virkisætlan og tilmæli latin eldranevndini 11. september 2017 (j.nr. 17/00586), har tað m.a. verður mælt til at byggja nýtt røktarheim umfrant atknýttar røktaríbúðum í høvuðsstaðarøkinum. Tilmælið verður nærri útgreinað niðanfyri.

Í lógini um heimatænastu, eldraøkt v.m. frá 2014 er í grein 13 ásett, at kommunur kunnu seta á stovn bústaðir til fólkapensjónistar eftir hesi lóg. Bústaðir kunnu sbrt. stk. 2 fevna um 1) røktarheim, 2) eldrasambýli, 3) eldraíbúðir, 4) umlættingarpláss og 5) samdøgursendurvenjingarpláss.

Viðmerkingarnar til lógina útgreina ikki hesar bústaðarloysnir nærri, ella hvussu tær skulu koma til vega. Ásetingin er ásannandi breiða politiska ynskið um, at bústaðarmarknaðurin eisini til eldri verður meira

fjøltáttaður. Eftir stendur tó, at kommunur hava heimild og initiativ til at fáa til vega aðrar bústaðarloysnir enn røktarheim.

Tórshavnar kommuna hevur í dag 203 røktarbúpláss, harav eru 145 búpláss til røktarkrevjandi og 58 búpláss til fólk við demenssjúku. Harafturat eru 11 umlættingarpláss og 5 samdøgurs-rehabiliteringspláss.

Umleið 50 av teimum 145 búplássunum eru Ellisheim/sambýlispláss, sum eru roknað til lættari røktarkrevjandi umframt til onnur, sum eitt nú ikki kunnu búgva einsamøll.

Heilsu- og umsorganartænastan stendur fyri hesum búplássum, men hevur ikki onnur bústaðarsløg at bjóða.

Tá um hesi bústaðarsløg ræður, eins og í mun til onnur nýggj sløg, sum kommunan og heilsu- og umsorganartænastan í dag ikki kunnu bjóða, er týdningarmikið at hava greitt, hvat meint verður við, og til hvønn tørv hjá teimum eldru, ið loysnin er ætlað til. Hetta verður lýst nærri niðanfyri.

Búpláss:

- Búpláss til røktarkrevjandi á røktarheimi er ætlað eldri fólki, sum eru illa fyri, vanliga tí tey eru sjúk og tí hava tørv á at búgva á búplássi við røktarstarvsfólki um tey alt samdøgrið. Fast búpláss er síðsta loysnin, ið brúkt verður, sum fólk gerast verri fyri. Røktarheimini hýsa borgarum, sum krevja røkt og hjáveru alt samdøgrið.

- Ellisheimið og sambýlini hýsa borgarum, sum eru lættari røktarkrevjandi og/ella sum ikki kunnu búgva einsamøll. Tvs., at húsfólk á Ellisheiminum og sambýlinum eru betur fyri, tá tey flyta inn enn tey, sum flyta inn á røktarheim at búgva.

- Eisini demensbúpláss eru røktarbúpláss, har røktarstarvsfólk eru til staðar alt samdøgrið, men hesi búpláss eru á stovnum ella deildum, sum einans eru ætlað eldri fólki við demenssjúku. Fólk við demenssjúku hava aðrar avbjóðingar enn eldri fólk við øðrum røktarkrevjandi sjúkum, og tí tørvar teimum at sleppa á búpláss, sum serliga eru ætlað fólki við demenssjúku.

Íbúðir:
Við støði í lógarásetingini, sum nevnd er omanfyri, so eru eldraíbúðir eisini bústaðarloysn, ið kommunur kunnu stovna. Ymiskt kann leggjast í fatan av, hvat ein eldaríbúð er, tí talan er um felagsheiti fyri ymsar bústaðarloysnir.

Niðanfyri verður felagsheitið eldraíbúð brotið upp í tvær ymiskar bústaðarloysnir – røktaríbúð og eldravinarliga íbúðir. Hesar kunnu aftur býtast sundur alt eftir, hvørt talan eru leiguíbúð ella eigaraíbúð.

Felags fyri allar eldraíbúðir er tó, at tær skulu vera innrættaðar hóskandi við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og rúmligum baðirúmi, so tað er pláss fyri koyristóli og hjálparfólki. Íbúðirnar skulu ikki hava trappu til høvuðsinngond, og um íbúðin er ikki í veghædd, skal lyft vera til íbúðina.

Eitt annað, ið eisini er øðrvísi við eldraíbúðum í mun til búpláss á røktarheimi er, at í íbúðunum kunnu búgva hjún/sambúgvandi.

- Røktaríbúð vil vanliga vera næstsíðsti bústaðurin, áðrenn upptøku til fast røktarheimspláss. Hetta vilja vera borgarar, sum heimatænastan hevur veitt tænastur til, men har mett verður, at borgarin og evt. saman við makanum høvdu fingið betri umstøður við at flyta í røktaríbúð, har røktarstarvsfólk eisini er knýtt at alt samdøgrið. Málbólkurin vildi eisini verið borgarar, sum í dag vera visiteraðir til ellisheim/sambýli.

Røktaríbúðir kunnu við tí størsta fyrimuni byggjast saman við einum røktarheimi, har borgarin fær ágóða av øllum felagsfasilitetunum eitt nú venjingarumstøðum og trivnaðartilboðum annars. Eru røktaríbúðir knýttar at røktarheimi, verða tað starvsfólk á røktarheiminum, sum veita ta heimatænastu, ið borgarin annars vildi fingið sum heimabúgvandi. Hetta lættir sostatt um hjá heimatænastuni, men krevur ávísa tillaging av røktarnormeringini á heiminum.

Kommunan hevur heimild byggja og reka røktaríbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónina um hendi. Til ber tó eisini, at aðrir partar byggja og reka røktarleiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu hevur visitatiónsrætt til allar røktaríbúðirnar.

- Eldravinarliga íbúð er íbúð, sum er innrættað hóskandi sum omanfyri lýst við breiðum hurðum, ongum gáttum, egnum vesi og bað o.s.fr. Onnur krøv eru sum so ikki, og íbúðin kann eins væl nýtast av øðrum yngri borgarum.

  Eldravinarlig íbúð kann tí byggjast sum einstakar íbúðir í størri íbúðarbygningi ella sum eldraíbúðardepil, tvs. nógvar eldravinarligar íbúðir í sama kompleksi. Alt eftir, hvussu nógvar eldravinarligar íbúðir vildi verið í slíkum kompleksi, har tað eisini mest sannlíkt er ávíst tal av borgarum, sum hava tørv á heimatænatuni, kundi hølisumstøður til heimatænastu verið knýttar at staðnum.

  Kommunan hevur heimild at byggja og reka eldravinarligar íbúðir, har heilsu- og umsorganartænastan hevur visitatiónsrætt. Til ber tó eisini, at aðrir partar, t.d. Bústaðir ella íleggjarar, byggja og reka eldravinarliga leiguíbúðirnar, og har kommunan gjøgnum avtalu eisini hevur visitatiónsrætt til nakrar ella allar teirra.

  Har tað í mun til røktaríbúðir vilja verða borgarar, sum frammanundan fáa heimatænastu og aðrar tænastur frá heilsu- og umsorganartænastuni, ið verða visiterað til røktaríbúð, so nýtist ikki sama at verða galdandi fyri eldravinarligu íbúðirnar. Talið av pensjónistum økist í stórum, og nógv av hesum eru vegna góða heilsustøðu als ikki í skipanini hjá heilsu- og umsorganartænastuni.

  Skal heilsu- og umsorganartænastan visiterað til eldravinarligar íbúðir, má gerast ein skipan, har ávís metingarkriteriu eru ásett, eisini fyri at ikki at hava fleiri bíðilistar til somu íbúðir (at fólk skriva seg upp bæði hjá kommununi og t.d. Bústøðum).

Út frá omanfyri standandi verður mett skilabest í mun til tey bútilboð, ið heilsu- og umsorganartænastan skal veita, at røktaríbúðir og røktarheim verða bygd í somu bygging ella beint upp at.

Røktaríbúðir er í føroyskum samanhangi nýtt konsept, ið skal mennast, eitt nú í mun til samstarv við aðrar áhugapartar – eitt nú Bústaðir, byggivinnuna, fíggjarstovnar v.m. Røktaríbúðirnar, hóast bygdar saman við ella upp at einum røktarheimi, eru leiguíbúðir, og kunnu tí byggjast og umsitast við støði í tí, men har kommunan tryggjar sær fullan visitatiónsrætt.

Júst hvussu hetta kann gerast ella hvørjir samstarvshættir eru møguligir, eigur henda verkætlanartilgongdin at koma til niðurstøðu um.

Í virkisætlanini er víst á ein endurnýggjanartørv, tvs. antin dagføra ella niðurleggja verandi ótíðarhóskandi pláss. Víst er eitt nú á Ellisheimið, sum krevur umfevnandi dagføringar, ið illa loysa seg fíggjarliga. Verkætlanartilgongdin eigur eisini at fyrihalda seg til henda spurning m.a. við atliti at, hvussu hesi 27 búplássini kunnu endurnýggjast møguliga sum eitt lutfall millum føst røktarbúpláss og røktaríbúðir aftrat tí tørvi, sum røktarheimið annars skal røkka.

Í sambandi við bygging av nýggjum røktarheimi skal vælferðartøkni og sníldtøkni (samskiftisútgerð, trygdar- og ávaringarskipanir) integrerast.

Til tess at seta hol á bygging av nýtt røktarheim, verður mett skilabest at seta bygginevnd við støði í mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur tveir nevndarlimir og borgarstjórin tilnevndi eitt umboð fyri ávikavist teknisku fyrisiting, miðfyrisitingin og trivnaðarfyrisitingina.

Bygginevndin skal sum tað fyrsta útvega byggiskrá og definera bygginina nærri í mun til støddir, luftfall røktarbúpláss, harundir eisini demensbúpláss, og røktaríbúðir, eins og at bygginevndin saman við politisku skipanini annars mennir ein samstarvsshátt við aðrar áhugapartar í sambandi við bygging og umsiting av røktaríbúðum.

Til endamálið er neyðugt við játtan til fyrireikingar, ráðgeving v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at seta bygginevnd til sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi játta kr. 1 mió til fyrireikingar, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.

**Eldranevndin 02. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. oktober 2017:**
Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. oktober 2017:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini og at velja Bjørghild Djurhuus og Bergunn Kass í bygginevndina.

**Ískoyti:**
26 okt. 2017 samtykti býráðið at seta bygginevnd sum tað fyrsta at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum, og í hesum sambandi at játta kr. 1. mió til fyrireiking, ráðgeving v.m. av tøkum løgukarmi konta 2775 eldrarøkt.
Bygginevnd bleiv sett fyrst í hesum árinum og hevur havt tveir fundir. Bygginevndin metir, at arbeiðssetningurin er ikki nóg neyvur og ynskir tí at fáa ein greiðari arbeiðssetning, áðrenn nevndin kann fara víðari við arbeiðinum. Serliga verður hugsað um at fáa nágreinað, hvussu nógv húsfólk røktarheimið skal byggjast til.

Sambært nýggjastu framrokningunum hjá Hagstovuni verður mett, at tað vera 1.124 fólk eldri enn 80+ ár í Tórshavnar kommunu í 2025. Í 2018 er hetta tal 811 fólk. Fyri at nøkta vaksandi tørvin á røktarheimsplássum til ta tíð, er neyðugt at økja um búplássini.

Umframt at byggja til vaksandi tørv á búplássum, er – sum lýst í virkisætlanini (j.nr. 17/00586) og málslýsingini frammanfyri- ætlanin, at nýggja røktarheimsbyggingin skal vera við til at endurnýggja verandi pláss, sum eru ótíðarhóskandi, fyrst og fremst Ellisheimið.

Sum kunnugt verður umbyggingin av Tjarnargarði í løtuni projekterað, har pláss verður fyri 7 nýggjum umlættingarplássum til fólk við demenssjúku – arbeiðið verður eftir ætlan boðið út um stutta tíð. Harafturat verður umlættingar- og rehabiliteringsdepil við 28 plássum fyrireikaður. Tá hesar ætlanir eru komnar á mál, verða 9 av verandi plássum umløgd til føst búpláss.

Umframt omanfyri nevndu átøk, so verður mett neyðugt, at nýggja røktarheimið hevur 48 búpláss, t.e. tríggjar deildir við 16 húsfólkum á hvørjari deild eins og Lágargarður, umframt 8 røktaríbúðir. Hetta gevur

í alt 56 pláss. Av hesum 56 plássum er ætlanin, at 25 av hesum er endurnýggjan av plássunum á Ellisheiminum, ið soleiðis kann niðurleggjast sum ellisheim.

Hesar ætlarnir tilsamans geva í 2025 eitt dekningsstig á 26,5% , sí talvu niðanfyri, og sum er eitt vet hægri enn dekningsstigið í dag.

| TÓRSHAVNAR KOMMUNA | Ár 2000 | Ár 2010 | Ár 2019 | Ár 2020 | Ár 2025 | Ár 2030 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkatal, 80+ ár | 457 | 669 | 850 | 906 | 1.124 | 1.415 |

**Pláss/Fólkatal 80+ ár (dekningsstig)**

| | Ár 2000 | | Ár 2010 | | Ár 2019 | | Ár 2020 | | Ár 2025 | | Ár 2030 | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Pláss/Dekningsstig** | **97** | **21,2%** | **155** | **23,2%** | **222** | **26,1%** | **251** | **27,7%** | **298** | **26,5%** | **298** | **21,1%** |
| *har av røktarbúpláss* | *87* | *19,0%* | *145* | *21,7%* | *204* | *24,0%* | *213* | *23,5%* | *252* | *22,4%* | *252* | *17,8%* |
| *har av stutttíðarpláss* | *10* | *2,2%* | *10* | *1,5%* | *18* | *2,1%* | *38* | *4,2%* | *38* | *3,4%* | *38* | *2,7%* |
| *har av røktaríbúðir* | *0* | *0,0%* | *0* | *0,0%* | *0* | *0,0%* | *0* | *0,0%* | *8* | *0,7%* | *8* | *0,6%* |

**Fólkatalsframrokning 80+ ár pr. 06.06.2018, hagstovan.fo*

**íroknað nýggjum Umlættingar- og rehabiliteringsdepli og útbyggingini av Tjarnargarði til demensdepil*

*Nýtt røktarheimi + endurnýggja plássini á Ellis-heiminum.*
*(+) 48 (-) 25 = 23 nýggj*
*(+) røktaríbúðir = 8 stk.*
*(+) eina lon afturat á 16 stk.*

Eitt nýtt røktarheim við 48 búplássum og 8 røktaríbúðum verður mett at vera skilagóð støðd, eisini sum rakstrareind. Búeindir á 16, sum ofta verður koyrt í 2, tvs. 8 og 8 á somu eind er eisini skilagóð støðd í mun til at fólk búgva saman.

Mett verður harafturat skilabest, at staðseting og byggingin er soleiðis háttað, at til ber at byggja røktarheimið út seinni.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og eindarleiðararnir í H og U mæla til at samtykkja fylgjandi arbeiðssetning fyri ætlanina:

At fáa til vega byggiskrá fyri bygging av nýggjum røktarheimi við 48 búplássum og 8 atknýttum røktaríbúðum, at staðsetingin og byggingin kann skipast soleiðis at tað lættliga ber til at útbyggja røktarheimið við einari ella tveimum deildum eftir tørvi.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og staðsetingina í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at mæla býráðnum til at broyta byggiskránna fyri bygging av nýggjum røktarheimi til at fevna um 64 búpláss og 16 røktaríbúðir og at beina málið í býráðið umvegis byggi- og býarskipanarnevndina viðvíkjandi staðseting.

**Ískoyti:**
Í sambandi við byggiverkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður mett, at tørvur er á einum bygningi samsvarandi 6600 m$^2$ í byggistigi. Her er sum heild talan um ein bygning í tveimum hæddum, sum tó verður tilevnaður eftir tørvi og ynskjum, sniðgeving, innrætting og ikki minst hvussu bygningurin verður staðsettur í landslagnum. Tørvur er tískil á einum øki á í minsta lagi 11.000 m$^2$. Og verður hugsað um møguligar framtíðar útbyggingar, er talan um eitt samsvarandi størri øki.

Umsitingin hevur umrøtt spurningin um øki til eitt nýtt røktarheim við røktaríbúðum í tráð við býarplanleggingina, og vísir umsitingin á eitt øki úti í Marknagili í Tórshavn, sí kortskjalið “*Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort*”.

Um hugt verður eftir Marknagili sum býarparti, so er økið nógv broytt seinastu tíðina við stórum byggiverkætlanum, sum somuleiðis skapa nógv virksemi í økinum. Sambært kommunuætlanini er Marknagil ein býarpartsdepil, har býarvøkstur verður skipaður við at miðsavna ymiskt virksemi á einum stað. Í býarpartsdeplinum skal fram um alt vera virksemi sum handlar við gerandisvørum, stovnar, skúlar, útbúgving, býlingshús og mentanarligt virksemi.

Økið, sum umsitingin vísir á, er partur av ávegis heildarætlanini fyri økið við og omanfyri býlingin undir Fjalli. Skipanaruppskotið í heildarætlanini fevnir um infrakervi, bústaðarbygging og almennar stovnar, og er økið millum Dánjalstrøð og íbúðarbyggingina MARK lagt út til stovnsbygging. Eitt ellisheim hóskar væl inn í býarskipanina í økinum, og hóast økið liggur upp at einum høvuðsvegi, so verður bygt burtur frá ferðsluni í sera náttúruvøkrum umhvørvi, har byggingin somuleiðis tekur atlit til verandi lendið.

Í sambandi við skipanaruppskotið skal infrakervið í økinum víðkast. Dánjalstrøð gerst høvuðsvegur til nýggja útstykking, og í sambandi við eitt nýtt ellisheim er neyðugt at gera fyrsta strekkið av vegnum, sum er áleið 220 metrar. Ein yvirskipaður kostnaður er kr. 25.000 + mvg pr./m.

Økið er partur av Húsahaga, matr. 1160a, umframt matriklunum 1172a og 1176. Eitt hóskandi øki skal frámatrikulerast til endamálið, og er neyðugt við eini marknaumskipan, sum verður send Umhvørvisstovuni til avgreiðslu.

Økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum eru øki ætlað til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál, umframt stórum almennum stovnum til umsiting, skúlaskap og heilsurøkt. Neyðugt er sostatt at broyta almennu byggisamtyktini til endamálið, umframt at serstøk byggisamtykt skal gerast fyri nýggju útstykkingina.

**Onnur mál, ið hava týdning fyri málið:**
Skipan av økinum oman fyri Marknagilsvegin og undir Fjalli, journal nr. 18/01811.

**Skjøl:**
Nýtt røktarheim við røktaríbúðum_kort, journal nr. 17/03196-15

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til prinsipielt at góðkenna staðsetingina, at umsitingin arbeiðir víðari við staðsetingini og myndugleikaviðgerð, at beina málið í eldranevndina til kunningar.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 16. januar 2019:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Bjørg Dam, mælir til at finna aðra staðseting nærri sjónum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um málið.

**Eldranevndin 14. februar 2019:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2019:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í Byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. februar 2019:** Atkvøtt varð um uppskot frá borgarstjóranum um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, einari ímóti og ongari blankari.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Odd Færø og Bjørg Dam.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Í sambandi við ætlanina at staðseta nýtt røktarheim og gera nýggja vegaføring úti í Marknagili, hevur eigarafelagið á Dánjalstrøð sent kommununi mótmæli, har sjónarmiðini í høvuðsheitum eru:

- at neyðugt er at broyta byggisamtyktina til endamálið, tí økið liggur í økispartunum D1 og D3 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu. Í hesum sambandi verður harðliga mælt ímóti, at býráðið ætlar at strika økið sum D1 øki, tí tey seinastu 30 árini hava tey innrættað seg eftir, at økið er lagt út til almenning, náttúrufriðingar- og mentanar endamál.
- at eigarafelagið í áravís hevur mótmælt, at ein av mest trafikeraðu vegum í landinum verður lagdur 2-3 metrar frá sethúsabygginini á trøðni. At leggja ein somikið trafikeraðan veg á hetta D1 økið er so langt burtur frá hesum endamáli, sum til ber at hugsa sær, sí annars mótmælið.

Yvirskipaða ætlanin fyri økið undir Fjalli er samtykt, og verður mett, at staðsetingin til eitt nýtt røktarheim hóskar seg væl í hesum náttúruvakra økinum. Tá tosað verður um býarskipan, typologi og staðsetingar av hesum, verður í dag stórur dentur lagdur á at staðseta heim til eldri í einum nærumhvørvi við nógvum aktiviteti. Her verður serliga hugsað um dagstovnar, skúlar, handil við gerandisvørum eins og bústaðir. Ynski hevur verið frammi um at staðseta eitt røktarheim nærri sjónum, har dentur verður lagdur á eina hugsan um friðsælu. Í veruleikanum verður eitt heim nærri sjónum meiri avbyrgt, bæði í mun til ta fysisku planleggingina og nærveruna í sambandi við gerandislívið. Granskað hevur somuleiðis verið í einsemi hjá búfólki, og vísir granskingin, at nærveran við onnur menniskju hevur sera stóran týdning.

Talan er framvegis um eitt D1 øki, sum framhaldandi verður fríøki, fyri uttan tað økið, sum verður lagt av til sjálvt røktarheimið. Økið, har røktarheimið verður staðsett, verður í tilgongdini broytt til ásetingina D3, sum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er lagt av til miðstaendamál, umframt skúlar, almennar stovnar og íbúðir.

Arbeitt hevur verið við nýggju vegaføringini, sum er ein liður í eini størri ætlan fyri infrakervið kring Havnina. Leingi hevur ligið í kortunum og tað er somuleiðis av stórum týdningi og neyðugt, at eitt vegasamband millum komandi innkomuveg og Marknagil verður gjørt gjøgnum hetta grøna økið. Her er talan um ein kommunalan veg, og er ætlanin, at niðasti parturin av vegnum verður fyrsta stigið í ætlanini, sum somuleiðis verður atkomuvegur til nýggja røktarheimið. Vegurin verður í størst møguligan mun fluttur yvir ímóti grøna økinum fyri at skapa rúm ímillum veg og verandi bygging, og verða harumframt báðar áirnar varðveittar, sum tær eru í dag. Eftir ætlan leggur vegurin seg niður í lendið, og kemur hann soleiðis ikki at ávirka røktarheimið nakað serligt, umframt at tað verður møguligt at planta á økinum millum veg og útstykkingina, sum eigarafelagið umboðar.

Fyri røktarheims verkætlanina er tað av stórum týdningi, at staðsetingin fyri røktarheimið verður staðfest og samtykt, soleiðis at fyrireikingararbeiðið kann halda áfram. Somuleiðis skal kunnast um, at verður neyðugt at finna aðra staðseting og um hetta dregur út, so kemur hetta at ávirka upprunaligu tíðarætlanina fyri bygging av røktarheiminum. Mælt verður tískil til, at støða verður tikin til um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið.

**Skjøl:**
Eigarafelagið á Dánjalstrøð - mótmæli, journal nr. 17/03196-24.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og virkandi leiðarin á býarskipanardeildini mæla til, at nevndin tekur støðu til, um ynski er at halda fast í staðsetingini úti í Marknagili ella um onnur staðseting skal finnast til røktarheimið, og um verandi staðseting verður samtykt at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. juni 2019:** Samtykt at halda fast við verandi staðseting og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 12. juni 2019:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 18. september 2019:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, beinir málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina við atliti til at viðgera staðseting og vegatkomu.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt nýtt uppskot til staðseting av byggingini, soleiðis at byggingin verður flutt út í D3 øki, sum í mun til byggisamtyktina er lagt út til almennar stovnar.
Staðsetingin er tillagað vegaprosjekt, sum fyriliggja sum fyribils ætlanir. Tillagingar kunnu koma fyri, og má roknast við at tað verða tillagingar í mun til endaliga verkætlan.
Byggjast skulu uml. 6600 fermetrar, og er tørvur á einum byggiøki á 11000 fermetrar.
Íbindingarvegurin verður umskipaður, og vegaprosjekt skal gerast ísv. fyrireikingar av Røktarheiminum, soleiðis at linjuføringin er so skynsom sum til ber.

**Skjøl:**
17-031196-29 uppskot til staðseting januar 2020

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á býarskipanardeildini mæla til:
- at tikið verður undir við uppskotinum til staðseting í D3 økinum
- at skipanaruppskot verður gjørt fyri økið,við vegalinjum og byggiøkjum.
- at farið verður undir lýsa hvussu vit skulu byggja røktarheim í framtíðini.
- at ein byggiskrá til nýtt røktarheim við røktaríbúðum verður gjørd.
- at upp til kr. 700.000 verða játtaðar til omanfyri nevnda arbeiði.

Umframt at beina málið í eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 05. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Eldranevndin 06. februar 2020:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Hugt hevur verið eftir nýggjum staðsetingum til at byggja nýtt røktarheim og røktaríbúðir í Tórshavn, Hoyvík og Argjum. Tørvur er á einum øki á uml. 20.000 $m^2$ til at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Harafturat skal øki leggjast av til møguliga víðkan/útbygging av røktarheiminum og møguliga fleiri røktaríbúðum. Enn er óvist hvussu stórur tørvurin er á til víðkan/útbygging, men skal hetta nágreinast nærri í tilgongdini.

Høvuðsstaðurin er vaksin nógv, og torført er at finna hóskandi stór økir til endamálið. Neyðugt er tí at hyggja eftir økjum í útjaðaranum á býnum, sum eru partur av býartættingini og býarvakstrarøkjum, umframt teimum møguleikum, sum liggja inni í býnum.

Økið við Stórutjørn er sambært Kommunuætlanini fyrsta býarvakstrarøki, sum skal skipast til ein nýggjan býling í Tórshavn. Hoyvíkin er vaksin nógv seinastu árini, og við mongu íbúgvunum hevði eisini verið hóskandi at bygt eitt nýtt røktarheim í Hoyvík, tí einki er í økinum í dag. Kirkjugarður er skipaður í økinum, og við teimum alsamt fleiri vaksandi hentleikunum, hevði eisini ligið væl fyri at skipað bústaðir til eldru borgararnar í økinum.

Arkitektakapping var í vár um skipan av Stórutjørn, og skal endaliga skipanin og projekteringin setast í verk so skjótt játtan er tøk til hetta. Tá arbeiðið verður raðfest, eigur eitt hóskandi øki at verða sett av til nýtt røktarheim við  røktaríbúðum.

Skjal nr. 17/03196-33 lýsir Stórutjørn og hvat krevst fyri at fara inn á økið við einum røktarheimi.

**Skjøl:**
Staðseting_Stóratjørn, journal nr. 17/03196-33

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, Heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til, at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum við Stórutjørn, at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum og møguligum tilhoyrandi útbyggingum, og beina málið í býráðið umvegis eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. september 2020:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Bogi Andreasen og Helena Dam á Neystabø, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt.

**Eldranevndin 10. september 2020:** Útsett.

**Eldranevndin 15. september 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina og býráðið

**Fíggjarnevndin 16. september 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Bergun Kass, tekur undir við Eldranevndini og meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen, mælir til at finna aðra hóskandi staðseting nærri miðøkinum.

**Býráðsfundur 24. september 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið hjá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið vaðr einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Verkætlanin at skipa økið á Stórutjørn er farin av bakkastokki, men er talan um ein longri tíðarkarm, áðrenn nøkur ítøkilig ætlan kann skipast á økinum. Fyri at koma í gongd við verkætlanina at byggja nýtt røktarheim við røktaríbúðum er neyðugt at finna endaligu staðsetingina, og tí hevur verið hugt eftir møguligum øðrum staðsetingum til verkætlanina.

Økið eystan fyri Dalin Langa í Hoyvík varð í kommunuætlanini frá 2014 lagt út sum møguligt býarvakstrarøki í Hoyvík. Økið, sum verður nevnt Stórabrekka, liggur á eini høvd oman fyri vinnuøkið við Vegin Langa í 100 m hædd við stórslignum útsýni móti norðuri, eystri og suðri. Økið er óslætt heyggjalendi og liggur somuleiðis út til Dalin Langa, sum er eitt rekreativt øki við gongu/súkklubreyt og uppihaldsøki við Myllutjørn. Henda staðsetingin hevur áður verið nevnd í sambandi við at byggja nýtt røktarheim, men gjørdist hetta ikki aktuelt, tí ynski var at byggja bústaðir á Stórubrekku. Henda ætlanin er nú slept, og verður tí mælt til at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á Stórubrekku.

Á Stórubrekku eru umleið 35.000 $m^2$ av lendi, sum byggjast kann á. Tørvur er á einum stórum øki til verkætlanina, umframt at øki skal leggjast av til møguliga víðkan. Stórabrekka liggur innan fyri Klingruna, og er tí longu ein partur av bygda økinum, mótsett Stórutjørn sum fer at liggja sum byggiøki í eitt tíðarskeið, meðan bygt verður. Økið er stórt, og eru góðir møguleikar at byggja lutvíst í einari hædd, sum ynski er um, og at víðka um bygginginina seinni, um tørvur er á tí.

Økið liggur millum Dalin Langa og stóra vinnuøkið, sum hevur grivið seg inn undir landslagið. Hetta inntriv, sum er gjørt í lendið í vinnuøkinum, er sera ógvusligt og eirindaleyst sprongt burtur, fyri at fáa fleiri fermetrar til goymslur v.m. Ein trygdargeiri áljóðandi 30 metrar er lagdur parallelt við kantin, og kann ikki byggjast á hesum strekkinum, men kann hetta teljast við í byggistigið.

Vegasamband er frá Klingruni, og lætt er at skipa gøtur og fríøki í økinum, sum kunnu gerast partur av gøtukervinum til Dalin Langa og grøna nærumhvørvið. Góður sólargangur og gott útsýni er til allar síður frá Stórubrekku, tí økið liggur høgt og skránar til allar síður. Lívd er ikki nógv av í verandi støðu, men við skilagóðari skipan av bygging, fríøki, vøkstri, parkering og atkomum við gøtusambondum, kann lívd fáast til uppihald og gróðursett øki.

Stórabrekka liggur sum framhald av rehabiliterings- og umlættingardeplinum URD, og kann eitt nýtt røktarheim samvirka við stovnin og uttanumøki, sum somuleiðis verður lýst í ritgerðini “Eitt evidensgrundað designuppskot fyri Dalin Langa, Hoyvík, við denti á endurvenjing og at skapa sálarliga heilsubót fyri brúkararnar á umlættingar- og rehabiliteringsdeplinum URD”. Í stuttum fevnir uppskotið um sambandi millum endurvenjing og ágóðan av at vera í náttúruni sæð út frá einum sjónarmiði at menniskju liva alsamt longri.

Økið, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu, er fevnt av umráðispartinum A3 í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er lagt til blandaða bústaða- og miðstaðarbygging. Eitt nýtt røktarheim rúmast ikki innanfyri ásetingarnar, og er neyðugt at broyta almennu byggisamtyktina til umráðispart D3, sum verða kannaðir stórum almennum stovnum fyri umsiting, skúlaskap, heilsurøkt og tílíkt. Útstykking innan fyri umráðispartarnar D2 og D3 verður einans loyvd eftir serstakari byggisamtykt, og skal nýggj serstøk byggisamtykt tí gerast sambært ásetingunum í almennu byggisamtyktini. Økið á Stórubrekku er partur av matr. nr. 138a, og skal eitt hóskandi øki tí sundurbýtast til endamálið.

Skjøl:
- Stórabrekka - Staðseting (kortskjal), journal nr. 17/03196-34.
- Eitt evidensgrundað designuppskot fyri Dalin Langa, Hoyvík, við denti á endurvenjing og at skapa sálarliga heilsubót fyri brúkararnar á umlættingar- og rehabiliteringsdeplinum URD, journal nr. 17/03196-33.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og býararkitekturin mæla til:
- at staðseta nýtt røktarheim við røktaríbúðum á økinum á Stórubrekku
- at broyta almennu byggisamtyktina og gera nýggja serstaka byggisamtykt
- at bygginevndin arbeiðir víðari við at nágreina tørvin á røktarheiminum
- og beina málið í býráðið umvegis heilsu- og eldranevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Kristianna Winther Poulsen og Ruth Vang, samtykti at taka undir við staðsetingini av røktarheiminum og røktaríbúðunum á Stórubrekku í Hoyvík og beina málið í býráðið umvegis heilsu- og eldranevndina og fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Ískoyti**:
Framtíðar røktarheimsbygging – námsferð.

Býráðið hevur samtykt at byggja nýtt røktarheim við 64 búplássum og 16 atknýttum røktaríbúðum.

Fyrireikandi arbeiðið er farið í gongd. Hetta er stór verkætlan, og sum støðan er við vaksandi tali av eldri borgarum og minkandi arbeiðsmegi, er neyðugt at hugsa nýtt, tá bygt verður. Neyðugt er at tryggja, at eitt nýtt røktarheim er soleiðis bygt og útgjørt at tað í størst møguligan mun tekur atlit til hesa avbjóðing. Í hesum sambandi er neyðugt at eisini vælferðartøknin er hugsað inn í loysnirnar á heiminum.

Ráðstevna um fremtidens boligbyggeri verður í Keypmannahavn 17.-18. november 2021.

https://nohrcon.dk/produkt/temauge-om-byggeri-og-indretning-af-pleje-og-seniorboliger-2021/kobenhavn-2021-11-16/

Tað er Nohrcon www.nohrcon.dk sum skipar fyri ráðstevnuni. Skráin fyri dagarnar er viðfest. Prísur og avsláttur framgongur av heimasíðuni.

Ætlanin er at bygginevndin og eldranevndin saman við viðkomandi fólki frá umsitingini fara til hesa ráðstevnu at kunna seg um og fáa inspiratión til bygging av nýggjum røktarheimi og røktaríbúðum.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og fulltrúi í heilsu- og umsorganarfyrisitingini mæla til at heilsu- og eldranevndin umframt Ruth Vang, limur í bygginevndini fara á ráðstevnu í Keypmannahavn um fremtidens plejehjemsbyggeri og leggja málið fyri fíggjarnevndina til samtyktar.

**Heilsu- og eldranevndin 14. september 2021:** Ein meiriluti, Kristianna Winther Poulsen, Súna Mørk, Kári Johansen og Birgir Nielsen, tekur undir við byggi- og býarskipanarnevndini um staðseting.

Ein minniluti, Elsa Berg, atkvøður blankt.

Nevndin tekur eisini undir við tilmælinum um at heilsu- og eldranevndin umframt Ruth Vang, limur í bygginevndini fara á ráðstevnu í Keypmannahavn um fremtidens plejehjemsbyggeri og beinir málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. september 2021:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini og meirilutanum í Heilsu- og eldranevndini.

**Býráðsfundur 30. september 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið er byrjað at útvega byggiskrá til bygging av nýggjum røktarheimi og atknýttum røktaríbúðum. Býarskipanardeildin hjá Tórshavnar kommunu stendur fyri hesum arbeiðinum at gera byggiskránna.

Byggiskráin verður eftir ætlan liðug í medio 2022. Og verkætlanin skal eftir ætlan bjóðast út hareftir - ultimo 2022. Bygginevndin hevur tikið støðu til at bjóða arbeiðstøkuna út í høvuðsarbeiðstøku. Grundgevingin er í høvuðsheitum, at verkætlanin er sera stór í vavi. Tað er avbjóðandi at byggja bæði røktarheim og eisini íbúðir í einum samlaðum prosjekti. Ætlanin er at bjóða ráðgevaraarbeiðið út skjótast til ber. Bygginevndin metir, at tað er lættari og betri at tillaga prosjektið sum longst í eini tilgongd saman við vinnandi ráðgevaratoymi - til tess at fáa eina so góða verkætlan sum gjørligt.

Ynski er eisini at leggja dent á vælferðatøkni sum heild í røkt í Tórshavnar kommunu. Vælferðatøkni er nógv frammi í verkætlanum í Norðurlondum. Umsitingin er í gongd at gera fáa lýst krøv til vælferðatøkni í byggiskránni, soleiðis at hetta verður knýtt í hesa verkætlan.

Fígging:
Samanlagt eru 10 mió tøkar av løgukarmi konto 2775 eldrarøkt til uppstart, forkanningar, ráðgeving, fyrireiking til útbjóðing av verkætlanini.

- Játtaðar eru 4 mió. av karminum fyri 2021
- Játtaðar eru 6 mió. av karminum fyri 2022

**Tilmæli:**

Bygginevndin, heilsu- og umsorganarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og leiðarin á bygningsdeildini mæla til:

- At játta kr. 4 mió. av karminum fyri 2021, konto 2775, LK27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum
- At játta kr. 6 mió. av karminum fyri 2022, konto 2775, LK27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum
- Flyta peningin áljóðandi samanlagt 10 mió. á konto 2775 eldrarøkt(íløgur), L27012, Nýtt røktarheim við røktaríbúðum.
- Geva umsitingini heimild at bjóða verkætlanina út eftir leisti og útbjóðingarhátti, sum bygginevndin mælir til.
- Geva umsitingini heimild at fara undir sáttmálasamráðingar við vinnandi ráðgevarafyritøku.

  Beina málið í Býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Heilsu- og eldranevndin 08. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við teirri broyting, at støða verður tikin til leist og útbjóðingarhátt, tá ið byggiskráin er liðug.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 38/22 Grasagarður - Spælipláss 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.09.2021 | 145/21 | 21/03668-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 06.10.2021 | 240/21 | 21/03668-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 201/21 | 21/03668-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 17.11.2021 | 292/21 | 21/03668-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.11.2021 | 298/21 | 21/03668-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.02.2022 | 51/22 | 21/03668-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 23.02.2022 | 61/22 | 21/03668-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 38/22 | 21/03668-1 |

**Upprunin til málið:**
Politiskt ynski er at dagføra spæliplássið í Grasagarði.

**Lýsing av málinum:**
Grasagarður, millum Steinatún og Kongagøtu, varð í 2015 innrættað til eitt "klassiskt" spæliøki við spælitólum í miðbýnum. Økið er uml. 2.000 m$^2$ til víddar og fevnir um partar av matriklunum 335, 337 og 338. Umframt spælipláss eru skúlatannlæknastovan og Tilhaldið, sum er savningarstaður hjá teimum eldru í býnum, á matriklunum.

Økið var fyrr tveir vakrir urtagarðar við høgum grótlaðaðum grótgørðum uttanum, men seinni árini eru garðarnir lagdir saman, gøtur skipaðar og grótgarðar lækkaðir. Áðrenn spælipláss varð skipað á økinum, hýsti Grasagarður barnafagnaði, brúðarvígslum, topp-popp konsertum og hátíðarhaldið fyri pisum á Føroya Handilsskúla var eisini vorðin ein fastur táttur. Harumframt var Grasagarður brúktur til ótálmaðan drykkjuskap, grafitti máling og hissini sproytur. Ofta ótespiligt aftaná vikuskiftir, men í dag hevur Grasagarður fingið nýtt andlit og verður nýttur til spæl, uppihald og gjøgnumgongd.

Á økinum eru stór og gomul vøkur trø, mest ahorn, umframt runnar av ymiskum slag, blómur og staudir. Í miðbýnum er av bestu vakstrarmøguleikum og hartil veðurgott, sum er við til at skapa ein fjálgan hugna á staðnum.

Standurin í Grasagarði
Samtykt varð í 2015 at skipa grasplenurnar í Grasagarði til spæliøki hjá børnum. Flag og mold varð gravað av teimum stóru grasplenunum, økið varð drenað og bygt uppaftur við stabilum tilfari, og gummifallundirlag varð lagt á. Skráar á grasplenu vórðu skipaðir við timbursititrappu. Arbeiðið varð boðið út sum heildararbeiðstøka, ið fevndi um jørð- og timburarbeiði, dren- og vatnavveiting, útvegan og uppseting av ljósútgerð og spæliútgerð (klatrinet, trampolinir v.m.) og fallundirlag. Neyðugt var við umfatandi drenings- og lendisarbeiði, og varð tað mesta av fíggingini nýtt til hetta arbeiðið. Úrslitið varð, at fíggingin til spæliútgerðina varð skerd, og gjørdist úrvalið av spæliútgerðini tí einfaldari enn ætlað.

Spæliplássið er nógv vitjað seinastu árini, og sær spæliútgerðin út til at vera í góðum standi uttan at hetta er grundað í eini støðulýsing. Netið í trampolinunum er skift út 1-2 ferðir, men er gummiundirlagið sera litfarið, og er óynsktur gróður á undirlagnum, sum kemst av vantandi viðlíkahaldi. Men ein stórur eftirspurningur er eftir at fáa størri úrval og áhugaverdari spæliøki og útgerð.

Heildarætlan
Ynskið frá umsitingini í 2014 var at gera eitt heildaruppskot fyri allan garðin og ikki bert grasplenurnar, men varð hetta tá avvíst. Hetta sæst aftur sum ein avbjóðing við økinum í dag, tí økið tykist sera sundurbýtt, og grundað á vantandi samanhangin gerast nøkur øki ikki serliga áhugaverd at vera í. Ovari vøllur verður ikki nógv brúktur mótsett niðara vøll, har nógv børn spæla. Harumframt verður skálin lítið brúktur, hóast hann varð dagførdur við einum klatriveggi.

Í sambandi við eina dagføring av spælitplássinum í Grasagarði er ynskiligt at gera eitt heildaruppskot, sum eisini verður skipað í mun til nærumhvørvið og virksemið í økinum. Hyggjast eigur eftir nýtsluni, hvat riggar og ikki, og út frá hesum velja, hvat skal varðveitast, dagførast og endurnýtast.

Í samsvar við barna- og ungdómspolitikkin hjá Tórshavnar kommunu og tær tilráðingar, ið knýttar eru at børnum og ungum, skal spæliøkið vera ódefinerað í síni innrætting. Hetta grundað á, at tað skal eggja brúkarunum at nýta hugflogið, og skapar spæliplássið sostatt eisini eitt betri haldføri í mun til ta tíðina, sum nýtt verður á økinum. Tað sama ger seg galdandi í mun til litir. Økið skal ikki vera doyvt við alskyns litum.

**Lógir, ásetingar o.a.:**

**Upplýsingar frá umsitingini:**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum):**

**Skjøl:**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at innheinta hugskot til heildaruppskot fyri Grasagarð, at játtaðar verða kr. 100.000 av konto 6275, L62044, Spælipláss í kommununi, og at beina málið í fíggjarnevndina umvegis mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. september 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at málið verður lagt fyri nevndina aftur á næsta fundi liðugt at taka støðu til.

**Mentamálanevndin 06. oktober 2021:** Útsett.

**Ískoyti:**
Grasagarður er einasta almenna kommunala spæliplássið í Tórshavn, og ynskið er tí, at hetta skilur seg burtur frá spæliplássunum á dagstovnunum og úti í eigarafeløgunum.

Umsitingin hevur sett seg í samband við útlendskan veitara, sum hevur tilvísingar at vísa á um allan heimin, og eru spæliplássini bæði forvitnislig, nýskapandi og øðrvísi í mun til tað klassiska spæliplássið við siðbundnu spæliútgerðini, sum somuleiðis er í samsvari við tilráðingarnar í barna- og ungdómspolitikkinum hjá Tórshavnar kommunu.

Umboð fyri veitara hevur vitjað í Føroyum, og verður eitt heildaruppskot fyri Grasagarð í løtuni tilevnað. Heildaruppskotið verður tøkt til fundin í byggi- og býarskipanarnevndini, og verður tá gjøgnumgingið fyri nevndarlimunum.

**Skjøl:**
Heildaruppskotið verður lagt fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at fara undir at dagføra Grasagarð sambært heildaruppskotinum, og at 2 mió. kr. verða játtaðar til gerð av spæliplássinum, harav kr. 500.000 verða játtaðar av L62044, Spælipláss í kommununi og kr. 1,5 mió. av íløguætlan fyri 2022 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at játta kr. 2 mió. av íløguætlan fyri 2022.

**Fíggjarnevndin 17. november 2021:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. november 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ikki bar á mál at finna fram til eitt endaligt heildaruppskot frá danska veitaranum, og varð samstarvið tí endað. Verkætlanin at skipa og gera nýtt spælipláss í Grasagarði varð tí boðin út í alment útboð.

Verkætlanin varð boðin út sum ein heildararbeiðstøka, og fevnir verkætlanin um allar tilfars- og arbeiðsveitingar í sambandi við skipan og gerð av spæliøki í Grasagarði sambært heildaruppskoti.

Seks tilboð vórðu latin inn, og er príslegan nakað ójøvn:

| | |
|---|---|
| - Hjálpirót | kr. 5.313.799,59 |
| - Arta/Grønt&Grátt | kr. 5.200.000 |
| - Inventartænastan | kr. 3.621.054 |
| - NDO/Havin | kr. 9.773.185 |
| - Innspark/Urtagarðstænastan | kr. 5.992.465,59 |
| | kr. 4.918.045,59 (alternativt tilboð) |

Innkomnu tilboðini eru mett út frá hesum metingarstøði:

- góð skipan av økinum sum heild.
- kappingarførur prísur.
- góðska av tilfari sum verður nýtt.
- gjøgnumførd samanseting av spælireiðskapi.
- atlit til dygdirnar í spæliplássinum.
- áhugaverdar loysnir.

Vinnarin av tilboðnum gjørdist Arta/Grønt&Grátt, sí metingarskjalið.

Roknast skal við áleið 10% til óvantaðar útreiðslur, og er ein mettur kostnaður fyri verkætlanina áljóðandi kr. 5.720.000 (íroknað 10% til óvantað).

Fundur hevur verið við Javna, har víst varð á teirra sjónarmið í sambandi við spæl og atkomu fyri børn við rørslutarni. Vinnandi uppskotið er sera fevnandi fyri øll, bæði í mun til atkomu og spæl á øllum økinum, men kunnu nakrar smávegis tillagingar gerast í tilgongdini, fyri at fáa Grasagarð enn betur fyri førleikaskerd børn/ung.

Fundur hevur somuleiðis verið við fyritøkuna AFRY um at ljósseta Grasagarð, soleiðis at spæliøkið eisini er innbjóðandi í myrku tíðini. Tilfar um hetta kemur til fundin.

**Skjøl:**
Grasagarður - Meting av tilboðum, journal nr. 21/03668-13
Grasagarður - Heildaruppskot (úrdráttur úr tilfari), journal nr. 21/03668-14

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at fara undir at dagføra Grasagarð sambært heildaruppskotinum, at heimila umsitingini at fara undir samráðingar og gera sáttmála við Arta/Grønt&Grátt um verkætlanina og at írestandi 3,7 mió. kr. verða játtaðar til gerð av spæliplássinum, harav kr. 3 mió. verða játtaðar av LK62995, Spælipláss, og kr. 700.000 av LK62996 Miðbýarætlan. Peningurin skal flytast á kt. 6275, L62051, Grasagarður og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

## 39/22 Viðarlund og trivnaðarøkið á Argjum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.11.2021 | 198/21 | 21/04574-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 30/22 | 21/04574-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.02.2022 | 53/22 | 21/04574-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 23.02.2022 | 62/22 | 21/04574-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 39/22 | 21/04574-1 |

**Upprunin til málið**
Formaðurin í byggi- og býarskipanarnevndini hevur biðið um at fáa málið á skrá.

**Lýsing av málinum**
Ynskiligt er at gera viðarlund og trivnaðarøki á Hamrinum á Argjum, matr.nr. 4a. Sí hjálagda kortskjal, journal nr. 21/04574-2, sum vísir lendið talan er um.

Fíggjarnevndin samtykti á fundi 19. mai 2021, at søkja Búnaðarstovuni um keyp av lendi til útstykking umframt viðarlund á Argjum. Umbøn er send Búnaðarstovuni um hetta. Enn er ikki avgreitt, hvørt kommunan kann keypa ella leiga umrødda lendið til viðarlund frá Búnaðarstovuni.

Ein ætlan skal gerast fyri komandi viðarlundina og trivnaðarøkið, soleiðis at tað verður væl skipað við trøum, plantum, lendisgøtum, uppihaldsøkjum vm. Ætlanin skal veitast út til úrvaldar fyritøkur at gera, sum fáa eina samsýning á 20.000 kr. hvør.

Tá ætlanin er gjørd, verður málið aftur lagt fyri nevnd viðv. fígging, eitt nú til lendisarbeiði, keyp av plantum, tilfari v.m., soleiðis ætlanin kann fremjast. Í hesum sambandi verða borgarar í kommununi eisini bjóðaðir at luttaka í verkætlanini við at planta eitt træ í nýggju viðarlundini á Argjum.
Ætlanin er at arbeiðið skal fremjast um várið 2022.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Ymiskar leiðingar ganga í gjøgnum økið, sum ætlanin má taka atlit at. Harumframt er ein gamal bøgarður á markinum til matr.nr. 4a, ið skal varðveitast.
Kommunan eigur matr.nr. 200a og 207a, ið møguliga kunnu verða partur av ætlanini fyri komandi viðarlundina og trivnaðarøkið.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
21/01777 – Umsókn um keyp av lendi til útstykking Oman fyri Argjahamar og til Viðarlund á Argjum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
*Argjahamar_Viðarlund*, journal nr. 21/04574-2
*Viðarlund á Argjum útbjóðingartilfarð*, journal nr. 21/04574-4
*Uppskot frá Grønt&Grátt,* journal nr. 21/04574-10
*Tilboð frá Grønt &Grátt,* journal nr. 21/04574-10
*Uppskot frá Havanum,* journal nr. 21/04574-11
*Tilboð frá Havanum,* journal nr. 21/04574-11

*Plantekning frá Havanum,* journal nr. 21/04574-11
*Plantuplanur frá Havanum,* journal nr. 21/04574-11
*Tilboð frá Hjálpirót,* journal nr. 21/04574-12
*Uppskot frá Hjálpirót,* journal nr. 21/04574-12
*Tilboð frá Urtagarðstænastuni,* journal nr. 21/04574-13
*Uppskot frá Urtagarðstænastuni,* journal nr. 21/04574-13
*Meting av tilboðum,* journal nr. 21/04574-14

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | x | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | x | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:
- heimila umsitingini at bjóða út gerð av ætlan fyri viðarlundina og trivnaðarøkið á Argjum til veitarar innan lendisarkitektur, ið fáa eina samsýning á 20.000 kr. hvør.
- at fíggja 100.000 kr. til endamálið av rakstrarkarminum fyri 2022 á kt. 6210.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. november 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Avmarkað útboð uppá heildarveiting av viðarlundini á Argjum hevur verið. Fýra veitarar vóru bodnir við til útboðið, og allir veitarar lótu inn nøktandi tilfar. Sí útbjóðingartilfarið í skjali journal nr. 21/04574-4.

Teir fýra veitararnir eru:
Grønt og grátt, sí tilfar í skjøl nr. 21/04574-10
Havin, sí tilfar í skjøl nr. 21/04574-11
Hjálpirót, sí tilfar í skjøl nr. 21/04574-12
Urtagarðstænastan sí tilfar í skjøl nr. 21/04574-13

Heildarveitingin innibar at gera eina ætlan fyri viðarlundina og geva eitt tilboð uppá arbeiðið at fremja ætlanina.

Umsitingin hevur mett um innkomnu uppskotini, sí metingina í skjali nr. 21/04574-14

Øll fýra uppskotini vóru góð, men tvey uppskot vóru betri enn hini. Tey vóru Havin og Urtagarðstænastan.

Havin og Urtagarðstænastan hava bæði tvey góð uppskot, sum á hvør sín hátt svara væl uppá útboðstilfarið.

Býarskipanardeilidin ynskir tí at fara í samráðingar við hesar báðar fyritøkurnar um at tillaga uppskotið og tilboðið hjá hesum báðum veitarum og út frá samráðingunum taka eina avgerð um, hvør vinnur útboðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at:

- Heimila umsitingini at fara í samráðingar við Havan og Urtagarðstænastuna fyri at avgera, hvør av hesum fyritøkum vinnur útboðið og fær arbeiðstøkuna.
- Heimila umsitingini at gera sáttmála við vinnandi fyritøkuna.
- Játta 4 mió. kr. til verkætlanina, harav 1 mió. kr. av LK62050, Viðarlundin, træplanting o.a. og 3 mió. kr. av LK62999, Fríðkan av býnum til nýggja verkætlan, Viðarlund á Argjum undir konto 6275.
- Beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 23. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

| Býráðsfundur<br>24. februar 2022 | Blað nr.: 185 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

# 40/22 Fríðkan av bygdunum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 20/22 | 22/00331-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 43/22 | 22/00331-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 40/22 | 22/00331-1 |
| 4 Kollafjarðarnevndin | 01.03.2022 | 1/22 | 22/00331-1 |
| 5 Kaldbaksnevndin | 02.03.2022 | 1/22 | 22/00331-1 |
| 6 Hvítanesnevndin | 03.03.2022 | 1/22 | 22/00331-1 |
| 7 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 14.03.2022 | 2/22 | 22/00331-1 |
| 8 Nólsoyarnevndin | 15.03.2022 | 1/22 | 22/00331-1 |
| 9 Hest/Koltursnevndin | 15.03.2022 | 2/22 | 22/00331-1 |

**Upprunin til málið**
Politisk er ynski um at raðfesta bygdirnar hægri.

**Lýsing av málinum**
Ynskiligt er, at vit áhaldandi arbeiða við at fríðka um og gera ábøtur í allari kommununi.

Ætlanin er, at allar bygdirnar í kommununi skulu verða fríðkaðar á ein ella annan hátt á hvørjum ári.

Ynskiligt er at 2.000.000 kr. verða settar av til fríðkan úti í bygdunum og at allar bygdirnar fáa ein part av hesi upphædd.

Sí uppskot til raðfesting av játtanini í skjalinum, *Fríðkan av bygdunum 2022*, journal nr. 22/00331/2

Átøkini verða viðgjørd í staðbundnu nevndunum, áðrenn avgerð verður tikin um, hvørji átøk skulu gerast í teimum ymisku bygdunum.

**Skjøl**
*Fríðkan av bygdunum 2022*, journal nr. 22/00331-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at játta kr. 2.000.000 av LK62998, Fríðkan bygdir og økir, á nýggja verkætlan og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina og hareftir í staðbundnu nevndirnar til umrøðu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið og hareftir í staðbundnu nevndirnar til umrøðu.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 41/22 Heildarætlan Eystara havnarøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 06.11.2017 | 57/17 | 17/03628-1 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 28.11.2018 | 253/18 | 17/03628-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2021 | 63/21 | 17/03628-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 12.04.2021 | 26/21 | 17/03628-1 |
| 5 Havnanevndin | 13.04.2021 | 18/21 | 17/03628-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 21.04.2021 | 74/21 | 17/03628-1 |
| 7 Býráðsfundur | 29.04.2021 | 108/21 | 17/03628-1 |
| 8 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 258/21 | 17/03628-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 22/22 | 17/03628-1 |
| 10 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 14/22 | 17/03628-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.02.2022 | 12/22 | 17/03628-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 48/22 | 17/03628-1 |
| 13 Havnanevndin | 14.02.2022 | 9/22 | 17/03628-1 |
| 14 Byggi- og býarskipanarnevndin | 22.02.2022 | 50/22 | 17/03628-1 |
| 15 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 41/22 | 17/03628-1 |

**Upprunin til málið:**
Eystara havnarøkið verður víðkað, og tí er tørvur á gera eina ætlan fyri hvussu økið skal skipast.
Av tí at útbyggingin ikki verður liðug fyrr enn í 2019, er tørvur á at gera tillagingar á verandi øki beinanvegin. Serliga er tørvur á at gera tillagingar í verandi farstøð.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Uppskot er gjørt til heildarætlan av Eystara havnarøki.
Uppskotið er ein lýsing av framtíðarætlanum fyri Eystara havnarøki, og lýsir verandi viðurskiftir, avbjóðingar og møguleikar.

Uppskotið lýsir verandi viðurskiftir, har undir ymiskleikan í ferðsluni, har stór skip, smábátar, størstu bilarnir og fólk til gongu eru á økinum. Hetta verður framhaldandi veruleiki, og kanska í enn størri mun enn í dag, nú havnarlagið verður víðkað.

Víðari lýsir uppskotið framtíðar menningarmøguleikar, støddir, volumenkanningar, nýggj ferðslumynstur og søgulig sambond, sum kunnu styrkjast millum Skansan, Tinganes og økið inn móti Kongabrúnni.
Til seinast lýsir uppskotið hvussu ferðsla, parkering og avgreiðsla av ferðafólki verður skipað tá útbyggingin av havnarlagnum verður liðug, soleiðis at tann vaksandi ferðingin og flutningurin, kann virka undir tryggum karmum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið er avlagt sum B1 havnarøki.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
j.nr. 17/01436 Víðkan av Farstøðini

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl:**
Heildarætlan fyri Eystara havnarøki j.nr. 17/03628-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávisar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | x |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við heildarætlanini fyri Eystara havnarøki.

**Vinnunevndin 06. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og koyra heildarætlanina til almenna kunning og viðmerking.

**Ískoyti – kunna verður um málið.**
Uppskot til heildarætlan fyri Eystara havnarøki sampakkar bæði við Miðbýarætlanina fyri Tórshavnar kommunu og við verandi ætlanir um at útbyggja Tórshavnar havn.

Í miðbýarætlanini eins og í heildarætlanini verður dentur m.a. lagdur á, at eitt øki við Eystaru bryggju verður lagt av til býartætting við eitt nú bústøðum, vinnu og virksemi tengt at býarlívinum.

Tankin aftanfyri útbyggingina av Tórshavnar havn er at fáa eitt væl skipað kaiøki, har bleyta vinnan er staðsett næst býnum og tunga og mest larmandi vinnan longst burtur frá býnum í tí nýggju útbyggingini. Hesum tanka fylgir heildarætlanin fyri Eystara Havnarøki eisini.

Uppskotna heildarætlanin fevnir um trý øki, ið eru skipað í vinnulív, havnar- og ferðavinnuvirksemi og annað blandað virksemi.

Øki A er økið innast í Eystaru Vág og næst miðbýnum. Í heildarætlanini er hetta økið ætlað bleytum handils- og vinnuvirksemi. Her verður bleyta ferðslan leidd fram við bryggjukantinum, og søguligar frágreiðingar og rekreativt og býarkent virksemi verður borið fram, sum ein forlongdur armur frá økinum fram við Kongabrúnni, bátahylinum, Áarstovu og Essabar. Hetta sampakkar sera væl við uppskotið í miðbýarætlanini, har Kongabrúgvin skal vera framtíðar miðdepil fyri eitt nú sjóvarítrótt og rekreatión. Harafturat verður lagt upp til, at Kongabrúgvin er eitt øki, har góðir møguleikar eru fyri býartætting, eitt nú við at byggja vinnubygningar og bústaðir og hetta sampakkar eisini væl við miðbýarætlanina.

Øki B er økið millum miðbýarvirksemi og havnarvirksemi. Uppskot til hetta øki er at skapa eitt náttúruligt skifti millum bý og bryggju, har ein seyrigøta kann leiða bleytu ferðsluna út úr býnum eftir bryggjukantinum, og eitt parkeringsøki kann skapa íbinding og avgreiðslu til havnina.

Øki C er økið tættast móti havnini og nýggju útbyggingini. Hetta økið skal tola tunga ferðslu, og kunna virka sum granni hjá stóra havnarrúminum og samferðsluplássinum.

Við havnarútbyggingini, ið fer fram í løtuni, er týdningarmikið, at verandi og nýtt virksemi, knýtt at sjóvinnuni og bryggjukantinum, er væl skipað, og somuleiðis hugsað inn í eina langskygda heildarætlan. Tórshavnar kommuna skal vera við í arbeiðinum at skipa Føroyar sum tilfeingisdepil í Norðurhøvum, og útbyggingin av Tórshavnar Havn eigur tí at vera hugsað saman við restini av økinum inn í eina heildarætlan, soleiðis at havnin kann gerast ein sameindur partur av restini av býnum.

Henda heildarætlan er ein menningarætlan, ið sameinar allar tættir í einum býarparti og stuðlar undir at ávegis avgerðir styðja uppundir langskygdar ætlanir. Hetta eru ætlanir, ið kommunan eigur at hava, bæði fyri at vera tilvitað, tá nýggjar ætlanir koma á tekniborðið og fyri at langtíðarætlanirnar verða havdar í huga, tá planlagt verður.

Heildarætlanin hevur í fyrstu atløgu ongar fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa, men kemur heildarætlanin at liggja til grund, tá býurin skal mennast víðari út eftir Havnargøtu/Kongabrúnni.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og býararkitekturin mæla til at heimila umsitingini at arbeiða víðari við ætlanini, undir hesum at kanna ferðsluviðurskiftini nærri og gera rúmkanningar av økinum, soleiðis at heildarætlanin verður greina út, fyri síðani at leggja málið fyri aftur nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Uttanríkis- og mentamálaráðið og Landsverk fóru í fjør undir eina tilgongd um nýtt tjóðleikhús í Tórshavn. Fyrsta stigið í verkætlanartilgondini er at vísa á best egnaðu staðseting fyri tjóðleikhúsið.
Mánadagin 8. mars 2021 var kunngjørt av Uttanríkis og mentamálaráðnum, at kappingin av staðsetingini av nýggja Tjóðleikhúsinum var avgreidd, og at dómsnevndin var komin fram til, at Tjóðleikhúsið skuldi staðsetast á Bursatanga, har leikhúsið kemur at standa á markamótinum millum bý og havn.

Tórshavnar kommuna fekk handa avgerðina frá Dómsnevndini og skal nú taka støðu til valdu staðseting. Í sambandi við at taka endaliga støðu til staðsetingina, so verður neyðugt at viðgera økið út frá teimum staðbundnu avbjóðingunum, sum økið hevur við sær, og verður neyðugt at tryggja sær, at endaliga staðsetingin hóskar inn til býarskipanarligu-, havna- og ferðsluatlitini, sum kommunan beinleiðis hevur til staðið.

Sostatt verður mett, at neyðugt verður at seta gongd á arbeiðið at skipa eystara havnaøkið í eina heildarætlan fyri økið, har staðsetingin av Tjóðleikhúsinum samstundis verður nágreinað.

Av tí at 5 ráðgevara-toymir eru knýtt at kappingini um Tjóðleikhúsið, og mugu hesi, samstundis sum tey tekna upp á eitt nýtt tjóðleikhús, taka støði til nærumhvørvið, so verður mett, at besta loysnin til at fáa eina nøktandi loysn fyri bæði skipan av økinum og skipan av tjóðleikhúsinum er, at báðar kappingarnar verða samskipaðar.

Upplýst er fyri umsitingini, at hetta er sama tilgongd, sum Reykjavíkar kommuna framdi, tá Hørpan í Reykjavík og økið kring Hørpuna varð skipað.

Til at fara undir hesa tilgongd verður neyðugt, at býarskipanarligi, tekniski og havna myndugleikin nágreina ítøkiligu krøvini til eystara havnaøki nú og í framtíðini, soleiðis at ráðgevaratoymini hava nakað ítøkiligt at fyrihalda seg til, tá økið og bygningurin skal teknast.

Metta samlaða upphæddin at fíggja toymini er áljóðandi 500.000 kr., har hvørt toymið verður samsýnt við 100.000 kr.

Við at fara undir hesa tilgongd, so fær kommunan 5 ymisk uppskot til skipan av økinum, og kann hugsast, at elementir eru í øllum uppskotunum, sum kunnu gagna endaligu skipanini av økinum. Hetta er ein heldur óroynd tilgongd, og hevur kommunan ikki áður samskipa verkætlanir við landi á henda hátt, men mett verður, at týdningurin av at Tjóðleikhúsið verður staðsett í Tórshavn og týdningurin av at hendan staðseting er heldur serlig í mun til kringumstøðurnar, so er tað bara jaligt at fáa fleiri uppskot inn til skipan av økinum, soleiðis at kommunan í síðsta enda hevur eina skipan av økinum, sum tekur hædd fyri teimum staðbundnu viðurskiftum, sum kommunan metur vera av týdningi fyri økið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at farið verður undir at skipa eystara havnaøki sambært omanfyri standandi leisti,
- at umsitingin fer undir at nágreina ítøkiligu krøvini, sum ráðgevin skal fyrihalda seg til,
- at 500.000 kr. verða játtaðar av konto 6275, Fríðkan av kommununi, L00001, Løgukarmur fyri árið á nýggja íløgu ‘Skipan av eystara havnaøki’ undir konto 6275,
  og at málið verður beint í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 12. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Havnanevndin 13. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. apríl 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina malið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. apríl 2021:** Heðin Mortensen legði fram broytingaruppskot í málinum. Atkvøtt verður um soljóðandi uppskot: Samtykt við tí broyting, at fleiri arkitektar kunnu bjóða seg fram at gera heildarætlan. Málð um fígging verður at leggja fyri aftur.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið frá Heðini Mortensen, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at tørvur er á eini heildarætlan fyri Eystara havnaøki, frá Kongabrúnni og út undir Skansan, stóð tað 5 ráðgevarasamtøkum í boði at luttaka í eini “Hugskotsinnsavning”, sum Býarskipanardeildin skipaði fyri frá 20 okt. – 8.nov 2021.

Arbeiðið varð skipað so, at 5 ráðgevaratoymir skuldu arbeiða við hvør sínum uppskoti til eina heildarætlan hesar 7 vikurnar fyri eina samsýning á kr. 100.000 í part.
Tað vórðu 500.000 kr. settar av til hetta av konto 6275, fríðkan av Kommununi, og hetta varð samtykt á býráðsfundi longu 29. apríl 2021.

Býraðið samtykti tá eisini, broytingaruppskotið hjá Heðini Mortensen, at loyva fleiri ráðgevum at luttaka í hugskotsinnsavningini. Hetta var við støði í at tvær ráðgevarafyritøkur:

- EYA arkitektar og design
- Arkitektar 99

høvdu sýnt áhuga at vera við í verkætlanini saman við teimum upprunaligu 5 innbodnu ráðgevarasamtøkunum.
Hetta skuldi eisini samsýnast eftir sama leisti og við somu treytum. T.v.s. við 100.000 krónum í part fyri at gera uppskot til heildarætlan.
Báðar fyritøkurnar vórðu mettar at kunna innlata nøktandi talgilt tilfar.
Grundað á hesa samtykt vórðu tískil tilsamans 7 samtøk innkallað at luttaka í hugskotsinnsavningini, har tey fingu somu kravfesting og sama grundtilfar at arbeiða útfrá.

Tískil eru 2 fyritøkur afturat, sum hava rætt til at samsýnast við 100.000 í part fyri uppskotini, ið tey lótu inn. 8 nov. 2021.

Atlit skal harumframt takast til, at samsýningin fyri øll 7 innkomnu uppskotini má útgjaldast sum *samsýning fyri innkeypt ráðgevaraarbeiði*, og her má tískil íroknast meirvirðisgjald.

Afturat teimum framanundan játtaðu kr. 500.000, mugu tískil játtast kr. 243.750 afturat.
Tað er 100.000 í part til teir báðar innbodnu ráðgevarnar, umframt kommunala meirvirðisgjaldið (6,25%) av teirri samlaðu upphæddini at útgjalda til allar 7 ráðgevarnar.
Umframt tað er eisini nakað av fundarútreiðslum, sum fór til at skipa og leiga høli til verkstovu við viðgerðararbeiðinum. (Kr. 7.960 v.mvg)

Eina góða viku undan innlatingarfreistini kom fyrispurningur frá einum ráðgevi afturat (Albert Isfeldt og Jóannes Petersen) um at vera við í hugskotsinnsavningi. Ráðgevanum varð greitt frá, teir vóru vælkomnir at koma við einum sjálvbodnum ítkasti til eina heildarætlan, men at teir ikki kundu vænta samsýning fyri hetta arbeiði, tá teir ikki kundu lúka somu arbeiðstreytir sum hinum 7 ráðgevarnir arbeiddu undir, sum longu tá høvdu sitið við uppgávuni í 6 vikur. Hetta varð játtað, og ráðgevin lat eisini eitt uppskot inn, ið eisini varð tikið við í viðgerðartilgongdina.

Eftir at hugskotsinnsavningin varð lokað 8. nov. 2021 hevur býarskipanardeildin verið í eini tilgongd, har arbeitt verður við innkomna tilfarinum fyri at fáa eina ítøkiliga og framtíðartryggjaða heildarætlan samansetta.
Umsitingin kemur at kunna um verkætlanina á fundinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til, at játta kr. 255.000 av Løgukarminum LK62035 “Vetrarfriðing” á L62046, «Heildarætlan Eystara havnaøki», og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Ruth Vang luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Tørvurin á eini heildarætlan**
Í tráð við at havnavirksemið á gomlu Eystaru bryggju so líðandi verður flutt út á nýggju ídnaðarkeiina, hevur stórur tørvur verið á eini nýggjari menningarætlan fyri Eystara Havnaøki til tess at tryggja at økið ikki kemur at standa lutfalsliga oyðið í framtíðini.

**Eystara Bryggja tømist**
Eitt nú kann nevnast, at stóra pakkhúsið undir Skansanum hjá Smyril Line Cargo, og skrivstovubygningurin hjá TAKS á ávikavist Eystaru bryggju 20 og 30 ætlandi verða niðurtikin, tá hetta virksemið heldur verður samlað úti á nýggju ídnaðarkeiini. Smyril Line fyrireikar í hesum viðfangi eisini byggingina av nýggjum altjóða ferðafólkaterminali úti á ídnaðarkeiini, har Norrøna fer at hava sítt fasta atløgupláss.

Væntast kann harumframt, at hildið verður fast um ætlanina við at bora undirsjóvartunnil millum Sandoynna og Suðuroynna um eitt stutt áramál, sambært raðfestingini á fíggjarlógini fyri 2022. Natúrligu avleiðingarnar av hesum eru, at Strandfaraskip Landsins fyrireikar, at suðuroyarsiglingin verður niðurløgd, at Smyril verður seldur, og at ferjulegan og stóra asfaltsfløtan við bíðstøðuplássunum umborð tískil kemur at standa tóm, um Tórshavnar kommuna onga aðra ætlan hevur fyri økið.

Eftir á Eystaru bryggju stendur sostatt bert farstøðin hjá SSL við atknýttu bussplássunum, ferjulegan hjá Ternuni, og Havnarskrivstovan uttast undir Skansanum, umframt víðu asfaltsfløturnar og bíðistøðuplássini.

Um hugt verður at samlaða økinum í verandi støðu, kann Eystara Havnaøki í dag býtast upp í tríggjar partar. (sí journalnummar 17/03628-18, Økispartar_Eystara havnaøki.pdf) hesir partar eru:

- Økispartur 1 er innasti og søguliga ríkasti partur av samlaða økinum, við Kongabrúnni, bátahylinum, Bursatanga og havnalagnum yvir av Tinganesi út til Farstøðina. Hesin parturin er á leið 15.000 $m^2$ til støddar.
- Økispartur 2 er samferðslu og farmaøkið frá Farstøðini og út til nýggju ídnaðarkeiina. Hesin partur er á leið 18.900 $m^2$ til støddar.
- Økispartur 3 er útbygda ídnaðarøkið og nýggju molarnir. Hetta økið er á leið 187.600 $m^2$

**Tilgongdin við Heildarætlanini**
Býarskipanardeildin hevur saman við teknisku deild, verið í eini tilgongd at gera eina heildarætlan fyri Eystara Havnaøki hvussu teir báðir innastu økispartarnir (1 & 2) best kunnu gagnnýtast og framtíðartryggjast býarskipanarliga í mun til komandi virksemi og menning í økinum tey næstu mongu árini.

Skipað varð í hesum sambandi fyri eini hugskotskapping, har 8 arkitektasamtøk gjørdu hvør sítt uppskot uppá eina heildarætlan fyri økið. Sum grundarlag undir kappingini varð ein kravfesting gjørd við støði í teimum bindingum, sum eru í økinum, og við atliti til tey ynski, sum áhugabólkar og brúkarar í økinum hava. Harumframt varð tilfarið eisini evnað við tí í hyggju, at nágreina hvar eitt Tjóðleikhús kundi verið staðsett í økinum.

Uppskotini vórðu innlatin 8. nov 2021, og vórðu tey eftirfylgjandi viðgjørd í einum fakligum arbeiðsbólki, ið tók støðu til hvussu ein endalig heildarætlan fyri Eystara Havnaøki skuldi skipast úr teimum best eydnaðu lutunum úr kappingini.

**Heildarætlanin**
Við støði í innkomnu ráðgevarauppskotunum, hevur Býarskipanardeildin gjørt eina heildarætlan fyri Eystara Havnaøki, har stóru strokini vóru, at økispartur 1, ið er innasta og mest søguligi parturin, verður best gagnnýttur og virðiligast handfarin, um hann verður inntikin til fólksligt miðbýarvirksemi, sett av til mentan, ferðavinnu og smávinnuligt virksemi, bryggjutorg og útbygdari smábátahavn við nýggjari atløgubryggju til størri stuttleikafør við Bursatanga.

Hetta verður sostatt eitt livandi mentanarumhvørvi, ið knýtir bæði Skansan og Tinganes upp í miðbýin, samstundis, sum tað leggur lunnar undir, at her verður bygt til alment mentanarvirksemi, ið tænir tignarliga økinum heiður, og samstundis hevur virðing fyri tí søguliga smáneystaumhvørvinum, sum einaferð setti sín dám á Eystaru vág, áðrenn økið varð umlagt til ídnað og samferðslu.

Økispartur 2, millum Farstøðina og Havnarskrivstovuna varðveitir sína funktión sum samferðsludepil, men verður mentur munandi og endurskipaður í mun til ferðslurensl og virksemi.

(Sí nærri útgreining í bóklingi um heildarætlanina)

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At Heildarætlanin fyri Eystara Havnaøki, sum lýst í bóklingi um heildarætlanina og atknýtta tekningstilfari, verður eitt vegleiðandi amboð fyri hvussu økið skal mennast og skipast í framtíðin.
- At økið, sum er avmerkt á flatmyndini "Uppskot um kappingarøki" áljóðandi 10.000 $m^2$ verður avsett til kappingarøkið hjá Mentamálaráðnum til nýggjan Tjóðpall við treytum grundaðar úr heildarætlanini.
- At beina málið í býráðið umvegis teknisku nevnd, havnanevndina og mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Útsett

**Tekniska nevnd 07. februar 2022:** Útsett.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Útsett.

## Ískoyti:

## Skipan av Eystara havnaøki:
Í fyrireikingini til útbygging av Eystara havnaøki, tá ætlanin var at tilkoyringin til havnarlagið lá uttan fyri Skansan, skuldi havnarlagið víðkast við 163.000 $m^2$.

Av tí at tað tók so langa tíð at fáa tað endaliga friðingarloyvið, bleiv avgjørt at minka útbyggingina til 95.000 $m^2$.
Avleiðingin av minkingini er, at havnaøkið ikki er so stórt, sum upprunaliga ætlað, og at tilkoyringin til havnarlagið hevði verið betur, um ætlanin ikki varð minkað.

Avgjørt er, at byggja nýggj pakkhús og farstøð á økinum uttan fyri havnarskrivstovuna. Hjarnuvirksemið hjá havnini og skipafeløgunum er, at hava pláss til at avgreiða ferðafólk og frakt.

Samfelagið er í støðugum vøkstri, tí er umráðandi at skipafeløgini, hava arbeiðsumstøður og pláss at fylgja við hesum vøkstrinum.

Av tí at tað tekur fleiri ár at víðka havnarlagið, er neyðugt at økið millum havnarskrivstovuna og farstøðina framhaldandi verður ein partur av virkseminum hjá skipafeløgunum.

Økið millum havnarskrivstovuna og Bursatanga er umleið 23.000 $m^2$

Í tekning j.nr 17/03628-14,  heildarætlan Eystara havnaøki skitsa 061221, sæst, at ætlanin er at venda Smyrli, soleiðis at koyrast skal í land undir havnarskrivstovuni.

Hendan ætlanin viðførir:
1. At tað verður truplari hjá Smyrli at koma til og frá, serliga á útsyðningi
2. At einasta flytiliga rampan í Havnini verður gjørd óvirkin
3. At økið beint innan fyri havnarskrivstovuna, sum eigur at vera partur av virkseminum hjá skipafeløgunum í uttanlandssigling, verður brúkt til bíðirøðir og farm, sum skal við Smyrli.
4. At íløgur skulu gerast í:
    a. Nýggja rampu undir havnarskrivstovuni
    b. Nýggja rampu út eftir molanum
    c. Styrking av bryggjukantinum innan fyri havnarskrivstovuna
    d. Nýggjar sterkar fendarar innan fyri havnarskrivstovuna
    e. Nýggjar stormpullartar til Smyril
    f. Nýggja farstøð ella landgongd við gongubrúgv til verandi terminal

**Tilmæli frá havnameistaranum:** At økið millum havnarskrivstovuna, og verðandi ferðafólkaterminal, framhaldandi verður partur av uttanlandssiglingini.
At økið frá verðandi farstøð ikki verður lagt av til miðbýarvirksemi, fyrr enn Smyril verður tikin úr sigling.

**Havnanevndin 14. februar 2022:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Annfinn Brekkstein og Birgir Nielsen samtykti at eitt økið upp á uml. 4.000 fermetrar frá Farstøðini og heim ímóti býnum verður lagt av til miðbýarvirksemi og Mentunarhús.

**Ein minniluti:** Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**

**Fortreytirnar fyri nýskipan av Eystaru bryggju:**

Komandi árini verða fortreytirnar fyri virkseminum á Eystara Havnaøki somikið broyttar, at neyðugt er at nýskipa økið, so tað kann gagnnýtast á ein skynsaman og framtíðartryggjaðan hátt. Tørvur hevur verið á eini heildarætlan fyri økið millum Kongabrúnna og út til ídnaðarmolan á Eystara havnaøki. Umtalaða økið er umleið 32.800 $m^2$ til støddar.

Økið verður í verandi støðu nýtt til:

- Samferðsluøki við farstøð hjá Strandfaraskipum Landsins og Smyril Line, bæði við atløgubryggjum til uttanlandaferðaflutning, sum karmur um ferjusambandið til Nólsoyar og Suðuroyar, og sum bussmiðstøð hjá bygdaleiðum.
- Taxamiðstøð
- Pakkhús
- Havnaskrivstova hjá Tórshavnar Havn
- Skrivstovuvirsksemi.
- Smábátahavn
- Alment parkeringsøki
- Og til matstovu og handilsvirksemi.

Broytingarnar í økinum verða m.a.

- At Suðuroyarsiglingin væntandi verður niðurløgd og Smyril verður tikin úr sigling.
- At pakkhúsið og skrivstovuvirksemið á ávikavist Eystaru bryggu 20 og 30, millum Havnaskrivstovuna og verandi Farstøð, verður flutt úr økinum.
- At bussleiðirnar hjá SSL verða fleiri í tali.
- At Smyril Line flytur alt sítt uttanlanda siglingarvirksemi av økinum og út á molan við nýggjum altjóða terminali.
- At ferðslan um rundkoyringarnar og út á ídnaðarmolan fer at vaksa.

Ein nýggj skipan av økinum leggur upp til, at verandi funktiónir fáa neyðugt rásarúm til at virka og røkja sítt virksemi á ein tryggan hátt, og at leysgivnu fermetrarnir í økinum verða gagnnýttir á skilabesta hátt, hvat býarskipan og miðbýarmenning viðvíkur. Her verður serstakliga hugsað um søguliga virðið í økinum, har býareyðkenni sum Tinganes, Skansin og Kongabrúgvin er ein partur av nærumhvørvinum.

Býarskipanardeildin hevur verið í eini tilgongd at skipa eina heildarætlan fyri økið, har samskift hevur verið við uttanveltaðar ráðgevar og áhugabólkar i økinum.

**Økispartar í heildarætlan**

Heildarætlanin deilir umtalaða økið í fýra økispartar.

- Økispartur 1, ið er økið við ósan á Havnará og nakað út á Kongabrúgv (umleið 1300 $m^2$).

- Økispartur 2 er Innara bryggjuøkið frá Kongabrúnni og út til verandi farstøð. (umleið 17.000 $m^2$)

- Økispartur 3 er Miðøkið við verandi farstøð og atknýttum bussstøðubásum, tolli og parkering. (umleið 7600 $m^2$)

- Økispartur 4 er Ytra bryggjuøkið frá verandi farstøð og út til ídnaðarmolan. (umleið 7000 $m^2$).

- Uttan fyri økispart 4 er Schengen- og ídnaðarøki (umleið 157.000 $m^2$)

**Skipan av økinum**
Heildarætlanin er skipað so, at:

Økispartur 1 og 2 verður umskipaður til miðbýarkent virksemi við smáhandlum, kafé/matstovum, og ymiskt til ferðavinnuligt endamál. Her verður bryggjutorg við bátadrátti og broyttum bryggjukanti, ið er ætlaður fólki til gongu, umframt at smærri skip kunnu liggja her. Smábátahavnin verður eisini útbygd til at taka fleiri bátapláss.
Nólsoyarferjan kemur framhaldandi at hava atløgu í økinum, og her verður nýggj ferðamiðstøð bygd, við nýggjum bussstøðuplássum til bæði bygdaleiðir og býarbuss.

Her verður lutfalsliga lág bygging í 1-3 hæddum.

Økispartur 3 verður avsett til alment mentanarligt endamál, so sum leikhús og almenna parkering. Her verður ein nýggj og størri rundkoyring gjørd, við einum eyka ferðsluarmi, ið verður leiddur beint oman á bryggjuna.

Her verður hægri bygging loyvd í upp til 5 hæddum, og undantak kann í serligum føri verða givið upp til 20 m til eitt nú leikhústorn.

Økispartur 4 verður skipaður, lutvíst sum sokallað buffara-øki til uttanlandasiglingina og atløgubryggjuni hjá Norrønu/SmyrilLine. Og lutvíst sum almenn parkering á Eystaru bryggju annars.
Vegurin frá rundkoyringini og út á ídnaðarøkið verður eisini breiðkaður við eini eyka frákoyringarbreyt til tunga ferðslu niðan um Skansan.

Her kann byggjast í upp til 5 hæddum, treytað av at ikki verður bygt upp um hæddina á hamaranum á Skansanum, ið er 16 m høgur í lutfalli til bryggjukantin.

Í øki 3 og 4 eru líkindini góð fyri at ymsar funktiónir umskara, ella yvirlappa hvørja aðra. Til dømis er hugsandi at buffarastøðubásar til ferjulegurnar partvís kunnu nýtast sum almenn parkering um kvøldarnar, tá tiltøk eru á skránni í økinum.

Eisini er hugsandi at parkeringsdekk kann byggjast, um tørvurin og trýstið á hetta økið fer at vaksa.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At Heildarætlanin fyri Eystara Havnaøki, sum lýst í bóklingi um heildarætlanina og atknýtta tekningstilfarið, verður eitt vegleiðandi amboð fyri hvussu økið skal mennast og skipast í framtíðini

- At økið, sum er avmerkt á flatmyndini “Uppskot um byggiøki” áljóðandi 4.000 $m^2$ verður avsett til byggiøki hjá Mentamálaráðnum til nýggjan Tjóðpall við treytum grundaðar úr heildarætlanini.

- At beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 22. februar 2022:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen og Ruth Vang, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Dam, atkvøður blankt.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 42/22 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 83/15 | 15/01400-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 25.05.2016 | 148/16 | 15/01400-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 225/16 | 15/01400-1 |
| 4 Mentamálanevndin | 15.06.2016 | 174/16 | 15/01400-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 13.06.2016 | 70/16 | 15/01400-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 14.06.2016 | 179/16 | 15/01400-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 16.06.2016 | 46/16 | 15/01400-1 |
| 8 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 163/16 | 15/01400-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 314/16 | 15/01400-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 402/16 | 15/01400-1 |
| 11 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 329/16 | 15/01400-1 |
| 12 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 46/17 | 15/01400-1 |
| 13 Mentamálanevndin | 16.10.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 14 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 77/17 | 15/01400-1 |
| 15 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 270/17 | 15/01400-1 |
| 16 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 266/17 | 15/01400-1 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 8/18 | 15/01400-1 |
| 18 Mentamálanevndin | 07.03.2018 | 82/18 | 15/01400-1 |
| 19 Mentamálanevndin | 12.09.2018 | 277/18 | 15/01400-1 |
| 20 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 52/18 | 15/01400-1 |
| 21 Fíggjarnevndin | 19.09.2018 | 260/18 | 15/01400-1 |
| 22 Býráðsfundur | 27.09.2018 | 214/18 | 15/01400-1 |
| 23 Mentamálanevndin | 28.11.2018 | 364/18 | 15/01400-1 |
| 24 Fíggjarnevndin | 05.12.2018 | 350/18 | 15/01400-1 |
| 25 Býráðsfundur | 13.12.2018 | 312/18 | 15/01400-1 |
| 26 Mentamálanevndin | 08.05.2019 | 157/19 | 15/01400-1 |
| 27 Fíggjarnevndin | 15.05.2019 | 127/19 | 15/01400-1 |
| 28 Býráðsfundur | 23.05.2019 | 106/19 | 15/01400-1 |
| 29 Mentamálanevndin | 17.06.2019 | 213/19 | 15/01400-1 |
| 30 Býráðsfundur | 20.06.2019 | 149/19 | 15/01400-1 |
| 31 Mentamálanevndin | 24.06.2019 | 223/19 | 15/01400-1 |
| 32 Mentamálanevndin | 03.07.2019 | 229/19 | 15/01400-1 |
| 33 Fíggjarnevndin | 03.07.2019 | 215/19 | 15/01400-1 |
| 34 Býráðsfundur | 04.07.2019 | 185/19 | 15/01400-1 |
| 35 Mentamálanevndin | 15.04.2020 | 107/20 | 15/01400-1 |
| 36 Fíggjarnevndin | 22.04.2020 | 100/20 | 15/01400-1 |
| 37 Býráðsfundur | 30.04.2020 | 77/20 | 15/01400-1 |
| 38 Mentamálanevndin | 10.06.2020 | 183/20 | 15/01400-1 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.08.2020 | 215/20 | 15/01400-1 |
| 40 Fíggjarnevndin | 25.08.2020 | 199/20 | 15/01400-1 |
| 41 Býráðsfundur | 25.08.2020 | 166/20 | 15/01400-1 |
| 42 Mentamálanevndin | 06.11.2020 | 297/20 | 15/01400-1 |
| 43 Fíggjarnevndin | 06.11.2020 | 294/20 | 15/01400-1 |
| 44 Býráðsfundur | 06.11.2020 | 251/20 | 15/01400-1 |
| 45 Mentamálanevndin | 19.10.2021 | 254/21 | 15/01400-1 |
| 46 Fíggjarnevndin | 20.10.2021 | 278/21 | 15/01400-1 |
| 47 Býráðsfundur | 28.10.2021 | 254/21 | 15/01400-1 |
| 48 Mentamálanevndin | 09.02.2022 | 34/22 | 15/01400-1 |
| 49 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 35/22 | 15/01400-1 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 50 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 42/22 | 15/01400-1 |

**Málslýsing**:
Til tess skjótt at fáa gongd á at betra umstøðurnar til almenna svimjing og kappingarsvimjing í høvuðsstaðarøkinum, verður bygginevndin til 50 m svimjihyl tikin av, og í staðin verður serstøk nevnd við tilvísing til fíggjarnevndina sett at gera allar neyðugar fyrireikingar til bygging av svimjihøll, herundir at:

- Gera neyva tørvslýsing av nýggjari svimjihøll til almenna svimjing og kappingarsvimjing, herundir lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum
- Gera uppskot til staðseting av nýggjari høll
- Gera byggiskrá til verkætlan, herundir hølistørv, teknisk krøv og orkukrøv
- Gera kostnaðarmeting og tíðarætlan fyri bygging
- Gera rakstrarætlan, t.e. roknað meting um árligar rakstrarkostnaðir
- Gera uppskot til fígging, herundir møguleikar at fáa til vega fígging frá uttanhýsis pørtum

Serstaka nevndin fyri bygging av svimjihøll verður mannað við politiskum umboðum og umboðum fyri trivnaðarfyrisitingina og teknisku fyrisiting. Fíggjarnevndin setir nevndina, sum í minsta lagi 2. hvønn mánaða leggur statusfrágreiðing fyri mentamálanevndina og fíggjarnevndina, ið skal góðkenna arbeiðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta serstaka nevnd undir fíggjarnevndini at fyrireika nýggja svimjihøll við omanfyristandandi arbeiðssetningi og at velja Elin Lindenskov og Annfinn Brekkstein í nevndina.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørg Dam, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Rúni Djurhuus, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Jógvan Arge, Jákup Dam og Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 23. mai 2016 samtykt byggiskrá fyri byggiverkætlanina. Byggiskráin er hjáløgd sum fylgiskjal 1 og svarar hon uppá settu spurningarnar og punktini.

Tó viðv. spurninginum um lýsing av, hvussu verandi svimjihallir í høvuðsstaðarøkinum kunnu nýtast til at nøkta partar av nýtslutørvinum, er at viðmerkja:

Tórshavnar kommuna hevur fylgjandi svimjihallir:
1). Svimjihøllin í Kollafjarðar skúla.
Verður brúkt bæði til skúlar og stovnar og er opin fyri almenninginum fleiri dagar um vikuna og alt

skúlaárið. Høllin tænir einum lokalum endamáli burturav og er ikki upplagt at broyta nakað tí viðvíkjandi. Høllin er í góðum standi.

2). Svimjihøllin í eindini á Argjavegi hjá Skúlanum á Fløtum (gl. Argja Skúla). Verður brúkt burturav til skúlabrúks. Framtíðin er nógv tengd at, hvussu verður við eindini á Argjavegi tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Uppskotini, ið hava verið nevnd eru til annað kommunalt endamál, so sum innan eldraøkið og hevur Nám X eisini verið nevnt, tó so at í løtuni verður arbeitt út frá, at Nám X fer inn í Handilsskúlabygningin. Alt eftir hvat framtíðar endamálið verður, skal støða takast til, um hylurin framhaldandi skal verða í brúki, ella hølið verður brúkt til annað endamál. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin. Høllin er í góðum standi.

3). Svimjihøllin í Hesti. Verður vanliga brúkt summarmánaðirnar. Ikki nøkur ætlan fyribils um nakra broyting. Høllin er í hampiligum standi.

4). Svimjihøllin í Eysturskúlanum. Hylurin verður brúktur til skúlabrúks umframt til kvøldskúla og aðra undirvísing. Mælt verður til at halda fram við honum óbroytt. Er serliga áhugaverd til ymiskar sertørvir, umframt skúlabrúks. Er ynski at minka um rakstrarkostnaðir er viðkomandi at taka støðu til at niðurleggja henda hylin, ið annars er í góðum standi.

5). Svimjihøllin í Gundadali. Er nógv brúkt til alskyns endamál.

Undangóðkenning av ráðgevaratoymum
Umsitingin er í holt við at fyrireika undangóðkenning av ráðgevaratoymum til eina møguliga hugskotskapping, sum ætlandi fer í gongd um miðjan juni og gongur fram til oktober.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja
byggiskránna og at beina málið í býráðið, umvegis byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina og fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 25. mai 2016:** Útsett.

**Ískoyti**
Sbrt. Býráðssamtykt 23. apríl 2015 er talan um eina serstaka nevnd, sum vísir til fíggjarnevndina. Av teirri orsøk verður viðgerðin av byggiskránni at byrja í fíggjarnevndini, sum so beinir málið víðari til aðrar nevndir, áðrenn endaliga viðgerð í fíggjarnevndini og hareftir býráðsviðgerð.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla fíggjarnevndini til at samtykkja byggiskránna og at beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, byggi- og býarskipanarnevndina, teknisku nevndina, náttúru- og umhvørvisnevndina.

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni og beina málið í býráðið umvegis mentamálanevndina, teknisku nevnd, byggi- og býarskipanarnevndina og heilsu- og umhvørvisnevndina.

**Tekniska nevnd 13. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 14. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Mentamálanevndin 15. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 16. juni 2016:** Samtykt at taka undir við byggiskránni.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri langhyl í Gundadal var útskrivað í august 2016, eftir at Tórshavnar býráð 16. juni 2016 hevði samtykt byggiskránna fyri langhyl í Gundadali.

Trý ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey eru:
- Toymið Ósbjørn Jacobsen Ark.
- Toymið SNA Ark.
- Toymið Árni Winther Ark.

23. november 2016 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og vóru tey latin navnloynt soleiðis, at dómsnevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

2. desember 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat uppskot skal vinna hugkappingina og fáa møguleika at innganga møguliga avtalu um projektering vm. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

Hetta mál er tengt at máli 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið vm., ið eisini er til viðgerðar í løtuni.

Á løgukonto 5775 L5610 eru umleið 7.000 tkr. tøkar til verkætlanina. Ætlanin er í næstum at fara undir nærri greiningar og samráðingar við vinnandi hugskotið og koma aftur til nevndarviðgerð við nærri greining av heildarkostnaði, tíðarætlan, útboðsleisti og fíggjarætlan.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, mentamálaleiðari og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini um vinnandi hugskotið og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um møguliga projektering, umframt gerð av tíðarætlan, útboðsleisti, fíggjarætlan vm. og venda aftur til nevndina við einum uppskoti. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Mælt verður til at skipa bygginevnd í sambandi við nýggja langhylin samsvarandi vanligu mannagongdini fyri verkætlanir, har býráðið velur 2 limir.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mælir býráðnum til at velja tveir limir í bygginevndina fyri nýggjum langhyli.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vórðu Bergun Kass og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**

Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti:**
Á løgukarminum fyri 2017 eru játtaðar 4.798 tkr. á konto 5775 mentan og frítíð.

Í fjør var hugskotskapping um verkætlanina, ið toymið við SNA ark. v.fl. vunnu. Sbrt. kappingartreytunum fingu tey bæði toymini sum luttóku, men ikki vunnu, 200 tkr. fyri luttøkuna.

Seinni í heyst kemur ætlandi til viðgerðar uppskot til sáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið um projektering av verkætlanini.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 420 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 16. oktober 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**:
Tekstur kemur mánadagin.

**Ískoyti**
Serstaka nevndin fyri langhyl hevði fund 7. feb. 2018.

Soleiðis var ført í fundarfrásøgnina: "*3. Viðv. tíðarætlan og samráðingunum um projekteringssáttmála. Uppskot um projekteringssáttmála umleið 7 mió. kr. Tøkar eru umleið 4,5 mió. kr. í løgukarminum í 2017. Tað, sum er á karminum, er ikki flutt í 2018 enn. Hinvegin, hvat ið er tøkt, verður vantandi endaligt í mars 18. Stjórnin metir, at projektið eigur at vera forskotið, til fíggingin er tøk til samlaðu projekteringina og rúm er í íløguætlanini fyri byggikostnaðinum. Fundur hevur verið við SNA-toymið um at forskjóta projektið til ársskiftið 18/19. Málið verður lagt fyri mentamálanevndina á einum komandi fundi. Fyribils meting hjá teknisku fyrisiting er, at projektering tekur umleið 1 ár (við fyrivarni) + útbjóðing 2-3 mánaðir.*

*Heðin Mortensen metir ikki, at projektið eigur at útsetast, tí 4,5 mió. kr. eru avsettar í 2017, og eiga at verða fluttar yvir í 2018. Við at avseta restfígging í 2019, verður komið á mál við projekteringini. Síðani avseta pening til bygging av svimjihøllini á íløguætlanini fyri komandi árini."*

Fráboðað er Havnar Svimjifelag og Svimjisamband Føroya at projektering ætlandi verður planløgd at byrja um árskiftið 2018/19. Í sambandi við gerð av fíggjarætlan fyri 2019 verður ætlandi gjørt eitt uppskot til fíggingarætlan fyri projektering og bygging av langhyli. Vent verður aftur í nevndina við málinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við at projekteringin verður sett at byrja um ársskiftið 2018/19 og at fígging til projektering og bygging verður tikin upp í sambandi við fíggjarætlan 2019.

**Mentamálanevndin 07. mars 2018:** Ein meiriluti, Turið Horn, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus, krevja málið fyri býráðið.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Heðin Mortensen, Odd Færø, Bjørghild Djurhuus, Bjørg Dam, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein seta fram soljóðandi broytingaruppskot:

Mælt verður til, at projekteringin av langhylinum fer í gongd beinanvegin, at 4,5 mió. kr., avsettar á fíggjarætlanini 2017, verða fluttar til fíggjarárið 2018, og at restfígging, umleið 2,5 mió. kr. at fíggja projekteringina, verður avsett í sambandi við fíggjarætlanararbeiðið 2019.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið, ið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Odd Færø, Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørghild Djurhuus og Bjørg Dam.

Ímóti: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá meirilutanum í mentamálanevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Heðin Mortensen.

Blankt atkvøddi: Odd Færø.

**Ískoyti**
Á løgukarminum 5775 mentan og frítíð fyri 2018 eru framfluttar 5.029 tkr. Umsitingin er í holt við at samráðast um ráðgevarasáttmála við vinnandi ráðgevaratoymið og kemur ætlandi í nevnd við málinum í oktober/november 2018 soleiðis at projekteringin kann byrja í desember 2018/januar 2019. Tørvur er at hava tøkan pening á projektkontuni í sambandi við samráðingarnar v.m., ið er í gongd í løtuni.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at játta 5.029 tkr. av løgukarminum konto 5775, mentan og frítíð á projektkonto L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 12. september 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Heðin Mortensen og Turið Horn vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. september 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. september 2018:** Einmælt samtykt.

## Ískoyti:

**UPPSKOT Í GERÐ!!!!!**

Serstaka nevndin (bygginevndin) fyri gerð av langhyli, hevur á fundi 16, 20 og 2x. november 2018 samtykt at taka undir við samráðingarúrslitinum frá samráðingunum um ráðgevarasáttmála við vinnandi SNA samtakið, ið fevnir um SNA umframt LBF og SMJ. Bygginevndin mælir til at høllin og hylurin verða breiðkað nakað, umframt at støða verður tikin til um verkætlanin eisini skal fevna um 2 terapihyljar.

Fylgjandi viðurskifti eru at viðgera nærri í sambandi við ráðgevarasáttmálan:

I. Stødd á langhylinum

Í sambandi við tilgongdina at gera ráðgevarasáttmála var 10. oktober 2018 fundur millum umsitingina, umboð fyri Svimjisambandið og Havnar Svimjifelag við Joaquin Pujol, formann í FINA (altjóða svimjisambandinum) Facilities Committtee um verkætlanina. Sí hjálagt fundarfrásøgn frá fundinum og niðurstøður.

Eftirfylgjandi hevur umsitingin fingið afturmelding frá Joaquin Pujol um, at frásøgnin er rættvísandi, og avtalað er, at tá nýtt skipanaruppskot er tøkt, ætlandi í fyrsta ársfjórðingi 2019, verða nýggj frágreiðing og tekningar sendar FINA til viðmerkingar, har støða er tikin til ymisku viðurskiftini, sum vórðu viðgjørd á fundinum í okt. 2018. Herundir sonevnt flow í høllini í sambandi við kappingar, um pláss til áskoðarar, miðlar, VIP etc. og um karmar til sjónvarp, lýsingar o.a.

Við støði í samskiftinum við FINA hevur bygginevndin viðgjørt, hvørt tað er hóskandi at breiðka hylin og høllina nakað. Semja er um, at tað er mest hóskandi at hava 10 geilar á 2,5 m. hvør, í staðin fyri 8 geilar á 2,5 m. umframt 0,5 m. skvatligeil í hvørjari síðu. Við hesi broyting verður hylurin betri egnaður til kappingar, umframt at hann fær enn betri nyttuvirði í mun til dagligu og fjølbroyttu nýtsluna hesi komandi 3-4 áratíggjuni. Vansin við hesi broyting er, at hylurin gerst størri, og harvið eisini vatnnøgdin, ið skal hitast og viðgerast størri, umframt at høllin gerst tilsvarandi breiðari. Nevndin er samd um at longdin framhaldandi verður 50 m., umframt 1 m. afturat til eina flytiliga brúgv, so til ber at býta hylin uppá ymiskan hátt bæði til 25 m. langar geilar og samansett 25 m./50 m. langar geilar.

Annað týðandi høvuðsmál er, at høllin má gerast nakað breiðri enn í verandi støðu. Hetta serliga við atliti til at kunna seta upp fyribils áskoðarapláss (rúma fleiri áskoðarum til serligar kappingar), pláss til officials, sjónvarping, lýsingar o.a. Í tí dagliga kann øki brúkast til venjingar, upphiting, avseting o.a. Samanlagt verður høllin breiðkað til umleið 46 m. Á hjáløgdu mynd sæst, hvussu bygningurin fyllir byggiøkið í plan. Kostnaðurin av hesi broyting er í lýstur í skjali x.

II. Nýggjur innandura smábarnahylur/terapihylur og uttandura terapihylur

Í kappingaruppskotinum, ið vann, var á tekningunum lýst ein loysn við uttandura terapihyli, umframt einum serligum heitvatns-terapihyli innandura í millumøkinum millum bygningarnar. Hesin er serliga hugsaður til smærri børn, umframt til onnur, ið ynskja møguleikan at vera í einum serliga heitum hyli við terapi og vælveru í huga. Hugsanin er, at rúmið skal vera lutfalsliga lágt og tætt, soleiðis at tað er lættari at halda ein høgan hita. Meirkostnaðurin av uttandura terapihylinum og innandura terapihylinum eru lýstir í skjali x.

Bygginevndin metir at gerð av hesum báðum ískoytisverkætlanum er áhugaverd í sambandi við at umgera Svimjihøllina til ein vatndepil við vælveru, rørslu og kappingum.

III. Fleiri brúsur og skiftirúmsviðurskifti

Í byggiskránni er viðgjørt viðv. táverandi heitvatnsskipan til brúsurnar og tørv á fleiri brúsum.

Í 2017 bleiv heitvatnsskipanin til brúsurnar endurnýggjað. Í 2019 er ætlanin at greina møguleikarnar fyri útbyggingum við fleiri brúsum (óheft av langhylsverkætlanini). Miðrúmini í skiftingarrúmunum, har tað áður vóru sólir, kunnu umgerast soleiðis, at har ber til at gera fleiri brúsur. Í 2018 eru skápini í skiftingarrúmunum endurnýggjaði, og ber lutfalsliga lætt til at økja um talið av skápum. Eisini eru viðurskiftini hjá fólki, ið bera brek, og sum hava tørv hjálp til skifting o.a. tørv á at gerast betri í verandi høll. Hetta verður eisini tikið upp í 2019.

III. Ráðgevarasáttmálin og kostnaður

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum. Samlaða upphæddin fyri projektering er ásett til tkr. 11.500. Í hjálagda skjali er greining mettu av kostnaðarviðurskiftunum fyri verkætlanina við teimum ymisku valmøguleikunum.

Verður avgjørt at verkætlanini eisini skal geva um báðar terapihyljarnar hækkar kostnaðurin fyri projektering til tkr. 12.400.

Umframt sáttmála við SNA-samtakið, er ætlanin at hava tilknýttar 2 byggiharraráðgevar t.e. Sp/f Ráð til almenna byggiharraráðgeving og byggileiðslu í sambandi við byggingina, umframt DTI til ráðgeving og eftirlit í sambandi við hylja- og vatntøkniveiting. Hædd er tikin fyri hesum í kostnaðarmetingini.

Á løgukontu L57015 Svimjihøll eru umleið 4,9 mio.kr. tøkar til projektering o.a. Tørvur er á umleið 4 mio.kr. afturat í 2019 til projektering.

Sbrt. tíðarætlanini byrjar projektering í desember 2018 og gongur fram til á várið 2020. Hareftir skal støða takast til útbjóðing og er hugsandi at byggingin kann byrja í august 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin, deildarleiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja:

a). at hylurin og høllin verða breiðkað

b). og mæla nevndini til at ráðgevarasáttmálin fevnir um projektering av uttandura heitvatnshyli og innandura heittvatns/terapihyli, og við teimum tillagingum at innganga ráðgevarasáttmála við SNA-samtakið um projektering av langhyli. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 28. november 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 05. desember 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Neyva sáttmálaupphæddin fyri ráðgevarasáttmálan (sbrt. samtykt í mentamálanevndini og fíggjarnevndini) er kr. 12.346.671.

**Býráðsfundur 13. desember 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Projektering av langhylsverkætlanini er í gongd. Til verkætlanina í ár eru 4.136 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Saman við framflyting á projektkontuni verða umleið 8.705 tkr. tøkar til verkætlanina í ár og verður tað mett hóskandi í mun til løgdu ætlan fyri projektering v.m.

**Tilmæli**

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.136 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 08. mai 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. mai 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. mai 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Á fundinum koma umboð fyri bygginevnd og ráðgeva at leggja fram nýggjasta skipanaruppskotið, kostnaðarmetingar o.a. Bygginevndin er í fer við at leggja seinasta hond á viðgerðina og er endaligt tilmæli ávegis.

Sí hjálagt skjal við skipanaruppskotinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórnin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at umrøða framløguna.

**Mentamálanevndin 17. juni 2019:** Umrøtt.

**Býráðsfundur 20. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Mentamálanevndin 24. juni 2019:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Bygginevndin (Serstaka nevndin fyri at fyrireika nýggjan svimjihyl) hevur á fundi 28. juni 2019 samtykt hjálagda skipanaruppskot. Tó so at bygginevndin ynskir at ráðgevin í víðari tilgongdini kemur við eini nøktandi takloysn, umframt kemur við uppskotum til møguligar sparingar og hvussu bygningurin kann fáa ein enn betri orkuprofil. Í mun til viðgerðina seinast, er uppskotið rættað til við støði í samtyktunum í málinum í nov-des. 2018. Harumframt hevur ráðgevin saman við bygginevndini gjøgnumgingið málið við eini longri røð av áhugapørtum innan svimjing t.e. skúlar, dagstovnar, feløg, sersamband, KVF etc. og rættað ymiskt til. Sbrt. galdandi mannagongdum skal skipanaruppskot í byggiverkætlanum góðkennast í avvarðandi nevnd, fíggjarnevnd og býráði.

Eisini er uppskotið viðgjørt við altjóða svimjisambandið FINA saman Svimjisambandi Føroya – sí hjálagt teirra metingar. Bygginevndin metir, at verkætlanin er slóðbrótandi og kann vera ein framtíðartryggjaður karmur um alskyns svimjivirksemi langt fram í tíðina og eisini gera tað møguligt at bjóða seg fram til eina røð av fleirlanda svimjikappingum.

Við støði í skipanaruppskotinum er gjørd kostnaðarmeting, sí hjálagt.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, leiðarin á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja hjálagda skipanaruppskot og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ískoyti:**
Byggiskráin fyri langhylin fevnir ikki um at víðka um skiftirúms- og brúsuviðurskiftini. Skipanaruupskotið leggur upp, at øll almenn atkomu- og skiftirúmsviðurskifti framhaldandi verða í verandi høll.

Sum upplýst í málinum til býráðsviðgerðina í desember 2018 viðvíkjandi ráðgevarasáttmálanum, fer nýggja høllin at hava økt virksemi og økt tal av brúkarum við sær.

Metast má týðandi eisini við atliti at víðari prosjekteringini, at fingið verður til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, og sum á

nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum. Útreiðslur til hesa bygging liggur uttanfyri kostnaðarmetingina fyri langhylin annars.

Til tess at fáa uppskot til vega skal roknast við ávísum útreiðslum til ráðgeving v.m. Mælt verður til at geva umsitingini heimild til at biðja um tilboð hesum viðvíkjandi.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at fáa til vega ítøkiligt uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum, og at umsitingin fær heimild til at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi.

**Mentamálanevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við tilmælinum um at samtykkja skipanaruppskotið og tilmælinum um at fáa til vega uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu, og at umsitingin fær heimild at biðja um tilboð til ráðgeving hesum viðvíkjandi. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 03. juli 2019:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2019:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Projekteringin av langhylsverkætlanini er nú komin væl áleiðis og verður væntandi liðug í mai 2020 og kemur málið um góðkenning av høvuðsprojektinum, umframt útbjóðing til støðutakan í nevndum og býráð.

Til verkætlanina í ár eru 4.000 tkr. ætlaðar av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg í 2019. Harumframt verður væntandi í apríl 2020 ein framflyting av tøkari játtan á projektkontuni frá 2019. Upphæddin er ikki endalig tøk enn, men fer í høvuðsheitum til at gera projekteringina lidna. Játtanin í 2020 fer ætlandi til at kunna byrja útinningina av verkætlanini í heyst t.e. í høvuðsheitum talan um burturbeining av ÍSF-húsinum, rigga byggipláss til og byrjan uppá jørð- og lendisarbeiðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja at flyta 4.000 tkr av løgukontu 5775 Ítróttaanlegg á projektkontu L57015 Svimjihøll. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2020**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2020:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. apríl 2020:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**:
Í sambandi við fyrireiking av langhylsverkætlanini er søkt um byggiloyvi til útinning av verkætlanini.

18. mai 2020 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin í máli 20/01266 Umsókn um byggiloyvi til langhyl í Gundadali matr. 1268a, Tórshavn, at "at loyva umsitingini at geva byggiloyvi, treytað av at neyðug parkeringspláss verða gjørd og annars við teimum treytum, ið umsitingin setur." Sí hjálagt yvirlit yvir p-pláss í økinum.

Í málinum framgongur at tað skulu útvegast 80 p-pláss afturat. Í upprunaliga málinum er avrátt at p-viðurskifti í Gundadali skulu viðgerast í eini heild og inngongur m.a. í mál 18/03453 Skipan av Gundadali, ið ætlandi kemur til viðgerðar í juni 2020.

Hetta kravið er ein týðandi broyting í fyritreytunum í verkætlanini, bæði ráðleggingarliga, praktiskt og fíggjarliga. Hinvegin so má roknast við, at verkætlanin fær skotbrá inntil byggiverkætlanin er liðug til at fáa hesi útvegað, væntandi um ársskiftið 2022/23.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka til eftirtektar kravið um fleiri parkeringspláss sum liður í langhylsætlanini.

Málið verður beint til ummælis í teknisku nevnd.

**Mentamálanevndin 10. juni 2020:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í teknisku nevnd.

**Ískoyti**
Projekteringin
Verkætlanin er nú liðug projekterað og fyriliggur nú eitt sonevnt høvuðsprojekt (t.e. fullfíggjað projektering), ið er blivið granskað innanhýsis í teknisku fyrisiting, umframt hjá øðrum uttanhýsis serkønum ráðgevum.

Mett verður at tilfarið nú hevur eina dygd, ið er nøktandi til útbjóðingina. Í løtuni verða seinastu smálutirnir passaðir til áðrenn útboð.

Byggiloyvið
Verkætlanin hevur fingið byggiloyvið (sí hjálagt skjal) og er har nú ásett at verkætlanin skal útvega 42 p-pláss í nærumhvørvinum. Mett verður, at hetta ber til at loysa í nærøkinum og fáa liðugt projekterað og útinnt í 2021/2022 áðrenn Langhylurin verður tikin í nýtslu. Tekniska deild og býarskipanardeildin undir teknisku fyrisiting mæla til og leggja fyri býarskipanarnevnd og teknisku nevnd eitt ella fleiri øki í ella nærhendis Gundadali til minst 42 pláss og verður hetta loyst sum ein atknýtt men fyri seg verkætlan at prosjektera og standa liðug áðrenn langhylurin verður tikin í nýtslu. Fyribils mettur kostnaður til hetta er um 6 mió. Eitt sindur skal játtast til fyrireiking og prosjektering fyrst.

Útbjóðingartilfar
Talan er um eina útbjóðing í høvuðsarbeiðstøku sbrt. ABF06. Skotið verður upp at bjóða 5 feløgum til at luttaka í innbodnari lisitatión.

Stálhyljaviðurskifti
Í útbjóðingartilfarinum verður tilskilað, at tilboð skal fáast frá tveimum útvaldum veitarum av stálhyljaloysnum og at høvuðsarbeiðstakarin hevur viðskiftini við veitaran um hendi, tó eftir nærri góðkenning byggiharrans. Hesir báðir veitararnir eru útvaldir eftir eina umfatandi tilgongd.

Ráðgevaraleiklutir
Sbrt. ráðgevarasáttmálanum við Sp/F SNA er fyrivarni tikið fyri at byggileiðsla kann vera latin til annað felag at útinna. Hetta m.a. fyri at tryggja eina sterkari stýrings- og eftirlitsskipan kring verkætlanina. Skotið verður tí upp at byggileiðslan í verkætlanini verður latin til annað felag. Ætlanin er at sama felag eisini veitir ávísa byggiharraráðgeving eftir tørvi í sambandi við sáttmálasamráðingar og onnur yvirskipaði viðurskifti.

Kostnaðarmeting
Í hjálagda fylgiskjali eru nærri greiningar og metingar viðv. kostnaðinum fyri verkætlanina, bæði hondverkaraútreiðslur (HVÚ) og aðrar útreiðslur í verkætlanini. Av kappingar- og marknaðarávum verða tølini ikki lýst í tekstinum og verður tí frámælt til varðsemi við at nevna tøl alment.

ÍSF-húsið
Víst verður til mál 16/01715 Avtala við Ítróttasamband Føroya um ÍSF-húsið, ið er til viðgerðar á hesum

sama fundi. Ætlandi verður farið undir niðurtøku av húsinum í oktober 2020. Húsaumsitingin kemur at standa fyri arbeiðinum og verður útreiðslan goldin av langhylsverkætlanini.

Tíðarætlan
Útbjóðing av verkætlanini 25 august til ultimo september.
Samráðingar um sáttmála ultimo september til ultimo oktober.
Niðurtøka av ÍSF-húsinum oktober 2020
Spakin settur í – ultimo oktober 2020

Bygging til árskiftið 2022/2023.

Rúmari umstøður til skifting og brúsu
Vísandi til samtykt í máli 19/03559 verður spurningurin um rúmari umstøður til skifting og brúsur í verandi svimjihøll loyst serskilt. Málið kemur aftur fyri í nevnd í heyst.

Grannalagsviðurskifti
Umsitingin hevur í 2019 verið á fundi við grannarnar og greitt frá verkætlanini og viðurskiftini kring byggiarbeiðið v.m. Grannar hava sum heild ymisk fyrivarni fyri spronging, larmi, dusti v.m. í sambandi við byggiarbeiðið, umframt ivamál viðv. hæddini á bygninginum. Umsitingin hevur svarað hesum eftir besta førimuni. Onnur og meiri kunning verður eftir ætlan fyriskipað áðrenn og meðan arbeiðið er í gongd.

Innrættan av byggiplássi og trygd í økinum
Saman við ráðgevanum er gjørd ein ætlan, ið eisini tekur hædd fyri ferðsluni og trygdini í økinum sum heild. Henda ætlan verður partur av HTU-ætlanini í verkætlanini og fylgt upp regluliga saman við verkætlanarleiðsluni og leiðsluni í Svimjihøllini.

Bygginevndin
Bygginevndin fyri verktætlanina hevur viðgjørt málið á fundi 21. august 2020.

Bygginevndin hevur nýggjan fund mánadagin 24. august 2020.

Á fundi í bygginevndini 24. august 2020 varð samtykt at biðja um heimild at kunna bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til:
a). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku til 4-5 feløg
b). at heimila umsitingini at samráðast við bílígasta tilboðsgevara um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð, og
c). at heimila umsitingini at gera avtalu við ráðgeva um at hava byggileiðsluna um hendi.

Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. august 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam, samtykti at taka undir við:

a). at heimila umsitingini at bjóða verkætlanina út í høvuðsarbeiðstøku til 4 feløg
b) at heimila umsitingini at samráðast við bílígasta tilboðsgevara um sáttmála at leggja fyri nevnd og býráð, og
c). at heimila umsitingini at gera avtalu við ráðgeva um at hava byggileiðsluna um hendi.

Harumframt verður heitt á teknisku nevnd um at viðgera mál um fleiri parkeringspláss.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, atkvøður blankt vísandi til, at áðrenn arbeiðið verður boðið út, eiga fleiri ósvaraðir spurningar í málinum um langhylin at verða svaraðir.

**Fíggjarnevndin 25. august 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunnvør Balle, tekur undir við Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, atkvøður blankt vísandi til, at áðrenn arbeiðið verður boðið út, eiga fleiri ósvaraðir spurningar í málinum um langhylin at verða svaraðir, herundir hvussu verkætlanin verður fíggjað.

**Býráðsfundur 25. august 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og 2 blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

**Ískoyti:**
Licitatión
1. oktober 2020 var licitatión í sambandi við útbjóðing av verkætlanini. Fýra feløg vóru boðin við í innbodnari licitatión. Inn komu trý tilboð. Sp/f Húsavarðatænastan lat ikki inn boð, hóast fyritøkan hevði sagt seg vilja bjóða.

Øll tilboðini, herundir allir postar í tilboðslistanum eru eftirkannaði og gjøgnumgingin og verður mett at øll trý tilboðini lúka treytirnar í útbjóðingartilfarinum og at tilboðið hjá J&K Petersen framhaldandi er lægst.

Sí endaliga yvirlitið her:

| Arbeiðstakarar | Tilboðsupphædd HVÚ | Eíndarprísur / optiónir | Samlað tilboð | Nr. |
|---|---|---|---|---|
| Articon P/F | 145.121.780,00 | 3.558.791,00 | 148.680.571,00 | 2 |
| Búsetur Sp/f | 156.249.015,00 | 3.652.428,00 | 159.901.443,00 | 3 |
| J & K Petersen Contractors P/F | 144.753.761,73 | 2.541.420,25 | 147.295.181,98 | 1 |

Viðv. avtalu við Tórshavnar havn um grót
Eftir at licitatiónin hevur verið, er tað, sbrt. ætlan, eydnast at fáa í lag semju við Tórshavnar havn at lata umleið 20.000 m3 grót til bátahylsverkætlanina í Álakeri. Hetta inniber eina ávísa sparing, tí annars skuldi grótið koyrast á goymslu í Húsahaga. Langhylsverkætanin skal tí ikki rinda nakað fyri koyring v.m. av hesi nøgdini. Hetta er longu innroknað í kostnaðarmetingina, men er treytað av at verkætlanin fer í gongd í næstum.

Sáttmálasamráðingar
Við støði í gjøgnumgongdini sum umrødd omanfyri, var í oktober 2020 farið undir samráðingar við P/F J&K Petersen um sáttmála. Tað hava verið fýra tingingarfundir, har partarnir hava gjøgnumgingið tilboðið hjá J&K Petersen, herundir tey ymisku fakini fyri at eyðmerkja møguligar avbjóðingar, óvissur og evt. manglar í verkætlanartilfarinum, og eisini um møguleikar fyri at taka onkrar postar út úr veitingini ella vita, um tað ber til at gera møguligar tillagingar, ið kunnu antin betra verkætlanina og/ella minka um kostnaðin.

Tað vísir seg at vera nakrir upplagdir møguleikar fyri at minka um kostnaðin, og sum ikki broyta nakað av týdningi viðv. dygd og funktión. Samstundis er greitt, at í nøkrum førum eru eyðmerkt nøkur viðurskifti og veitingar, ið mangla í nøgdarlistanum og útboðstilfarinum. Hetta inniber ein ávísan meirkostna.

Eisini hava samráðingar verið fyri at kanna, um tað ber til at minka um óvissur við at læsa ymisk viðurskifti í sáttmálanum. Eitt nú óveðursdagar, prís- og lønarvøksur, ávísar nøgdir í nøgdarlistanum v.m., men hevur tað ikki eydnast at fáa eina nøktandi semju um hesar postar, m.a. vegna ov stutt skotbráð hjá bæði arbeiðstakara, ráðgevum og kommununi at fáa lýst hesar óvissur og at kostnaðarmeta tær.

Byggitíðin og trygd í økinum
Undir samráðingunum er eisini komið fram, at neyðugt verður at leingja byggitíðina, tó enn óvist hvussu nógvar mánaðir, hetta m.a. fyri at kunna tilrættisleggja lendis- og speingiarbeiðið meiri skynsamt í mun til umhvørvið kring byggiplássið og herundir fyri at hava trygdina í økinum í hásæti. Longd byggitíð vil bera eyka kostna við sær til byggiplássrakstur, sum full greiða ikki er á. Kostnaðarskjalið tekur hædd fyri møguligari longdari byggitíð.

Óvissur og váðar
Gjøgnumgongdin higartil hevur eisini eyðmerkt nakrar óvissur, ið eru loystar, men hevði tað tað eisini hevði verið ynskiligt at fingið greinað og avklárað nakrar aðrar óvissur nærri og soleiðis minkað um váðan. Talan kann vera um 2-3 mio.kr.

Til tess at nágreina hesi viðurskifti krevst ein tilgongd á nakrar vikur. Í tann mun tað ikki verður gjørt, vil tann óvissan fara av postinum til ókent.

Sáttmálaupphædd/hondverkaraútreiðslur (HVÚ)
Við tillaginunum sum nevndar omanfyri verður komið fram til eina sáttmálaupphædd (HVÚ) á 147.500 tkr. uttan kommunalt MVG.

Heildarkostnaður og fígging
Greitt verður á fundinum frá heildarkostnaðurin fyri verkætlanina. Til tess at fíggja verkætlanina verður neyðugt at seta av umleið 65 mio.kr í fíggjarætlanini fyri 2021. Restupphæddin verður at fíggjað í 2022 og 2023.

Gjalds- og tíðarætlan
Í sambandi við samráðingarnar hevur kommunan biðið J&K Petersen um at koma við eini gjalds- og tíðarætlan fyri verkætlanina. Henda er ikki komin enn, men verður ein fyritreyt fyri at innganga ein sáttmála. Mett verður at útreiðslurnar í 2020 í mesta lagi vera umleið 2.500 tkr og eru hesar tøkar á projektkontu L57015 Svimjihøll.

Manningarlisti – lyklapersónar
Sum liður at tryggja eina skikkaða manning í leiðsluni av verkætlanini, hevur J&K Petersen latið TK ein lista yvir lyklapersónar í felagum, ið koma at arbeiða við verkætlanini. Umsitingin er nøgd við listan.

Tryggingarviðurskifti
Til verkætlanina hevur Tórshavnar kommuna teknað eina projektábyrgdartrygging fyri projekteringina v.m. og kemur í sambandi við høvuðsarbeiðstøkuna at tekna eina arbeiðstøkutrygging, herundir spreingitrygging í sambandi við at arbeiðið byrjar.

**Atknýttar verkætlanir**
*- Brúsu- og skiftirúmsviðurskifti í verandi høll*
4. juli 2019 samtykti býráðið at fáa útvega ítøkiligt uppskot til rúmari umstøður til skifting og brúsu v.m. hjá brúkarum sum heild og hjá brúkarum við rørslutarni, sum á nøktandi hátt megnar at taka ímóti økta virkseminum. Málið er viðgjørt nakrar ferðir í mentamálanevndini og kemur endaligt tilmæli væntandi fyri á fundi í mentamálanevndini 16. november 2020 (sí mál 19/03559 Svimjihøllin í Gundadali: Rúmari umstøður til skifting og brúsu). Sí hjálagt tekning av loysn E og tilhoyrandi kostnaðarmeting. Talan er um eina verkætlan, ið kann fremjast í stigum t.d. yvir 2-3 ár.

*- Parkeringsviðurskifti*

Í summar var spurningurin um útvegan av 42 parkeringsplássum viðgjørdur og samtykt at serstakt mál skuldi fyrireikast til at loysa tað. Tilgongdin er byrjað og kemur tilmæli væntandi í fyrsta ársfjórðingi í 2021. Byggiloyvið treytar, at hesi eru tøk áðrenn ein komandi høll verður tikin í nýtslu – væntandi í 2023.

Hesar atknýttu verkætlanir eru ikki fíggjaðar í langhylsverkætlanini.

Viðgerð í bygginevndini
Bygginevndin hevur viðgjørt málið á nøkrum fundum og seinast á fundi 6. november 2020, og hóast stutt skotbrá, metir meirilutin (Bergun Kass, Birita Wardum, Brynhild Setberg og Sigurð Vang) av bygginevndini, at tað ber til at innganga sáttmála við P/F J&K Petersen, treytað av hóskandi upphædd til ókent og møgulig tilkeyp. Mett verður, at óvissurnar í verandi støðu, kunnu rúmast í avsettu upphæddini.

Ein minniluti í bygginevndini, Heðin Mortensen, tekur støðu á seinni fundi, vegna ov stutt skotbrá og vantandi heildarupplýsingar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin vísa til lýsingina omanfyri og mæla til:

a). at taka støðu til høvuðsarbeiðstøkusáttmála á 147.500 tkr. (uttan mvg) við P/F J&K Petersen. Útreiðslurnar í 2020 vera at rinda av tøkari upphædd á løgukontu L57015 Svimjihøll.

b). at taka støðu til at játta 65.000 tkr. í fíggjarætlanini fyri 2021 og restina av fíggingini í 2022 og 2023, og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 06. november 2020:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal og Bergun Kass, samtykti at taka undir við punkt a) hvat viðvíkur sáttmálaupphæddini og fíggingini í 2020 og b), og harumframt at heimila umsitingini at gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála við P/F J&K Petersen.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, tekur støðu á seinni fundi, vegna ov stutt skotbrá og vantandi heildarupplýsingar.

**Fíggjarnevndin 06. november 2020:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle, tekur undir við meirilutanum í Mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Tróndur Sigurðsson, tekur undir við minnilutanum í Mentamálanevndini.

**Býráðsfundur 06. november 2020:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í Fíggjarnevndini, ið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Formaðurin setur málið á skrá.

Sum upplýst í málslýsingini til nevndar- og býráðsviðgerðina í november 2020, eru atknýttar verkætlanir, ið ikki eru fíggjaðar. Talan er um nýggj brúsu- og umklæðingarrúm, harundir eisini til tey, ið bera brek, og at útvega tey í byggiloyvinum kravdu parkeringsplássini.

Mett verður neyðugt at fáa hesar verkætlanir neyvari útgreinaðar og kostnaðarmettar, soleiðis at hesi viðurskifti kunnu verða fíggjað og klár at taka í nýtslu í seinasta lagi samstundis sum langhylurin er liðugt bygdur.

Viðvíkjandi tørvinum á nýggjum brúsu- og umklæðingarrúmum er ynskið ein loysn, sum ikki grípur inn í gomlu høllina, men soleiðis, at báðar hallirnar kunnu virka leysar av hvørjari aðrari.

Ynskið er harumframt at kanna møguleikarnar fyri einfaldari takkonstruktión.

Hesi viðurskifti – brúsu- og umklæðingarrúm, parkeringspláss, og einfaldari takkonstruktión, skulu kostnaðarmetast hvør sær og fyri samlaðu langhylsverkætlanina.

Ynskið er eisini um at fáa uppskot til, hvussu man kann betra um umstøðurnar og tilboðini til barnafamiljurnar.

Heitt kann verða á ráðgevan um at gera hesi uppskot og kostnaðarmetingar. Skotið verður upp at játta kr. 800.000 til endamálið fíggjað av verandi langhylsjáttan 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2021:** Ein meiriluti, Annfinn Brekkstein, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen, tekur undir við at heita á ráðgevan um at gera hesi uppskot og kostnaðarmetingar, og at játta kr. 800.000 til endamálið fíggjað av verandi langhylsjáttan 5775 Ítróttaranlegg L57015 Langhylur. Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Ruth Vang, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2021:** Ein minniluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, tekur undir við mentamálanevndini og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Annika Olsen og Elsa Berg, atkvøður blankt.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 28. oktober 2021:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, Annfinni Brekkstein og Heðini Mortensen, ið varð samtykt við 9 atkvøðum fyri, 3 ímóti og einari blankari.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddi: Annika Olsen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Jón Kragesteen og Gunnvør Balle.

**Ískoyti:**
Arbeiðið á byggiplássinum í sambandi við gerð av langhyli v.m. hevur nú verið í gongd í eitt gott ár, og er verkætlan gjøgnumgingin við atliti il at tryggja dygdina v.m.

Tørvur er tí nú á at fáa staðfest heildarkosnaðin fyri verkætlanina. Metingin er enn óbroytt síðani viðgerðina og samtyktina um høvuðsarbeiðstakarasáttmála í endanum av 2020.

Bygginevndin hevur við støði í meting hjá bygningsdeildini og byggiharraráðgevnaum ásett heildarkostnaðin til 211.797 tkr. Á fundinum verður kostnaðarskjal gjøgnumgingið.

Mett verður at tørvur verður á fylgjandi upphæddum á fíggjarætlanum komandi árini:

2022 – 40 mio.kr.
2023 – 75 mio.kr.
2024 - 35 mio.kr.

umframt upphæddin parkering og møgulig upphædd í sambandi við skiftirúmsviðurskifti. Sí seinni í tekstinum.

Í sambandi við viðgerðina á heysti 2020 varð eisini viðgjørt evnini viðv. parkeringsviðurskiftum og skiftirúmum.

**Viðv. parkeringsloysn**
Umsitingin og ráðgevar hava verið í dialogi við byggimálsdeildina og hava funnið fram til eina loysn at nøkta nýggja tørvin á parkeringsplássum í nærumhvørvinum. Talan er um eina loysn har umleið helvtin av teimum 45 eyka plássunum verður funnin við Eysturskýlið á Tórsvølli og hin helvtin við Vestara skýlið við Ovara vøll.

Kostnaðarmetingin er umleið 4,9 mio.kr. til 45 nýggj pláss og kann vera framt í 2022 um tøk fígging verður og annars í 2023. Henda (hetta kemur afturat teimum 211.797 tkr.)

**Viðv. eyka skiftirúmum**
Í málunum er samtykt at kanna ymsar møguleikar, men er tað ikki komið á mál. Greitt verður á fundinum frá ymiskum hugsaðum loysum og mettum kostnaðum.

**Viðgerð í nevnd og býráð**
Vegna atlit til sáttmálaviðurskifti, útbjóðingar- og kappingarviðurskifti v.m. verður mælt til at málið verður viðgjørt á býráðsfundi fyri stongdum hurðum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin á bygningsdeildini og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at samtykkja ein heildarkostnað fyri langhylsverkætlanina á 211.797.000 kr.

**Mentamálanevndin 09. februar 2022:** Samtykt, at heildarkostnaðurin fyri langhylsverkætlanina er kr. 211.797.000 við tí viðmerking, at upphæddin ikki fevnir um parkeringsloysn og nýggj skifti- og brúsirúm, harundir til rørslutarn. Málið at beina í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býraðið við teirri viðmerking, at kostnaðurin er íroknaður kommunalt mvg.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 43/22 Dagføring av Norðara Ringvegi við Norðurlandahúsið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 02.06.2021 | 11/21 | 21/02118-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 07.06.2021 | 34/21 | 21/02118-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 16.06.2021 | 159/21 | 21/02118-1 |
| 4 Býráðsfundur | 23.06.2021 | 187/21 | 21/02118-1 |
| 5 Tekniska nevnd | 07.02.2022 | 5/22 | 21/02118-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 44/22 | 21/02118-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 43/22 | 21/02118-1 |

**Lýsing av málinum**
Norðari Ringvegur hevur tørv á einari dagføring. Ferðslan, sum skal snara til vinstru inn til Norðurlandahúsið, er til ampa fyri ferðsluna, sum skal eystureftir á Norðara Ringveg.

Tað er tøvur á einum busslumma í sunnara borði av vegnum. Í dag steðgar bussurin mitt á vegnum, tað ger eisini, at ferðslan má steðga og fólk, sum koma úr bussinum, ikki vita hvar tey skula fara yvir um vegin.

Í sambandi við hesa dagføring er eisini nøktandi øki til súkklubreyt í sunnaru síðu, frá Áargeil 17 til rundkoyringina við Sundsvegin

Av tí at SEV er í holt við at leggja ein elkaðal í sunnaru gongubreyt, er tað eitt upplagt høvi at breiðka Norðara Ringveg nú.

Kostnaðarmetingin fyri prosjektið er uml. 1.500.000 kr. v/ kommunalum mvg.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Kort j.nr. 21/02118-2

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| **Býráðsfundur**<br>24. februar 2022 | Blað nr.: 215 |
|---|---|
| | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Frágreiðing um fíggjarlig viðurskifti**
Talan er um dagføring av ringvegnum við Norðurlandahúsið.

| | Rakstrarjáttan | Løgujáttan |
|---|---|---|
| **Samlaður kostnaður** | Dkk | Dkk 1.500.000 |
| **Kostnaður í hesum árinum** | Dkk | Dkk 1.500.000 |
| **Tíðarætlan (byrjan/endi)** | Dato | Dato: aug-okt 2021 |
| **Avleiðingar á rakstur** | | Dkk |

**Játtan:**

| | Á | | | Av | | | Lokað | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Upphædd íalt** | **Deild** | **Verkætlan** | | **Deild** | **Verkætlan** | | **verkætlan** | **Eykajáttan** |
| Dkk 1.500.000 | 8175 | nýggj | | 8175 | LK81042 | | | |
| **Útgreining:** | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |
| Dkk | | | | | | | | |

**Tilmæli:**
Ferðslubólkurin mælir til at taka undir við at Norðari Ringvegur verður dagførdur og breiðkaður, so pláss verður fyri vinstrasvingsbreyt til Norðurlandahúsið fyri ferðsluni eystureftir, buss lumma í sunnaru síðu, súkklubreyt í sunnaru síðu og gonguteigi við miðoyggj.

**Ferðslunevndin 02. juni 2021:** Ferðslunevndin tekur undir við tilmælinum frá ferðslubólkinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At taka undir við samtyktini hjá ferðslunevndini
- At seta verkætlanina í gongd
- At fíggja verkætlanina við kr. 1.500.000,00 av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan "Dagføring Norðari Ringvegur við Norðurlandahúsið"
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. juni 2021:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 23. juni 2021:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið við at dagførða Ringvegin framvið NLH er nú boðið út og lægsta boð átti J&K, sum er kr. 1.905.449,00 v. 6,25% mvg. Hetta er væl hægri enn tær 1,5 mió. kr., sum higartil eru játtaðar. Hædd skal eisini takast fyri óvæntað, 10%
Uppgongutíðin, ið er, hevur við sær at kostnaðarstøði er áleið 25% hægri enn vanligt. Tað sæst eisini á øðrum verkætlanum.
Um arbeiðið skal setast í verk, er neyðugt við einum ískoyti á kr. 600.000,-.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At taka undir við samtyktini hjá ferðslunevndini
- At seta verkætlanina í gongd
- At fíggja ískoyti við kr. 600.000,00 av konto 8175, LK81042, Vegaverkætlanir, á konto 8175, nýggj verkætlan “Dagføring Norðari Ringvegur við Norðurlandahúsið”
- At beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 44/22 Makaskifti við Rennibreytina og Yviri við Strond

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 35/22 | 21/04115-10 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 47/22 | 21/04115-10 |
| 3 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 44/22 | 21/04115-10 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við bygging av rennibreytini í 2005 var gjørt ein makaskiftisavtala millum eigaran á matr.nr. 1397 og Tórshavnar kommunu sum átti matr.nr. 1395, Tórshavn.

Hendan avtalan bleiv ongantíð avgreidd og nýggjur eigari er komin á matr.nr. 1393a, fyrrverandi matr.nr. 1395. Nýggi eigarin hevur sent Tórshavnar kommunu ein fyrispurning um makaskifti.

Tórshavnar kommuna ynskir í somu syftu at keypa ein part av matr.nr. 1393a, sum liggur sum vegøki.

**Lýsing av málinum**
Í 2005 samtykti býráðið eina makaskiftisavtalu millum ánaran av matr.nr. 1397 og Tórshavnar kommunu, í sambandi við at lendi skuldi útvegast til rennibreytina. Tórshavnar kommuna skuldi herumframt taka verandi garð niður, byggja hendan uppaftur og fríðka um lendið.

Hetta makaskifti er ongantíð avgreitt og nýggjur eigari er nú á matr.nr. 1393a, fyrrverandi matr.nr. 1395.

Nýggi ánarin av matr.nr. 1393a hevur sent ein fyrispurning um møguleiki er fyri fáa makaskifti avgreitt og um tað er møguligt at partur av matr.nr. 600a, Yviri við Strond, kann knýtast at makaskiftinum.

Matr.nr. 600a, Eystara bryggja 6, Tórshavn er partur komandi gøtu "*Gøtan kring Havnina og Fiskastykkið*". Ánarin av matr.nr.1393a, sigur seg verða sinnaður at virka fyri, at kommunan sleppur at gera gøtu, eina hangi brúgv ella annað niðan fyri matriklinum hjá ánaranum.

Makaskifti sum verður lagt fyri nevnd/ráð:
- Matr.nr. 1397 letur áleið 137,5 fermetrar til Tórshavnar Kommu
- Matr.nr. 1393a letur áleið 138,5 fermetrar til matr.nr. 1397
- Matr.nr. 600a (TK) letur áleið 138,5 fermetrar til ánara á matr.nr. 1393a.

Víst verður til skjøl:»*Makaskifti 600a*«, »*Staðseting matr.nr.600a*«, »*Makaskifti matr.nr. 1397 og matr.nr.1393a*« og »*Staðseting við Rennibreytina*«

Tórshavnar kommuna ynskir at rudda upp í matrikkulviðurskiftinum á og við Rennibreytina. Kommunan ynskir tí at keypa ein vegstubba, ið liggur sum partur av matr.nr. 1393a., á áleið 103 fermetrar. Víst verður til skjal »*Keyp av vegøki*«.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Býararkitekturin mælir til at ein avtala verður gjørd við ánaran av matr.nr. 1393a, sum tryggjar at "*Gøtan kring Havnina og Fiskastykkið*" kann húsast á matr.nr. 600a, hóast makaskifti fer fram. Tað er neyðugt, at almenningurin hevur møguleika at kunna ganga á øllum teinum á komandi gøtukervi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
2005-2727 Útvegan av lendi til rennibreytina frá Jóannis Ziska av

15/00977 Útvegan av lendi til rennibreyt á Tórsbreyt frá Føroya Sparikassa ( Eik ) av ognini, matr. nr. 88 (1395, 1393) (matr. nr. 600a, 620c og 619) 2005-2726

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 21/04115-11 Staðseting matr.nr 600a
J.nr. 21/04115-12 Makaskifti matr.nr. 1397 og matr.nr. 1393a
J.nr. 21/04115-12 Staðseting við Rennibreytina
J.nr. 21/04115-13 Makaskifti 600a
J.nr. 21/04115-14 Keyp av vegøki

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin, leiðarin á byggimálsdeildini og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at ganga fyrispurninginum um makaskifti á møti treytað av, at avtala verður gjørd um at komandi gøtukervi *"Gøtan kring Havnina og Fiskastykkið"* kann gerast á matr.nr. 600a og at almenningurin hevur atkomu til gøtuna.
Mælt verður eisini til at Tórshavnar kommuna keypir vegøki á áleið 103 fermetrar og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Ískoyti.**

Keypsprísur fyri lendi til vegøkið verður 75.000,- kr. og verður fíggjað av keyp/sølu konto 6175.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 45/22 Umsókn um keyp av litra og sammanleggin til matr.nr. 91h, Bøgøta 14, Kollafjørður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.12.2021 | 249/21 | 21/04680-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2022 | 36/22 | 21/04680-3 |
| 3 Tekniska nevnd | 07.02.2022 | 9/22 | 21/04680-3 |
| 4 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 48/22 | 21/04680-3 |
| 5 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 45/22 | 21/04680-3 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá eigara á matr.nr. 91h, Bøgøta 14, Kollafjørður.

**Lýsing av málinum**
Umsøkjarin søkir kommununa um at keypa part av litra m, vegøki, afturat sínari ogn, matr. nr. 91h, Bøgøta 14, Kollafjørður.

Í sambandi við útstykking við Hamrabø yvirtók Tórshavnar Kommuna vegin frá umsøkjaranum.

Økið, søkt verður um, liggur á markinum til *serstøku byggisamtyktina fyri útstykkingina á Hamrabøi*, sum m.a. fevnur um gøtuskipan og fríøkir.
Hóast økið liggur uttan fyri serstøku byggisamtyktina, liggur hetta sum ein natúrlig byrjan til eina komandi gøtuskipan.

Økið, søkt verður um, er partur av vegi, sum umframt uppruna endamálið at leiða ferðslu og gangandi, eisini hevur til endamáls at húsa leiðingum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu kapittul 5, §§ 1-7. greitt frá at vegir, herundir útlagdar gøtur. Har er m.a. er ásett:

- § 4, stk. 1 Í tey øki sum hoyra til privatar og almennar vegir, kunnu, sjálvt um tey bert eru løgd av og ikki gjørd til veg, verða lagdir leiðingar og kaðalar og sett tílíkt, sum eftir ætlan byggivaldsins er neyðugt ella hent. Eigarar av ikki gjørdum vegi hava skyldu at geva atgongd til hendan í tann mun, sum neyðugt er til eftirlit og ábøtur á hesum útbúnaði. Avtala skal tó altíð, áðrenn arbeiði verður byrjað, vera til skjals fyri skaða, ið skuldi gjørst av hesi orsøk.
- § 4, stk. 2 Verður hildið neyðugt at flyta leiðingar, kaðalar, standarar o.a., tí at bygging fer fram, skal hann, sum byggir, endurgjalda kommunu ella avvarandi stovni útreiðslurnar av hesum eftir rokning. Sama er við øllum eyka vegarbeiði ið gerast neyðug av byggingini og sum byggivaldið fær í lag.
  Um almennir stovnar so sum kommunan ella SEV selja økir við hesum útbúnaði, sum nevnt er í 1. skal seljarin geva keyparnum upplýsingar um tær her nevndu endurgjaldsskyldur ella gera avtalu um, hvør skal gjalda.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin metir tað ikki vera ráðiligt at lata/selja part av litra m, tá økið hevur til endamáls at húsa ferðslu, bæði gangandi og koyrandi.

Økið, liggur sum eina natúrlig byrjan á eini gøtuskipan fyri útstykkingina á Hamrabøi og afturat hesum hava vegøki til endamáls at geva møguleika fyri:

- komandi breiðkanum av vegi og komandi gonguteigum
- komandi busslummar
- komandi leiðingar í vegi og bygningar til tess.

Víst verður til at vegur verður nýttur til leiðingar og at søla av vegnum tí kann hava umsitingar- og fíggjarligar avleiðingar.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
J.nr. 21/04680-1 Umsókn um loyvi at leggja øki afturat grundstykkinum matr.nr. 91h, Kollafjørður.
J.nr. 21/04680-6 51-91h Søla av øki

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | X | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggimálsdeildini mæla frá at ganga umsóknini á møti, vísandi til at talan er um vegøki, sum liggur sum ein natúrlig byrjan til eina komandi gøtuskipan og sum kann nýtast til parkering v.m.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. desember 2021:** Samtykt at lýsa málið nærri til komandi fund.

**Ískoyti:**
Vegurin á Bøgøtu er í miðal 8 m breiður meðan nýggi vegurin á útstykkingini á Hamrabøi er áleið 7 m breiður.
Umsitingin metir tí, at veg breiddin á søkta økinum kann loyvast niður í 7,8 m., tá eitt øki er set av til eina natúrliga byrjan til eina komandi gøtuskipan. Kommunan er sinna at selja umsøkjaranum áleið 26 fermetrar av vegøki. Víst verður til skjal »*51-91h Søla av øki.*«

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, leiðarin á byggimálsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til at selja áleið 26 fermetrar av vegøki litra m til ánaran av matr.nr. 91h, Kollafjørður, sum víst er á skjalið »*51-91h Søla av vegøki*« og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Tekniska nevnd 07. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

## 46/22 Nýggja vinnu- og havnaøkið á Sundi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 09.03.2020 | 27/20 | 20/00731-1 |
| 2 Vinnunevndin | 05.10.2020 | 73/20 | 20/00731-1 |
| 3 Havnanevndin | 09.03.2021 | 8/21 | 20/00731-1 |
| 4 Havnanevndin | 13.04.2021 | 16/21 | 20/00731-1 |
| 5 Kaldbaksnevndin | 05.05.2021 | 2/21 | 20/00731-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 19.05.2021 | 103/21 | 20/00731-1 |
| 7 Havnanevndin | 18.01.2022 | 1/22 | 20/00731-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 50/22 | 20/00731-1 |
| 9 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 46/22 | 20/00731-1 |

**Upprunin til málið:**
Nýuppfylta vinnu- og havnaøkið á Sundi er nú um at vera liðugt og harvið klárt at leiga út.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Havnameistarin metir, at tað er fíggjarliga skilabest fyri Tórshavnar Havn at leiga økið út sum tað liggur, uttan at gera fleiri íløgur í tað. Hetta er grundað á, at íløgan higartil hevur verið lutfalsliga lítil í mun til víddina av økinum, sum fingin er burturúr, og at ein meiríløga í betran av økinum við t.d. at byggibúgva økið, gera vegir o.a. gerst lutfalsliga stór, uttan at leiguinntøkan hækkar í sama mun. Eisini má havast í huga, at Tórshavnar Havn sum kunnugt ger stórar íløgur í havnalagið í Tórshavn í løtuni, og at fíggjarligi møguleikin at gera fleiri íløgur samstundis harvið er avmarkaður.
Mett verður, at tað er áhugi at leiga økið, sum tað liggur nú. Fyri at fáa kannað áhugan nærri, og fyri at geva øllum møguleikan at bjóða seg fram at leiga, verður tað mett rættast at bjóða økið út alment til leigu. Á henda hátt kann Tórshavnar Havn eisini finna fram til tann ella teir leigararnar, ið geva besta fíggjarliga íkastið til Tórshavnar Havn bæði við vørugjøldum um bryggjuna á Sundi umframt sjálva leiguna.

***Virksemi***
Áhugaðir leigarar skulu greiða frá, hvat ið ætlanin er at nýta økið til. Virksemið skal lúka tær treytir, ið eru ásettar fyri B1 økið í almennu byggisamtyktini.

***Stødd á leigumáli / -øki***
Fyri at fáa fleiri áhugaðar at bjóða, verður mælt, at áhugaðir leigarar kunnu velja at bjóða upp á í fyrsta lagi alt økið, og í øðrum lagi ein part av økinum.

***Leigutíðarskeið***
Áhugaðir leigarar skulu upplýsa, hvussu langt tíðarskeið ynski er at leiga økið.

***Umsetningur yvir bryggjukantin***
Skotið verður upp, at nýta umsetning yvir bryggjukant, sum part av inntøkugrundarlagnum av økinum. Í hesum sambandi skal áhugaði leigarin upplýsa slag og nøgd av vøru hann væntar at flyta um bryggjukantin á Sundi.

***Leigugjald***
Skotið verður upp at áseta eitt leigugjald á 42 kr/m2/ár, tó so, at um leigarin hevur umsetning av vørum um Bryggjukantin á Sundi, verður leigugjaldið lækkað við 50 % av hesi upphædd, tó ikki niðurum 30 kr/m2/ár.

Henda upphædd (42 kr/m2/ár) er ásett samsvarandi avskrivingarkostnaðinum av kostnaðinum (virðinum) av at gera líknandi vinnuøki í kommununi. Kostprísurin fyri onnur byggibúgvin vinnuøki í kommununi hevur verið 1300 kr/m2 (Skarðshjalli). Økið á Sundi er tó ikki heilt byggibúgvið, tí har eru enn ikki gjørdar tekniskar innleggingar v.m., og tí verður mett, at dagsvirðið kann ásetast til 1000 kr/m2, soleiðis sum økið liggur nú. Verður ein íløga á 1000 kr/m2 avskrivað yvir 40 ár við fastari rentu á 3,0 %, verður árliga avskrivingin 42 kr/m2/ár, sum harvið kann ásetast sum hóskandi leiga, um virksemið annars ikki hevur avleiddan umsetning yvir bryggjukantin.

***Metingarstøði***
Metingarstøði fyri tillutingina verður tað ella tey tilboð, sum samlað sæð loysa seg fíggjarliga best fyri Tórshavnar Havn, sum merkir tað tilboð, ið gevur mest umsetning um bryggjukantin.

***Aðrar treytir***
Leigumálið/leigumálini annars verða við somu treytum sum onnur líknandi leigumál hjá Tórshavnar Havn.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
J.Nr. 17/00622 – Umsókn um leigu av øki á Sundi til landaling.
J.Nr. 17/02596 – Fyrispurningur um treytir fyri at byggja eina smoltstøð á Sundi.
J.Nr. 20/00733 – Umsókn um at leiga økið á Sundi til nýtt asfaltverk og skerv/sand sølu

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at lýsa nýggja vinnu- og havnaøkið á Sundi alment til leigu sambært omanfyri lýsta leisti.

**Vinnunevndin 09. mars 2020:** Ein meiriluti, Bogi Andreasen, Jákup Dam og Gunvør Balle, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Halla Samuelsen og Helena Dam á Neystabø, mælir til at beina málið Kaldbaksnevndina til kunningar.

**Ískoyti**
Økið varð lýst til leigu hin 11. mai 2020. Tá ið umsóknarfreistin var farin hin 2. juni 2020 vóru komnar 12 umsóknir, sí yvirlit yvir umsóknir j.nr. 20/00731-4, harímillum eru umsóknir, ið verða mettar at lúka endamálsásetingarnar fyri umráðispartin B1 sambært almennu byggisamtyktini.

**Tilmæli**
Havnameistarin mælir til at viðkomandi umsóknir verða kannaðar nærri við atliti til at finna fram til hóskandi leigarar.

**Vinnunevndin 05. oktober 2020:** Nevndin ynskir at umsitingin kemur aftur við uppskotum til heildarætlan fyri hvussu vinnuøkið kann skipast.

**Ískoyti**
Sí uppskot um hvussu økið kann skipast, j.nr. 20/00731-21.

Umsóknirnar eru viðgjørdar nærri, sí «Notat – viðmerkingar til umsóknir um havnaøkið á Sundi», j.nr. 20/00731-20. Sambært notatinum eru aktuellu umsóknirnar, ið umsitingin metir lýkur økistreytirnar fyri havnaøkið, hesar:

| Umsøkjari | Søkir um | Skjøl (J.nr) |
|---|---|---|
| P/F Sandship. (Felag við heimsstaði í TK verður stovnað.) | 1) Øki á 15.000 $m^2$ til Asfaltverk<br>2) Øki á 15.000 $m^2$ til goymslu til sand- og skervsølu | 20/00733-1 : Umsókn<br>20/00733-2 : Fleiri upplýsingar til umsókn<br>20/00731-13 : Dagførd umsókn<br>20/00731-16 : Viðv.sand- og skervgoymslu<br>20/00731-27 : Viðv. umhvørvisviðurskiftum |
| Atli S. Simonsen Børge Due Sørensen. (Felag verður stovnað) | Øki á 12.000 $m^2$ til asfaltverk | 20/00731-11 : Umsókn<br>20/00731-23 : Rætting til umsókn<br>20/00731-28 : Umhvørvistilfar |

Tað eru sostatt 2 aktuellar umsóknir um øki til sama slag virksemi (asfaltframleiðslu), ið umsitingin metir lúka økistreytirnar fyri havnaøkið. Umsitingin metir ikki, at tað eru onnur viðkomandi saklig atlit, ið heimila at kommununi bert at tilluta øðrum umsøkjara leiguøki, hóast tað er ivasamt, um tað verður grundarlag fyri meiri enn einum asfaltverki. Tískil metir umsitingin tað fyrisitingarliga er rættast at tilluta báðum umsøkjarum optión uppá hvør sítt øki, ið verður treytað av, at ætlanin verður til veruleika og at bygt verður innan 1 ár.

<u>Almennar viðmerkingar frá umsitingini til virksemi:</u>
Virksemið, ið søkt er um, hevur tørv á sjóvegis flutningi av tilfari, ið verður uppskipað um bryggjukantin á Sundi, og er tí væl hóskandi til at verða staðsett á hesum øki á Sundi.
Alment kann eisini sigast um tílíkt virksemi, at samfelagið áhaldandi hevur tørv á asfalti, sandi og skervi til byggivirksemi av ymsum slag. Landafrøðiliga er staðsetingin á Sundi sera góð og helst ein hin besta í landinum til endamálið, bæði tí at har er ein havn til uppskipan og tí at Sund liggur miðskeiðis í landinum nærhendis flestu brúkarunum, t.v.s. miðskeiðis í «nýtslu-tyngdarpunktinum». Harvið verður flutningur av tilfarinum til brúkararnir minst møguligur og tað er sostatt gagnligast fyri umhvørvið.

Sandship vísir í telduposti hin 22. januar 2021, j.nr. 20/00731-16 á, at tað hevur stóran skund hjá teimum at finna nýtt øki til sand- og skervgoymslu.

**Umhvørvisviðurskifti**

Asfaltframleiðsla skal umhvørvisgóðkennast av Umhvørvisstovuni sambært kap. 5 í umhvørvisverndarlógini. Umhvørvisgóðkenning skal vera fingin áðrenn byggiloyvi verður útskrivað.
Umsitingin hevur í telduposti hin 15.februar 2021, j.nr. 20/00731-25&26 biðið umsøkjararnar um at lýsa umhvørvisviðurskiftini í.s.v. ætlaða virksemi nærri.
P/F Sandship hevur í telduposti hin 3. mars 2021, j.nr. 20/00731-27, sent lýsing av umhvørvisviðurskiftunum.
Atli Simonsen hevur í telduposti hin 4. mars 2021, j.nr. 20/00731-28, sent tilfar um umhvørvisviðurskiftini.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Leiguinntøka fyri 40.000 m² er kr. 1.680.000 um árið við einum leiguprísi á 42 kr/m²/ár.

Samlaði kostnaðurin av at etablera atkomuveg til alt økið sambært skipanaruppskotinum verður mettur til kr. 7-9 mió, men atkomuvegurin kann gerast í 3 byggistigum. 1.byggistig, ið umfatar brúgv og veg til nærmasta stykkið, verður mettur at kosta umleið 4 mió.

Tó ber til at taka økið í nýtslu fyribils við verandi atkomuvegi, um smávegis ábøtur verða framdar, men hetta er tó ikki ein varandi loysn og má tí roknast við, at nýggjur atkomuvegur má gerast í næstum.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til:

- At gera 10 ára leigusáttmála við P/F Sandship um eitt øki á umleið 15.000 m² til sand- og skervgoymslu, smb sáttmálauppskoti J.nr. 20/00731-22.
- At geva P/F Sandship tilsøgn (optión) upp á 25 ára leigumál upp á eitt øki á 12-15.000 m² til asfaltframleiðslu. Tilsøgnin verður galdandi í 1 ár og verður treytað av, at ætlanin verður til veruleika og at bygging er byrjað innan 1 ár. Kostnaðurin fyri optiónina verður hin sami sum leiguprísurin. Tá ið bygt verður, verður 25 ára leigusáttmáli, j.nr. 20/00731-24, settur í verk.
- At geva felag undir stovnan v/Atla S. Simonsen og Børga Due Sørensen tilsøgn (optión) upp á 25 ára leigumál upp á eitt øki á uml. 12.000 m² til asfaltframleiðslu. Tilsøgnin verður galdandi í 1 ár og verður treytað av, at ætlanin verður til veruleika og at bygging er byrjað innan 1 ár. Kostnaðurin fyri optiónina verður hin sami sum leiguprísurin. Tá ið bygt verður, verður 25 ára leigusáttmáli j.nr. 20/00731-24, settur í verk.
- At endaliga staðseting og stødd á økjunum verður tillagað eftir nærri samráðingar við umsøkjararnar.

**Havnanevndin 09. mars 2021:** Samtykt at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti**:
Umsitingin hevur kannað fíggjarliga grundarlagið undir verkætlanunum viðv. asfaltverkum, sí notat j.nr. 20/00731-35. Niðurstøðan av hesum er, at fíggjarliga grundarlagið undir verkætlanini hjá P/F Sandship er í lagi. Umsitingin fær ikki mett um fríggjarliga grundarlagið undir verkætlanini hjá Atla S. Simonsen og Børga D. Sørensen, tí umbidnu upplýsingarnir fyriliggja ikki.

**Tilmæli**
Vísandi til, at nevndin ikki tók undir við tilmælinum til fundin hin 9. mars 2021 um at veita báðum umsøkjarunum optión upp á øki til asfaltverk, og at tað nú er greitt, at fíggjarliga grundarlagið undir verkætlanini hjá P/F Sandship er í lagi, mælir Havnameistarin til, at umsóknin frá P/F Sandship um øki á 12.-15.000 m² til asfaltverk verður gingin á møti og at 25 ára leigusáttmáli (j.nr. 20/00731-24) verður gjørdur, og at endalig staðseting og stødd verður eftir nærri samráðing við umsøkjara.

Havnameistarin mælir til, at nevndin tekur støðu til, um eitt øki á uml. 15.000 m² skal leigast til P/F Sandship til sand- og skervgoymslu sambært umsókn. Um so verður, mælir Havnameistarin til, at gjørdur verður 10 ára leigusáttmáli smb. j.nr. 20/00731-22.

Eisini verður mælt til, at umsitingin fráboðar hinum umsøkjarunum, at teirra umsóknir verða ikki gingnar á møti á hesum sinni.

**Havnanevndin 13. apríl 2021:** Samtykt at geva felag undir stovnan v/Atla S. Simonsen og Børga Due Sørensen tilsøgn um (optión) upp á 25 ára leigumál upp á eitt øki á uml. 12.000 m$^2$ til asfaltframleiðslu. Tilsøgnin verður galdandi í 1 ár og verður treytað av, at ætlanin verður til veruleika og at bygging er byrjað innan 1 ár. Kostnaðurin fyri optiónina verður hin sami sum leiguprísurin.
Tá ið bygt verður, verður 25 ára leigusáttmáli j.nr. 20/00731-24, settur í verk.

Samtyktin um asfaltverk verður beind í fíggjarnevndina og býráðið umvegis Kaldbaksnevndina, tí talan er um langtíðar leigu.

Samtykt at umsóknin frá P/F Sandship um leigu av 15.000 m$^2$ til sand- og skervgoymslu verður útsett.

Samtykt at senda fráboðan til allar hinar umsøkjararnar, at teirra umsóknir verða ikki gingnar á møti.

**Kaldbaksnevndin 05. mai 2021:** Staðbundna nevndin ynskir ein kunnandi borgarafund í Kaldbak um nýggja asfaltsætlanina har serfrøðingur greiðir frá. Staðbundna nevndin hevur latið inn hoyringsskriv til málið.

**Fíggjarnevndin 19. mai 2021:** Málið útsett.

**Ískoyti:**
P/F Sandship hevur í teldubrævi hin 16. mai 2021, j.nr. 20/00731-40, sent dagføring av umsóknini um sandgoymslu á Sundi. Sandship hevur gjørt nýggjar tekningar hvussu ætlanin er at innrætta økið við básum, lastbilavekt og verkstaðs- og skrivstovubygningi. Sandship vísir á, at tørvur er at leiga uml. 25.000-30.000 m$^2$ til ætlaða virksemið.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at gera 10 ára leigusáttmála við P/F Sandship um eitt øki á umleið 25.000 m$^2$ til sand- og skervgoymslu, smb. sáttmálauppskoti j.nr. 20/00731-.45.

**Havnanevndin 18. januar 2022:** Samtykt at gera ein 10 ára leigusáttmála upp á eitt 20.000 m$^2$ stórt øki, samb. uppskoti til leigusáttmála j.nr. 20/00731 – 47 og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri, fýra blonkum og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jóhan Petur Johannesen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Súna Mørk, Bjørg Dam, Annika Olsen og Birgir Nielsen.

Blankt atkvøddu: Ruth Vang, Elsa Berg, Jákup Dam og Gunvør Balle.

# 47/22 Leigusáttmáli Faroe Ship Føroyar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 08.02.2022 | 5/22 | 22/00460-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 51/22 | 22/00460-1 |
| 3 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 47/22 | 22/00460-1 |

**Upprunin til málið**
At skipa havnarøkið og at betra um umstøðurnar hjá Faroe Ship Føroyar, nú tað nærkast at nýggja havnarlagið verður tikið í brúk.

**Lýsing av málinum**
Tá nýggja havnarlagið verður tikið í brúk, flytur virksemið hjá Faroe Ship út á tann uttara nýggja molan, og tað bingjuøkið, sum hoyrir til.

Talan er um, at Faroe Ship Føroyar skal leiga tvey økir, eitt til bygging av pakkhúsi við frostgoymslu, og eitt øki til bygging av verkstað, sum skal umvæla kranar og útgerð, sum verður brúkt á havnarøkinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í løtuni leigar Faroe Ship Føroyar tey svørtu pakkhúsini á molanum frá Tórshavnar havn, og sum Faroe Ship Føroyar eigur ein part av.

Faroe Ship Føroyar verður eigari av nýggju bygningunum, sum verða bygdir á leigugrund. Pakkhúsið og frostgoymslan verða bygd saman við tí gráa pakkhúsinum, sum Faroe Ship Føroyar er eigari av. Verkstaðið verður ein sjálvstøðugur bygningur.

Ætlandi byrjar byggingin í vár..

Tá Faroe Ship Føroyar flytur inn í nýggju bygningarnar, verða tey svørtu pakkhúsini tikin niður.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>24. februar 2022 | Blað nr.: 228<br>Formansins merki: |

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at taka undir við leigusáttmála j.nr 22/00460-2 og 22/00460-3.

**Havnanevndin 08. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

## 48/22 LV mál nr. 21/01631 (VS: mál nr. 16/00514 Viðv. leigusáttmálanum á matr. nr. 1e og 1f á Sundi)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 18.01.2022 | 2/22 | 21/03297-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 52/22 | 21/03297-2 |
| 3 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 48/22 | 21/03297-2 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Landsverk um at leingja leigusáttmálan undir asfaltverkinum á Sundi við 25 árum.

**Lýsing av málinum**
Í 2004 gjørdi Tórshavnar kommuna sáttmála um at leiga matr. nr. 1f til P/F Asfaltverkið á Sundi. Í 2011 verður leigumálið vaksið, til eisini at umfata matr. nr. 1e. Leigumálið er galdandi til 1. juli 2024, tá tað kann sigast upp av báðum pørtum við 6 mánaða freist.

Í 2016 framleigar P/F Asfaltverkið økið til Landsverk, við somu rættindum og skyldum, sum leigarin hevur sambært leigusáttmálanum við Tórshavnar kommunu.

**Landsverk sigur m.a. soleiðis í síni lýsing av verkinum:**
Staðsetingin á Sundi er munandi betri viðvíkjandi veðri, og tað krevur minni orku at koma til og frá við tilfari til verkið, enn um koyrast skal í Hundsarabotn.

Tá asfaltverkið á Sundi er liðugt útbygt í 2022, verður tað at sammeta við eitt nýtt verk, men longu nú er stórur partur av dagføringunum framdar.

Asfaltverkið kann í 2022 framleiða 200 tons um tíman, og arbeiðir tí effektivari, og koyrir færri tímar um árið enn higartil.
Larmurin frá verkinum lýkur galdandi ES krøv, men um samanborið verður við aðrar larmkeldur í økinum, so sum landsveg og skip við bryggju, gevur verkið sera lítið av larmi frá sær.

Umhvørvisgóðkenningin setur strong krøv til verkið, sum øll verða lokin. Onki verður latið á sjógv frá verkinum.

Útlátið úr skorsteininum er nærum 100% dampur, meðan alt annað útlát, so sum co2, nox og sox lýkur strangastu útlátskrøv. Samanborið við oljufýringar hjá húsarhaldinum er roykurin frá asfaltverkinum munandi reinari.

Bitumen, sum er 5% av asfaltinum er bólkað í 2B, sum viðgerð evni í møguliga eru krabbameinselvandi fyri menniskju. Í bólki 2B eru eitt nú fartelefonir og kaffi, so talan er ikki um eitt evni, sum verður katagoriserað sum vandamikið.

Samanumtikið er asfaltverkið hjá Landsverk á Sundi eitt nýmótans verk, sum lýkur øll umhvørviskrøv – bæði í Danmark og í Føroyum.

Ætlanin er, í mestan mun, at brúka føroyskt tilfar.

**Luftgóðskumátistøð í Kaldbak:**
Ein luftgóðskumátistøð hevur staðið í Kaldbak síðani 2019. Mátingarnar vísa, tað er onki dálkingarevni, sum fer uppum markvirðini í ES nakað ár.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Bæði leigari og útleigari hava hildið sínar skyldur í leigusáttmálanum.

Um leigumálið verður uppsagt, skal økið ruddast og latast aftur í sama standi, sum tá leigumálið byrjaði.

Grein 3 í leigusáttmálanum er soljóðandi:
*Leigumálið er galdandi til 1.juli 2024. Aftaná hetta kann leigumálið av báðum pørtum sigast upp við 6 mánaða freist til at halda uppat tann 1. Í einum mánaða.*

*Vil leigarin halda áfram við leigumálinum, aftaná at tað ásetta áramálið er útgingið, skal leigarin hava fyrsta rætt til at gera nýtt leigumál, um Tórshavnar kommuna loyvir hesum, og um kommunan ikki sjálv nýtir rættin til at taka økið í nýtslu til egið brúk.*

Tá Tórshavnar kommuna ikki hevur boðað frá nøkrum ætlanum at taka økið til egið brúk, leigarin hevur yvirhildið ásetingarnar í leigusáttmálanum og stórar íløgur eru gjørdar í at uppstiga asfaltverkið, skulu týðandi grundgevingar liggja fyri ikki at leingja leigumálið.

Leigan verður sambært galdandi leigugjøldum fyri havnaøkir í Tórshavnar kommunu.

Mótmælisskriv móti bygging av asfaltverkið er komið frá fólki úr Kaldbak.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Mótmæli úr Kaldbak um asfaltverk j.nr 20/00731-44

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☒**

**Tilmæli:**
Havnarmeistarin mælir til at ganga umsóknini á møti, at leingja leigumálið við 25 árum.

**Havnanevndin 18. januar 2022:**

**Ein meiriluti:** Kári Johansen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein samtykti at leingja leigumálið við 25 árum, treytað av, at Asfaltverkið hevur lagt um til til biogass – og í øðrum lagi til gass (náttúrgass) í seinasta lagi 1. juli 2024 og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Ein minniluti:** Birgir Nielsen og Elsa Berg tekur ikki undir við tilmælinum og mæla til nýggja staðseting.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við meirilutanum í havnanevndini og beinir málið í býraðið.

Ein minniluti, Elsa Berg og Annika Olsen, tekur ikki undir við tilmælinum og mælir til nýggja staðseting.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Tikið av skrá.

# 49/22 Uppskot til nýggja reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 53/22 | 22/00649-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 49/22 | 22/00649-1 |

**Upprunin til málið**
Málið var umrøtt á fíggjarnevndarfundin saman við umsitingini 19. januar 2022 við støði í "Upprit um reglugerð fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað".

**Lýsing av málinum**
Upprunaliga var reglugerðin skrivað til eina skipan, har umsøkjarar fyrst skuldu lúka nakrar treytir fyri at verða skrivaðir á bíðilistar til grundøki til sethús, tvíhús, raðhús ella eina íbúð, fyri síðan at lúka aðrar treytir fyri at fáa tilluta grundøki til sethús, tvíhús, raðhús ella eina íbúð. Í dag er skipanin ein heilt onnur, tí bíðilistarnir eru avtiknir, og veruleikin er tann, at kommunan hevur ikki staðið fyri útlútan av íbúðum í skjótt 20 ár.
Fyri at reglurnar skulu vera einfaldar at skilja og umsita, verður skotið upp, at reglugerðin í framtíðini einans skal áseta, hvussu farið verður fram, tá kommunan stykkjar út grundøki til sethús, tvíhús, raðhús o.l. til egnan bústað á egnum matrikkli.

Høvuðsbroytingarnar í mun til verandi reglugerð eru annars hesar:

- Ein fær ikki tilluta eitt grundøki, men rættin til eitt ávíst grundøki.
- Øll kunnu melda til, sum lúka treytirnar, men borgarar í Tórshavnar kommunu hava framíhjárætt til lutakastið, meðan borgarar uttanfyri kommununa einans fáa tillutað, um grundøki eru tøk eftir, at borgarar í kommununi hava fingið sín tørv nøktaðan. Sama er galdandi fyri grundøki, ið verða latin inn aftur. Borgarar í Tórshavnar kommunu eru tey, sum eru skrásett á búgva í Tórshavnar kommunu, tá tilmeldingin verður lýst alment og latin upp.
- Áðrenn skeyti uppá grundøki verður skrivað og tinglýst, skal Tórshavnar kommuna hava váttan frá peningastovni um, at fígging er til byggingina og játtan um byggiloyvi skal vera fingið til vega, umframt at viðkomandi skal hava skrásettan bústað í Tórshavnar kommunu.
- Ásetingin um, at fimm grundøki verða løgd av til fólk við bráðfeingis tørvi, verður strikað.
- Til ber ikki at býta um grundøki.

Uppskot til nýggja reglugerð er hetta:

| Ásetingar | Útgreining |
|---|---|
| **Slag av ogn**<br>1. Reglurnar eru galdandi fyri útlutan av grundøkjum til sethús til egnan privatan bústað. | Reglugerðini er bert galdandi fyri útlutan av grundøkjum til sethús, tvíhús, raðhús o.l. hús á egnum matrikkli. Ikki íbúðir. |
| **Tilmelding**<br>2. Tá nýggjar útstykkingar eru á veg og grundøkini eru klár at luta út, boðar Tórshavnar kommuna frá hesum í fjølmiðlum og á heimasíðuni. | Fólk fáa minst 4 vikur at melda til í og útvega sær váttan um fígging. |

| | |
|---|---|
| b) Ásett verður freist á í minsta lagi 4 vikur, har einstaklingar og pør kunnu melda til lutakast um grundøkini.<br>c) Tilmeldingin fer fram á sjálvgreiðsluni á heimasíðuni hjá kommununi. Við tilmeldingini skal vera váttan frá peningastovni um at tøk fígging er til ognina. | |
| **Treytir**<br>4. Treytirnar fyri at melda til og fáa tillutað rættin til eitt grundøki eru hesar:<br>a) Tygum skulu vera fylt/ur 18 ár.<br>b) Tygum ella hjúnarfelagi/sambúgvandi maki skulu ikki beinleiðis ella óbeinleiðis, t.d. saman við øðrum, gjøgnum partafelag ella á annan hátt, eiga fasta ogn í Tórshavnar kommunu, ið kann nýtast til privatan bústað. Hetta er tó ikki galdandi um talan er um íbúð. | Øll kunnu melda til lutakast, sum eru 18 ár og sum ikki einsamøll, ella saman við øðrum eiga hús í Tórshavnar kommunu. Fólk, sum eiga íbúð kunnu melda til lutakast. |
| **Lutakast**<br>5. Rætturin til eitt grundøki verður avgjørdur við lutakasti, sum verður framt við talgildari skipan. Lutakastið kann fara fram alment, ella saman við tveimum óheftum eygleiðarum.<br>b) Eru fleiri meldaði til lutakast, sum høvdu skrásetta bústað í Tórshavnar kommunu, tá tilmeldingin var lýst alment, og lúka 4b, enn tað eru grundøki at kasta lut um, verður bert kastað lut millum hesi.<br>c) Eru færri meldaði til lutakast, sum hava bústað í Tórshavnar kommunu og lúka 4b, enn tað eru grundøki at kasta lut um, verður fyrst kastað lut millum hesi. Síðan verður kastað lut um rættin til grundøkini, ið eru eftir, millum tey, ið ikki hava bústað í Tórshavnar kommunu.<br>d) Grundøki, ið verður latin inn aftur til kommununa, verða fyrst lutaði út sambært 5b, síðan 5c. Hava øll tilmeldaði fingið boðið rættin til eitt grundøki, kann kommunan lýsa grundøki til sølu á heimasíðuni og hjá meklara.<br>e) Tekur ein ikki av rættinum til eitt grundøki, ein fær tillutað, so er ein ikki við í lutakastinum longur og kann ikki fáa tillutað rættin til annað grundøki í somu útstykking. Tó ber til at melda til lutakast av nýggjum, tá onnur útstykking verður framd í Tórshavnar kommunu.<br>d) Tað ber ikki til at býta um grundøki. | Borgarar, sum hava skrásettan bústað í Tórshavnar kommunu, tá tilmeldingin verður lýst alment, hava framíhjárætt. Soleiðis at skilja, at bert um tað eru fleiri grundøki enn luttakarar til lutakast, kunnu onnur fáa grundøki, tá borgarar í TK hava fingið tillutað.<br><br>Tekur ein ikki av tí grundøki, ið fær boðið við lutakasti, so er ein ikki við í útlutanini longur, men kann melda til annað lutakast í aðrari útstykking.<br><br>Tað ber ikki til at býta um grundøki. |
| **Gjald og skeyting** | |

8. Tá lutakast hevur verið verið, sendir kommunan øllum, ið hava vunnið rættin til eitt grundøki eina rokning við einum ávegisgjaldið áljóðandi helvtini av metta endaliga kostnaðinum á grundøkinum. Ávegisgjaldið skal rindast kommununi innan ásetta freist, ið ikki kann verða styttri enn 4 vikur. Er ikki rindað innan ásettu freistina, er rætturin til grundøkið fallin burtur, og kann Tórshavnar kommuna tilluta øðrum rættin til grundøkið
b) Áðrenn skeyti uppá grundøki verður skrivað og tinglýst, skulu fylgjandi treytir vera fylgdar:

- Tórshavnar kommuna skal hava váttan frá peningastovni um, at fígging er til byggingina.
- Játtan um byggiloyvi skal vera fingið til vega.
- Viðkomandi skal vera skrásettur at búgva í Tórshavnar kommunu

c) Eru viðurskiftini viðvíkjandi pkt. 8b ikki avgreidd innan eina av Tórshavnar kommunu ásetta freist, er rætturin til grundøkið fallin burtur og kann Tórshavnar kommuna tilluta øðrum rættin til grundøkið sambært 5d.
d) Tá ið treytirnar í pkt. 8b eru loknar, fellir restin av gjaldinum fyri grundøkið til gjaldingar, og tá ið hetta er goldið, verður endaligt skeytið skrivað og tinglýst.

Helvtin av gjaldinum fyri grundøki skal fella stutt eftir lutakastið.

Innan til dømis hálvt ár skal váttan um fígging til bygging og byggiloyi vera fingið til vega, og ein skal hava skrásettan bústað í Tórshavnar kommunu. Tvs. at um tað kemur fyri, at grundøki verður tillutað fólki í aðrari kommunu ella uttanlanda, so skal tað helst vera til fólk, ið frammanundan stóðu á gáttini at flyta til Tórshavnar kommunu. Við framíhjárættinum til fólk, ið frammanundan búgva í Tórshavnar kommunu, fer hetta neyvan at koma fyri serliga ofta.

Verður omanfyri treytir og freistir ikki hildnar, fellur rætturin til grundøkið burtur.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
Viðmerkingar til reglugerðina um útlutan av fastari ogn
Reglur fyri viðgerð av umsókn og útlutan av fastari ogn til egnan privatan bústað

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Miðfyrisitingarstjórin, leiðarin á Stjórnarskrivstovuni og leiðarin á Snarskivuni mæla til at tikið verður undir við nýggja uppskotinum um reglugerð.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí ískoyti, at viðvíkjandi lesandi føroyingum, ið eru búsitandi uttanfyri Tórshavnar kommunu í fyribils lestrarørindum, verða somu reglur galdandi sum í dag, soleiðis at hesir kunnu skriva seg upp til lutakast til fasta ogn og fáa tillutað grundøki, um teir flyta til Tórshavnar kommununu í seinasta lagi eitt ár eftir útlutan. Hesi koma sostatt á sama lista sum tey, ið eru búsitandi í Tórshavnar kommunu.

Elsa Berg luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

# 50/22 P/f Fjarhitafelagið – innskot/partapeningur í felagið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 54/22 | 22/00502-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 50/22 | 22/00502-1 |

**Upprunin til málið**
Tórshavnar kommuna stuðlar grønari umlegging og leggur stóran dent á grøna orku og umhvørvið annars. Kommunan stuðlar tí tiltøkum fyri fólkaheilsu og grønari menning.

Kommunan hevur móttikið eina umsókn frá Fjarhitafelagnum um hækkan av partapenigi.

**Lýsing av málinum**
Sum ein liður í grønu átøkunum eru fyri 2022 avsettar 8 milliónir krónur til orkupolitisk átøk.

Harumframt eru fyri 2022 avsettar 15 milliónir krónur til at skjóta inn sum partapening í P/f Fjarhitafelagið, nú ið felagið er farið undir stórar útbyggingar av fjarhitanetinum i kommununi.

Útbyggingarnar eru ætlaðar at hava við sær, at fjarhitin kann gagnnýtast um allan býin.

SEV setir eisini 15 milliónir krónur av til sama endamál.

**Lógir, ásetingar o.a.**
-

**Upplýsingar frá umsitingini**
-

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum** (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)
-

**Skjøl**
Hækking av partapeningi – Fjarhitafelagið

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | x | | | |
| Møgulig frávik/læттar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin, leiðarin fyri umhvørvisdeildina og fíggjarleiðarin mæla til, at kommunan skjýtur 15 milliónir krónur sum partapeningur inn í P/f Fjarhitafelagið.

Upphæddin verður tikin av stovnsnummar 6177 Umsiting og røkt av bygningum, Orkupolitikkur og løgukarminum LK 61706 Fjarhitafelagið og flutt yvir á sama stovnsnummar við nýggjum projekti L 61706 Fjarhitafelagið, partapeningur.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>24. februar 2022 | Blað nr.: 238 |
|---|---|---|
| | | Formansins merki: |

# 51/22 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 16.02.2022 | 57/22 | 22/00009-1 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 51/22 | 22/00009-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 16. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Framlagt og góðkent.

# 52/22 Innskriving í fyrsta flokk, forskúla og frítíðarskúla 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 10.02.2022 | 9/22 | 21/05232-2 |
| 2 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 52/22 | 21/05232-2 |

**Upprunin til málið**
Innskriving í fyrsta flokk, forskúla og frítíðarskúla 2022

**Lýsing av málinum**
Nú innskrivingin í fyrsta flokk, forskúla og frítíðarskúla er liðug eru 293 børn skrivað inn í fyrsta flokk og 117 í forskúla.

Tveir frískúlar eru í Tórshavnar kommunu – Lítliskúli og Frískúli í Havn, tølini frá innskriving í teir báðar skúlarnar eru ikki tøk enn.

Tá freistin at skriva inn í fyrsta flokk var farin, vóru fleiri børn enn pláss er fyri skrivað inn í Skúlan á Fløtum og inn í Sankta Frans skúla. Neyðugt var tí at flyta 12 børn, sum høvdu valt Skúlan á Fløtum, í aðrar skúlar og at flyta 10 børn, ið høvdu valt Sankta Frans skúla í aðrar skúlar.

Plássini eru tillutað eftir leiðreglunum fyri upptøku av børnum í kommunalu fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu. Av teimum 22, ið eru flutt, er bert ein, sum býr í upptøkuøkinum í skúlanum, hann hevur søkt um pláss í, men hann býr á markinum til grannaskúlan, har hann hevur fingið pláss og hevur ikki langan veg í skúla.

Mánadagin 31. januar 2022 sendi Mentamáladeildin teimum teldupost, sum ikki fingu pláss í tí skúlanum tey ynsktu. Í teldupostinum er upplýst, hvussu nógv børn ikki fáa pláss í skúlanum, hvørjum skúla barnið fær pláss í, og at møguleiki er at koma á bíðilista. Kunnað er eisini um meginreglurnar, ið brúktar eru, tá avgerð er tikin um, hvørji børn sleppa í fyrsta flokk í skúlanum. Tær eru hesar:

- Innskrivingin er komin áðrenn 17. januar 2022
- Barnið býr í grundupptøkuøkinum hjá Skúlanum á Fløtum
- Barnið gongur í forskúla og hevur systkin í skúlanum, tó ikki galdandi fyri systkin í 8.-10. flokki
- Barnið hevur systkin í skúlanum, tó ikki galdandi fyri systkin í 8. -10. flokki
- Barnið gongur í forskúla
- Onnur serlig viðurskifti

Skúlarnir senda skriv til foreldrini hjá teimum børnum, sum hava fingið pláss í skúlanum

**Forskúli**
117 børn eru skrivað inn í forskúla, og øll fáa pláss í tí forskúla, sum tey hava skrivað seg inn. Skúlarnir senda foreldrunum boð um tað.

Býráðið hevur á fundi 27. januar samtykt, at forskúli verður í Eysturskúlanum, og Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur góðkent, at forskúli verður settur á stovn í Eystrskúlanum frá skúlaárinum 2022/23 (mál 21/05093). Innskriving í forskúla í Eysturskúlan er ikki liðug enn.

Tøl frá innskriving og leiðreglur eru hjálagdar.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viððmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Einki at viðmerkja

**Skjøl**
Tøl frá innskriving og  Leiðreglur fyri upptøku av næmingum í kommunalu fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Trivnarðarstjóri og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at taka kunningina til eftirtektar.

**Trivnaðarnevndin 10. februar 2022:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Annika Olsen biður vegna minnilutan um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Heðin Mortensen, borgarstjóri legði fram soljóðandi broytingaruppskot, ið hann mælti býráðnum til at atkvøða um:

UMMR ger vart við, at sambært góðkenningini av forskúla er meginreglan, at forskúlin er sameindur partur av skúlanum. Í viðmerkingunum til fólkaskúlalógina um forskúla er m.a. víst á, at tá ið næmingur er innskrivaður í ein forskúlaflokk, so eru rættindi og skyldur hjá foreldrunum og næmingi tey somu, sum um næmingurin var í undirvísingarskyldugum aldri.

UMMR staðfestir, at 14 næmingar, sum ikki eru tiknir inn í 1. flokk, sjálvt um teir ganga í nevndu skúlum ella hava sysktin, hava rætt til at verða tiknir inn í tí skúla, har teir hava gingið í forskúla javnbjóðis við hinar næmingarnar í forskúlanum.

UMMR leggur aftrat, at tað tí er umráðandi, at kommunan finnur loysn í hesum máli, eisini við atliti at ásetingini í § 29, stk. 4, har ásett er, at um foreldrini ynskja, at børn skulu verða verandi í sama skúla, so skal umleggingin av umdømismarkinum millum verandi skúlar alt tað, ið ber til, ikki ávirka tey børn, sum longu eru farin í skúla.

Hetta merkir, at leiðreglurnar fyri upptøku til forskúla og 1. flokk og avgerð, um pláss er ikki fyri øllum børnunum, skulu broytast, sí uppskot niðanfyri (upptøkureglugerðin er samtykt í máli 21/00971).
UMMR góðkennir í hesum sambandi, at hesir 14 næmingarnir verða skrivaðir inn í 1. flokk í viðkomandi skúla.

**Uppskot frá borgarstjóran til býráðið at samtykkja**:

a) at staðfesta, at 6 næmingarnir í Sankta Frans skúla og 8 næmingar í Skúlanum í Fløtum, sum ganga í forskúla og/ella hava systkin í nevndu skúlum, men sum ikki eru innskrivað í skúlan, verða innskrivað í 1. flokk samsvarandi góðkenning frá UMMR;

b) at leiðreglur fyri upptøku av næmingum í kommunalu fólkaskúlarnar í Tórshavnar kommunu verða broyttar soleiðis:

   Leiðreglurnar fyri upptøku í forskúla:
   1) Innskrivingin er komin, áðrenn freistin er farin
   2) Barnið skal búgva í upptøkuøkinum
   3) Barnið hevur systkin í skúlanum, tó ikki galdandi fyri systkin í 8.-10. flokki
   4) Onnur serlig viðurskifti

   Leiðreglurnar fyri upptøku í 1. flokk verða hesar:
   1) Innskrivingin er komin, áðrenn freistin er farin
   2) Barnið gongur í forskúla í skúlanum
   3) Barnið býr í upptøkuøkinum
   4) Barnið hevur systkin í skúlanum, tó ikki galdandi fyri systkin í 8.-10. flokki
   5) Onnur serlig viðurskifti

c) at forskúlar verða skipaðir sum tilboð í øllum kommunalu skúlunum.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð einmælt samtykt.

# 53/22 Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 25.06.2021 | 52/21 | 21/02652-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 16.09.2021 | 58/21 | 21/02652-1 |
| 3 Trivnaðarnevndin | 26.10.2021 | 73/21 | 21/02652-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 15.11.2021 | 83/21 | 21/02652-1 |
| 5 Trivnaðarnevndin | 23.11.2021 | 87/21 | 21/02652-1 |
| 6 Trivnaðarnevndin | 13.01.2022 | 4/22 | 21/02652-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.01.2022 | 8/22 | 21/02652-1 |
| 8 Býráðsfundur | 27.01.2022 | 10/22 | 21/02652-1 |
| 9 Trivnaðarnevndin | 10.02.2022 | 15/22 | 21/02652-1 |
| 10 Býráðsfundur | 24.02.2022 | 53/22 | 21/02652-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt í trivnaðarnevndini tann 6. mai í 2021

**Lýsing av málinum**
Á fundi í trivnaðarnevndini tann 6. mai 2021 varð samtykt at seta arbeiðsbólk samsvarandi fólkaskúlalógini at gera uppskot til skúlabygnað kommununnar. Samtykt varð eisini, at arbeiðssetningur, umboðan og tíðarætlan verður lagt fyri nevndina aftur (mál 21/00971).

**Arbeiðssetningur**
Sambært fólkaskúlalógini skal ein skúlabygnaður verða fyri fólkaskúlan í kommununi.

**§ 32.** [9] Ein skúlabygnaður skal verða gjørdur fyri fólkaskúlan í kommununi, sbrt. § 47, stk. 6:
1) Navnið á tí einstaka skúlanum. Um so er, at kommunan hevur býtt sítt øki upp í skúlaumdømi, smb. § 29, so skulu nøvnini á umdømunum verða tilskilað. Her kann eisini vera ásett, at smærri umleggingar av umdømunum kunnu verða gjørdar í sambandi við ta árligu innskrivingina.
2) Vavið á tí einstaka skúlanum við atliti at undirvísing í grundskúla, 10. flokki o.ø. eftir § 4.

**§ 47** *Stk. 6.* [2] Kommunustýrið ger uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. §§ 32, stk.1 og 57, stk. 5.

**§ 57** *Stk. 5.* [9] Landsstýrismaðurin góðkennir skúlabygnað kommununnar og tær ítøkiligu undirvísingarætlanirnar fyri teir einstøku skúlarnar og møguligar broytingar í teimum. Landstýrismaðurin kann loyva, at fleiri skúlar í einum øki verða roknaðir sum ein skúli, sjálvt um ikki øll undirvísingarhølini eru savnað á sama staði í økinum.

Ein skúlabygnaður er í Tórshavnar kommunu, hann er tó ikki settur saman í eina heild, men er ein bygnaður fyri einstøku skúlarnar, og er góðkendur so hvørt broytingar hava verið, tað er t.d., tá nýggir skúlar eru bygdir, og tá skúlar eru lagdir saman.

Næmingarnir í Velbastaðar skúla, Kaldbaks skúla og Nólsoyar skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk. Uppskot hevur verið frammi um, at smáu skúlarnir hava árgangirnar til og við 6., og so flyta í størra skúlan, tá teir skulu í 7. flokk. 7. árgangur er í grundini partur av hádeildini, so tað er eitt nátúrligt skifti tá, haraftrat fáa næmingarnir nýggjar lærugreinir frá 7. flokki, og tær eru samfelagsfrøði, landalæra, lívfrøði og alis- og evnafrøði. Samstarv er longu nú við Eysturskúlan, so næmingarnir í 7. árgangi í smáu skúlunum hava hesar ella nakrar av hesum lærugreinum í Eysturskúlanum.

Verður skúlabygnaðurin í smáu skúlunum broyttur soleiðis, at næmingarnir flyta, tá teir fara í 7. flokk, er møguligt at skipa forskúlalíknandi tilboð í skúlunum á sama hátt sum í Nólsoy, har forskúlalíknandi tilboðið er skipað í samstarvi millum dagstovn og skúla.

Næmingar í Sankta Frans skúla fara í Skúlan á Fløtum, tá teir fara í 8. flokk. Skúlin á Fløtum er bygdur til fimm spor í 8. og 9. árgangi, trý úr Skúlanum á Fløtum og tvey úr Sankta Frans skúla.

Skúlin á Fløtum hevur skipað 8. og 9. flokk í rásir tvær ítróttarrásir og tríggjar almannarásir. Ítróttarásirnar eru ein fótbóltsrás og ein hondbóltsrás, og aðrir næmingar enn teir í Skúlanum á Fløtum og í Sankta Frans skúla søkja inn á hesar rásir. Í ár var støðan so tann, at um ítróttarásirnar skuldu varðveitast, og allir næmingarnir í Sankta Frans skúla skuldu fáa pláss í skúlanum, varð neyðugt at søkja um loyvi at hava seks flokkar í 8. árgangi skúlaárið 2021/22. Frávik varð givið, men talan er um eitt undantak, og tað er bert galdandi fyri skúlaárið 2021/22.

Um næmingar í 8. og 9. flokki í Tórshavnar kommunu skulu hava møguleika at velja breytir/rásir í øðrum skúla, enn skúlanum teir ganga í, er neyðugt at finna eina skipan, har næmingar hava møguleika at velja eftir áhuga. Tað er eisini umráðandi, at skúlarnir kenna næmingagrundarlagið, og at kapasiteturin í ymsu skúlunum verður gagnnýttur.

Uppskot til arbeiðssetning er:

A. at skriva verandi skúlabygnað saman í eina heild og at dagføra hann, soleiðis at greitt er, hvussu skúlabygnaðurin fyri hvønn einstakan skúla sær út.
B. at gera uppskot um, at næmingarnir í smáu skúlunum fara í 7. flokk í størri skúla, hvønn skúla teir fara í, og lýsa hvørjar avleiðingar tað kann hava fyri samlaða skúlabygnaðin í Tórshavnar kommunu.
C. at gera uppskot um, hvønn skúla ella skúlar næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í, tá teir fara í 8. flokk og lýsa hvørjar avleiðingar, tað kann hava fyri samlaða skúlabygnaðin.
D. at gera uppskot um skipanina við 8. flokkunum og møguleikanum at velja, hvønn skúla teir fara í eftir 7. flokk.
E. at gera uppskot um skúlabygnað í hádeild, sum tryggjar, at kapasiteturin í ymsu skúlunum verður gagnnýttur, og at skúlarnir kenna næmingatalið í góðari tíð.

**Umboðan**

Sambært fólkaskúlalógini velur

§ 52 *Stk. 4.* [2)] Skúlastýrið viðger saman við kommunustýrinum uppskot um skúlabygnað kommununnar og broytingar í honum, sbr. § 32, stk. 1. Í teimum kommunum, ið hava tvey ella fleiri skúlastýri, velur kommunustýrið ein arbeiðsbólk, umboðandi øll skúlastýrini, at viðgera uppskot um skúlabygnað, sbr. § 47, stk. 6.

10 skúlastýri eru í Tórshavnar kommunu, og øll skulu vera umboðað í arbeiðsbólkinum, sum skal viðgera uppskot um skúlabygnað.

Umsitingin mælir til, at hesi umboð mannað arbeiðsbólkin:
Aðalbjørg Jógvansdóttir Linklett, forkvinna í skúlastýrinum í Nólsoyar skúla
Marianna á Dul Fríðberg, forkvinna í skúlastýrinum í Skúlanum á Argjahamri
Hallgrím Hansen, formaður í skúlastýrinum í Kollafjarðar skúla
Anna Rein, forkvinna í skúlastýrinum í Sankta Frans skúla
Leivur Simonsen, starvsfólkaumboð í skúlastýrinum í Hoyvíkar skúla
Eydna Vitalis, starvsfólkaumboð í skúlastýrinum í Skúlanum við Løgmannabreyt

Sóleyð Staksberg, starvsfólkaumboð í skúlastýrinum í Velbastaðar skúla
Eyðna Magnussen, skrivari í skúlastýrinum í Eysturskúlanum
Fríðbjørg Hammer, skrivari í skúlastýrinum í Kaldbaks skúla
Regin Marnersson, skrivari í skúlastýrinum í Skúlanum á Fløtum

**Tíðarætlan**
Eftir ætlan fer arbeiðsbólkurin til verka í august, og væntandi verða fýra fundir, so uppskot um skúlabygnað kann verða lagt fyri á fundi í trivnaðarnevndini tann 7. oktober 2021.

Trivnaðarnevndin fær ávegis kunning um arbeiðið, tá arbeiðsbólkurin hevur havt tveir fundir.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 7. mai 2019.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Einki at viðmerkja

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Einki at viðmerkja

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Ongar

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☒

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja arbeiðssetning, umboðan í arbeiðsbólkinum og tíðarætlan.

**Trivnaðarnevndin 25. juni 2021:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kunnað verður um gongdina í arbeiðsbólkinum.

**Trivnaðarnevndin 16. september 2021:** Kunnað varð um gongdina.

Kristianna Winther Poulsen og Jákup Dam vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur havt 5 fundir, og tilmælini frá arbeiðsbólkinum eru hjáløgd, sí skjal 21/02652-14 Dagførdur skúlabygnaður, tilmæli oktober 2021.

Onnur hjáløgd skjøl eru: Svar frá umboðunum í arbeiðsbólkinum viðvíkjandi tilmælunum í "Dagførdur skúlabygnaður, tilmæli oktober 2021", fimm fundarfrágreiðingar og skriv frá skúlastjóranum í Sankta Frans skúla.

Arbeiðsbólkurin er ikki samdur. Hesi eru tilmælini:

**Arbeiðssetningur B -** *at gera uppskot um, at næmingarnir í smáu skúlunum fara í 7. flokk í størri skúla, hvønn skúla teir fara í og lýsa, hvørjar avleiðingar tað kann hava fyri samlaða skúlabygnaðin í Tórshavnar kommunu.*

Tilmæli:

**B 1** Næmingarnir í smáu skúlunum flyta í Eysturskúlan, tá teir fara í 7. flokk.

Skúlabygnaður í smáu skúlunum og Eysturskúlanum verður hesin:

Kaldbaks skúli 1. til og við 6. árgangur. (Skúlin fer eisini at søkja um forskúlaliknandi tilboð).

Velbastaðar skúli 1. til og við 6. árgangur.

Nólsoyar skúli forskúlalíknandi tilboð til og við 6. árgangur.

Eysturskúlin 2 spor í 1. til og við 6. árgangi og 3 spor í 7. til og við 9. árgangi, og 10. árgang til uml. 200 næmingar

**B 2** Næmingarnir í Nólsoyar skúla halda fram í skúlanum til og við 7. flokki.

Skúlabygnaðurin fyri Nólsoyar skúla verður hesin:

Nólsoyar skúli forskúlalíknandi tilboð til og við 7. árgangi.

**B 3** Næmingarnir í smáu skúlunum flyta í Skúlan á Fløtum, tá teir fara í 7. flokk, og so flyta næmingar úr Sankta Frans skúla ikki í Skúlan á Fløtum.

Skúlabygnaður í smáu skúlunum og Skúlanum á Fløtum verður hesin:

Kaldbaks skúli 1. til og við 6. árgangi. (Skúlin fer eisini at søkja um forskúlaliknandi tilboð).

Velbastaðar skúli 1. til og við 6. árgangi.
Nólsoyar skúli forskúlalíknandi tilboð til og við 6. árgangi.

Skúlin á Fløtum 3  spor 0. til og við 6. árgangi og 4 spor í 7. til og við 9. árgangi og 3 serflokkar ein til hvørja deild.

**Arbeiðssetningur C -** *at gera uppskot um, hvønn skúla ella skúlar næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í, tá teir fara í 8. flokk og lýsa hvørjar avleiðingar, tað kann hava fyri samlaða skúlabygnaðin.*

**C 1** Næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í Skúlan á Fløtum í 8. flokk.

Skúlabygnaður sum nú.

**C 2** Sankta Frans skúli fær 8. og 9. flokk.

Skúlabygnaður:

Sankta Frans skúli 2 spor frá forskúla til og við 9. árgangi.

Eysturskúlin 2 spor frá 1. til og við 6. árgangi og 3 spor (næmingarnir úr smáu skúlunum) í 7. til og við 9. árgangi, og 10. árgang til uml. 200 næmingar.

Skúlin á Fløtum 3 sporaður frá 0. til og við 9. árgangi, ella 3 sporaður frá 0. til og við 6. árgangi og 4 sporaður frá 7. til og við 9. árgangi., um næmingarnir í Velbastaðar skúla fara í 7. flokk í Skúlan á Fløtum.

**C 3** Næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í 8. flokk Eysturskúlan.

Sankta Frans skúli 2 spor frá forskúla til og við 9. árgangi.

Eysturskúlin 2 spor frá 1. til og við 7. árgangi og 5 spor í 8. og 9. árgangi, og 10. árgang til uml. 200 næmingar. Ella 2 spor frá 1. til og við 6. árgangi og 3 spor í 7. um næmingar í smáu skúlunum fara í Eysturskúlan í 7. flokk., 5 spor í 8. og 9. árgangi, og 10. árgang til uml. 200 næmingar.

Skúlin á Fløtum 3 sporaður frá 0. til og við 9. árgangi ella 4 spor frá 7. til og við 9., um næmingarnir av Velbastað og møguliga hinum báðu smáu skúlunum fara í 7. flokk í Skúlan á Fløtum.

**C 4** Sankta Frans skúli og Eysturskúlin verða lagdir saman, og nýggjur skúli bygdur til samanlagda skúlan.

Bygnaður fyri samanlagda skúlan:

4 spor í 0. til og við 6. árgangi, 4 ella 5 spor (smáu skúlarnir) í 7. til og við 9. árgangi og 10. árgang til uml. 200 næmingar.

Skúlin á Fløtum 3 sporaður frá 0. til og við 9. árgangi ella 4 spor frá 7. til og við 9. árgangi, um næmingarnir av Velbastað og møguliga hinum báðu smáu skúlunum fara í 7. flokk í Skúlan á Fløtum.

**Arbeiðssetningur D -**  *at gera uppskot um skipanina við 8. flokkunum og møguleikanum at velja, hvønn skúla teir fara í eftir 7. flokk.*

**D 1** Skúlarnir í Tórshavnar kommunu, sum hava 8. og 9. flokk skipa hádeildina innan fyri egnar karmar við teimum næmingum, sum ganga í skúlanum.

Skúlabygnaðurin broytist ikki, men næmingar hava ikki sama møguleika at velja rás sum nú. Skúlarnir kenna næmingagrundarlagið í góðari tíð.

**D 2** Skúlarnir í Tórshavnar kommunu, sum hava 8. og 9. flokk kunnu skipa rásir og tilboð, næmingar í øðrum skúla kunnu velja hesar rásir ella tilboð og fáa pláss í skúlanum, um pláss eru tøk har.

Talan kundi eisini verið um tveir ella tríggjar av skúlunum í kommununi, sum bert høvdu hádeild, meðan hinir høvdu grund- og miðdeild.

**Arbeiðssetningur E** - *at gera uppskot um skúlabygnað í hádeild, sum tryggjar, at kapasiteturin í ymsu skúlunum verður gagnnýttur, og at skúlarnir kenna næmingatalið í góðari tíð*

Arbeiðssetningur C og E hanga eitt sindur saman, og tí er E partvís viðgjørdur undir C.

**Arbeiðssetningur A -** *at skriva verandi skúlabygnað saman í eina heild og at dagføra hann, soleiðis at greitt er, hvussu skúlabygnaðurin fyri hvønn einstakan skúla sær út.*

Við støði í tilmælunum frá arbeiðsbólkinum eru hesi trý uppskot um dagførdan skúlabygnað:

**Dagførdur skúlabygnaður 1**

Nólsoyar skúli
- Forskúlalíknandi tilboð - 6. árgangur (ella 7. árgangur eisini)
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í Skúlan á Fløtum í 7. flokk (ella í 8. flokk)

Kaldbaks skúli
- 1. - 6. árgangur
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í Skúlan á Fløtum í 7. flokk

Velbastaðar skúli
- 1. - 6. árgangur
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í Skúlan á Fløtum í 7. flokk

Kollafjarðar skúli
- 1. – 9. árgangur
- næmingarnir eru býttir í flokkar
- hevur 1 spor

Skúlin á Argjahmri
- forskúli – 9. árgangur
- hevur 2 spor

Skúlin á Fløtum
- forskúli – 6. árgangur, 3 spor
- 7. – 9. árgangur, 4 spor
- 3 serflokkar
- Sertilboð 4-10 er á Argjum til 50 næmingar
- Lopfjølin er í Margarinfabrikkini, 13 næmingar í 20/21

Sankta Frans skúli
- forskúli – 7. árgangur
- hevur 2 spor

- næmingarnir fara í Eysturskúlan í 8. fl.

Eysturskúlin
- 1. - 7. árgangur, 2 spor
- 8. – 9. árgang, 4 spor
- Nám X (10. árgangur) til 200 næmingar
- Nám X er ikki býtt í flokkar, hava breytir og vanligar lærugreinir
- Sertilboð til 1. – 3. árgang, 15 næmingar í ár

Hoyvíkar skúli
- 1- 9. árgangur, 2 spor
- Sertilboð til næmingar við autismu/menningarórógvi, til børn sum hava tørv á ávísari námsfrøði, 16 næmingar

Skúlin við Løgmannabreyt
- 1. – 9. árgangur
- Hvør árgangur er ein flokkur (næmingatal upp til 2 spor)

**Dagførdur skúlabygnaður 2**

Nólsoyar skúli
- Forskúlalíknandi tilboð - 6. árgangur (ella 7. árgangur eisini)
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í Eysturskúlan í 7. flokk (ella í 8. flokk).

Kaldbaks skúli
- 1. - 6. árgangur
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í í Eysturskúlan í 7. flokk

Velbastaðar skúli
- 1. - 6. árgangur
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í í Eysturskúlan í 7. flokk

Kollafjarðar skúli
- 1. – 9. árgangur
- næmingarnir eru býttir í flokkar
- hevur 1 spor

Skúlin á Argjahmri
- forskúli – 9. árgangur
- hevur 2 spor

Skúlin á Fløtum
- forskúli – 9. árgangur, 3 spor
- 3 serflokkar ein til hvørja deild, grund-, mið- og hádeild
- Sertilboð 4-10 er á Argjum til 50 næmingar
- Lopfjølin er í Margarinfabrikkini, 13 næmingar í 20/21

Sankta Frans skúli

- forskúli – 9. árgangur, næmingarnir fara í Skúlan á Fløtum til høli eru tøk til 8. og 9. Flokk í Sankta Frans skúla
- hevur 2 spor

Eysturskúlin
- 1.- 7. árgangur, 2 spor
- 8. – 9. árgangur, 3 spor
- Nám X (10. árgangur) til 200 næmingar
- Nám X er ikki býtt í flokkar, hava breytir og vanligar lærugreinir
- Sertilboð til 1. – 3. árgang, 15 næmingar

Hoyvíkar skúli
- 1. - 9. árgangur, 2 spor
- Sertilboð til næmingar við autismu/menningarórógvi, til børn sum hava tørv á ávísari námsfrøði, 16 næmingar

Skúlin við Løgmannabreyt
- 1. – 9. árgangur
- Hvør árgangur er ein flokkur (næmingatal upp til 2 spor)

**Dagførdur skúlabygnaður 3**

Nólsoyar skúli
- Forskúlalíknandi tilboð - 6. árgangur ( ella 7. árgangur eisini)
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í Skúlan á Fløtum í 7. flokk (ella í 8. flokk)

Kaldbaks skúli
- 1. - 6. árgangur
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í í Skúlan á Fløtum í 7. flokk

Velbastaðar skúli
- 1. - 6. árgangur
- næmingarnir eru ikki býttir í árgangsflokkar, men bólkar tvørtur um árgangir
- bólkarnir eru t.d. yngsti-, mið- og elsti bólkur
- næmingarnir fara í í Skúlan á Fløtum í 7. flokk

Kollafjarðar skúli
- 1. – 9. árgangur
- næmingarnir eru býttir í flokkar
- hevur 1 spor

Skúlin á Argjahmri
- forskúli – 9. árgang
- hevur 2 spor

Skúlin á Fløtum
- forskúli – 6. árgangur, 3 spor
- 7. – 9. árgangur, 4 spor

- 3 serflokkar ein til hvørja deild, grund-, mið- og hádeild
- Sertilboð 4-10 er á Argjum til 50 næmingar
- Lopfjølin er í Margarinfabrikkini, 13 næmingar í 20/21

Sankta Frans skúli og Eysturskúlin (samanlegging)
- forskúli – 9. árgangur, 4 spor
- Nám X (10. árgangur) til 200 næmingar
- Nám X er ikki býtt í flokkar, hava breytir og vanligar lærugreinir
- Sertilboð til 1. – 3. árgang, 15 næmingar

Hoyvíkar skúli
- 1. - 9. árgangur, 2 spor
- Sertilboð til næmingar við autismu/menningarórógvi, til børn sum hava tørv á ávísari námsfrøði, 16 næmingar

Skúlin við Løgmannabreyt
- 1. – 9. árgangur
- Hvør árgangur er ein flokkur (næmingatal upp til 2 spor).

**Íverksetan:**
Skúlabygnað 1 ber til at seta í verk skúlaárið eftir, at góðkenning er frá landsstýrismanninum. So tað kundi verið frá skúlaárinum 2022/23.

Skúlabygnaður 2 kann vera galdandi frá skúlaárinum 2022/23, treytað av góðkenning frá landsstýrismanninum. Tó kann parturin við hádeild til Sankta Frans skúla ikki setast í verk fyrrenn høli eru tøk til 8. flokk og so árið eftir til 9. flokk eisini. Verður hesin skúlabygnaður settur í verk, er neyðugt at seta arbeiðsbólk at viðgera uppskotið, at Sankta Frans skúli fær 8. og 9. flokk og viðgera hølisloysn og kostnaðarmeting.

Skúlabygnaður 3 – partar av honum kunnu vera galdandi frá skúlaárinum 2022/23 treytað av góðkenning frá landsstýrismanninum. Tó er neyðugt at seta ein bólk við umboðum fyri Sankta Frans skúla og Eysturskúlan at viðgera samanlegging av báðum skúlunum, hvussu mannagongdin skal vera, at skipa fyri samansjóðing av báðum skúlunum o.ø. samanleggingin kundi so verið frá skúlaárinum 2023/24.

**Víðari tilgongd:**
Bólkurin hevur tosað um samanlegging av Sankta Frans skúla og Eysturskúlanum. Um tað uppskotið skal fremjast, krevur tað longri tíð, og eigur at kannast nærri, og ætlan gerast fyri, hvussu ein møgulig samanlegging verður skipað. Bólkur umboðandi Sankta Frans skúla og Eysturskúlan eigur so at arbeiða við uppskotinum um samanlegging, sum so verður lagt fyri arbeiðsbólk umboðandi øll skúlastýrini at viðgera

Uppskotið at skipa hádeildina í Tórshavnar kommunu í ein til tríggjar ungdómsskúlar er eisini eitt størri stig, og um tað skal fremjast, eigur nýggjur arbeiðsbólkur at arbeiða við tí og síðani leggja uppskot fyri arbeiðsbólk umboðandi øll skúlastýrini at viðgera tað.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla trivnaðarnevndini til at samtykkja, at
a) næmingarnir í smáu skúlunum fara í størra skúlan, tá teir fara í 7. flokk, næmingarnir í Velbastaðar skúla fara í Skúlan á Fløtum, og næmingarnir í Nólsoyar skúla og Kaldbaks skúla fara í Eysturskúlan.

b) næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk, og bólkur verður settur at viðgera eina møguliga samanlegging av Sankta Frans skúla og Eysturskúlanum, ella um Sankta Frans skúli skal hava 8. og 9. flokk ella halda fram sum nú, ein skúli við næmingum úr forskúla til og við 7. flokki, og næmingarnir fara so í Eysturskúlan í 8. flokk.

c) skúlarnir í Tórshavnar kommunu, sum hava 8. og 9. flokk kunnu skipa rásir og tilboð, næmingar úr øðrum skúla kunnu velja hesar rásir og tilboð og fáa pláss í skúlanum, um pláss eru tøk har innanfyri skúlabygnaðin.

**Trivnaðarnevndin 26. oktober 2021:** Samtykt at taka undir við tilmæli a) og c). Viðvíkjandi tilmæli c), so skulu skúlarnir, sum hava 8.-9. flokk, gera uppskot til leiðreglur um upptøku til rásir og tilboð í 8.-9. flokki, at leggja aftur fyri nevndina.

Harumframt samtykt, at arbeiðsbólkur verður settur við umboðum fyri Sankta Frans skúla og Eysturskúlan at gera uppskot til skúlabygnað, harundir møguligt samstarv, um grunddeild, miðdeild, hádeild, serflokk o.a., at leggja aftur fyri nevndina til fund í mars 2022. Til niðurstøða fyriliggur, fara næmingarnir í Sankta Frans skúla í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk.

Málið verður beint í býráðið.

**Ískoyti:**
Forkvinnan setir málið á skrá við uppskoti um at broyta samtyktina omanfyri um arbeiðsbólk við umboðum fyri Sankta Frans skúla og Eysturskúlan at gera uppskot til skúlabygnað, til í staðin at samtykkja, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2022/23 hevur hádeild, og at bygningurin í Kongagøtu verður partur av Sankta Frans skúla.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka støðu til uppskotið.

**Trivnaðarnevndin 15. november 2021:** Ein meiriluti, Súna Mørk, Kristianna Winther Poulsen og Bjørg Dam, samtykti at broyta uppskotið til skúlabygnað soleiðis, at Sankta Frans skúli frá skúlaárinum 2022/23 hevur hádeild, og at bygningurin í Kongagøtu verður partur av Sankta Frans skúla.

Ein minniluti, Jákup Dam og Gunvør Balle, samtykti at halda fast í samtyktini 26. oktober 2021 um arbeiðsbólk.

Málið verður beint í býráðið.

**Ískoyti:**
Forkvinnan setir málið á skrá við uppskoti at broyta nevndarsamtyktina 15. november 2021.

**Trivnaðarnevndin 23. november 2021:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Forkvinnan setir fram hetta uppskot:

- At næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk
- At næmingarnir í Velbastaðar skúla fara í Skúlan á Fløtum, tá teir fara í 7. flokk
- At næmingarnir í Kaldbaks skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 7. flokk
- At bygnaðurin fyri Skúlan á Fløtum verður broyttur soleiðis, at 8.-9. flokkur er fýra spor umframt serflokk (fevnir um 7.-9. floksstig)
- At skúlarnir í Tórshavnar kommunu, sum hava 8. og 9. flokk, kunnu skipa rásir og tilboð; næmingar úr øðrum skúla kunnu velja hesar rásir og tilboð og fáa pláss í skúlanum, um pláss eru tøk har innan fyri skúlabygnaðin. Skúlar kunnu eisini samstarva um rásir og tilboð.
- At umsitingin kannar møguleikar fyri at skipa hádeild/framhaldsdeild í kommununi av nýggjum. Endamálið skal m.a. vera at geva næmingunum eitt fjølbroytt og mennandi skúlaumhvørvi og valmøguleikar viðvíkjandi lærugreinum, breytum o.ø., og at gagnnýta høliskapasitet, læraratilfeingið o.a. tvørturum

skúlar. Kanningin skal m.a. spyrja verandi og komandi næmingar í hádeild í ymsu skúlunum um teirra sjónarmið og ynskir. Kanningin skal eisini lýsa tørv og gera uppskot til eitt nú:
- Framhaldsdeild í Sankta Frans skúla
- Samstarv millum skúlar um felags hádeild/framhaldsdeild
- Aðrar skúlaskipanir so sum ítróttaakademi, ungdómsskúli v.m.

**Trivnaðarnevndin 13. januar 2022:** Samtykt at broyta nevndarsamtyktina 15. november 2021 viðvíkjandi bygninginum í Kongagøtu og samtyktina 26. oktober 2021 viðvíkjandi Nólsoyar skúla. Hetta merkir, at næmingarnir í Sankta Frans skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 8. flokk, meðan møguleikin at skipa 8.-9. flokk í Sankta Frans skúla verður kannaður, og at Nólsoyar skúli framhaldandi hevur 1.-7. flokk.
Harumframt samtykt:
- At næmingarnir í Velbastaðar skúla fara í Skúlan á Fløtum, tá teir fara í 7. flokk
- At næmingarnir í Kaldbaks skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 7. flokk
- At bygnaðurin fyri Skúlan á Fløtum verður broyttur soleiðis, at 8.-9. flokkur er fýra spor umframt at rúm skal gerast fyri serflokki
- At skúlarnir í Tórshavnar kommunu, sum hava 8. og 9. flokk, kunnu skipa rásir og tilboð; næmingar úr øðrum skúla kunnu velja hesar rásir og tilboð og fáa pláss í skúlanum, um pláss eru tøk har innan fyri skúlabygnaðin. Skúlar kunnu eisini samstarva um rásir og tilboð.
- At umsitingin kannar møguleikar fyri at skipa hádeild/framhaldsdeild í kommununi av nýggjum sbrt. uppskotinum omanfyri.

Jákup Dam var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 19. januar 2022:** Umrøtt og beint í býráðið.

**Býráðsfundur 27. januar 2022:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Gunvør Balle, býráðslimur, ynskir at fáa málið á skrá.

**Trivnaðarnevndin 10. februar 2022:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Annika Olsen biður vegna minnilutan um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 24. februar 2022:** Heðin Mortensen legði fram soljóðandi broytingaruppskot, ið hann mælti býráðnum til at atkvøða um:

Dagføring av skúlabygnaðinum í Tórshavnar kommunu

UMMR hevur boðað frá, at UMMR gongur áheitanini á møti um, at Skúlin á Fløtum tekur seks flokkar inn í 8. flokki skúlaárið 2022/2023, soleiðis at næmingarnir í 7. flokki í Sankta Frans skúla kunnu halda fram í 8. flokki í Skúlanum á Fløtum.

**Uppskot frá borgarstjórin til býráðið at samtykkja:**
a) at staðfesta, at skúlaárið 2022/2023 hevur Skúlin á Fløtum seks flokkar í 8. Flokki samsvarandi góðkenning frá UMMR;

b) at søkja UMMR um at broyta skúlabygnaðin, so at Sankta Frans skúli verður tvísporaður skúli frá forskúla-9. flokk frá skúlaárinum 2023/2024, og at Skúlin á Fløtum verður fýra sporaður í 7.-9. flokki frá skúlaárinum 2023/2024, sum gevur møguleikar fyri flokshølum til serøkið;

c) at søkja UMMR um at góðkenna, at Velbastaðar skúli frá skúlaárinum 2022/2023 verður skúli 1.-6. flokk, og at næmingarnir fara í Skúlan á Fløtum, tá teir fara í 7. flokk, og at Kaldbaks skúli frá skúlaárinum 2022/2023 verður skúli við forskúlalíknandi tilboð-6. flokk, og at næmingar í Kaldbaks skúla fara í Eysturskúlan, tá teir fara í 7. flokk, og

d) at skúlarnir við framhaldsdeild kunnu skipa rásir og tilboð; næmingar úr øðrum skúlum kunnu velja hesar rásir og tilboð og fáa pláss í skúlanum, um pláss eru tøk innan fyri skúlabygnaðin. Skúlar skulu samstarva um rásir og tilboð.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, tveimum blonkum og ongari atkvøðu ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Kristianna Winther Poulsen, Kári Johansen, Elsa Berg, Jákup Dam, Jóhan Petur Johannesen, Gunvør Balle, Annika Olsen, Birgir Nielsen og Ruth Vang.

Blankt atkvøddu: Súna Mørk og Bjørg Dam.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:15**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Tróndur Sigurðsson | Kári Johansen |
| Kristianna Winther Poulsen | Súna Mørk | Bjørg Dam |
| Elsa Berg | Jákup Dam | Gunvør Balle |
| Annika Olsen | Birgir Nielsen | Ruth Vang |
| | Jóhan Petur Eyðfinnur Johannesen | |